| | Blað nr.: 464 |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>30. mai 2024 | Formansins merki: |

# GERÐABÓK

**Dato:** 30. mai 2024 **Kl**. 16:00
**Stað:** Býráðssalurin
**Málsnr:** 109/24-141/24

**FUNDARLEIÐARI:**
Heðin Mortensen

---

**VIÐ LUTTØKU AV:**
Annfinn Brekkstein
Tróndur Sigurðsson
Kári Johansen
Kristianna Winther Poulsen
Súna Mørk
Bjørg Dam
Jákup Dam
Gunvør Balle
Annika Olsen
Birgir Nielsen
Súsanna Olsen
Turið Horn

**LUTTÓKU EISINI:**
Bogi Jacobsen
Hermann Mortensen
Eydna Justinussen
Eyðfríð Jacobsen
David Andresen

**LUTTÓKU IKKI:**

**SKRIVARI:**
Jóan Petur Hentze

**PROTOKOLLFØRARI:**
Olga Knudsen/Anna Havmand

**Innihaldsyvirlit** **Síða**

**Til viðgerðar**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 109/24 | 24/00063-1 | Mál beind í nevndir 2024 | 467 |
| 110/24 | 23/04826-13 | Matr.nr. 91ah, Kollafjørður. Eigari letur óbygda grundstykkið innaftur til Kommununa. | 469 |
| 111/24 | 24/02183-5 | Matr.nr. 91ai, Kollafjørður. | 471 |
| 112/24 | 24/02510-2 | Matr.nr. 50v, Velbastaður. Eigari søkir um loyvi til víðarisølu av grundstykkinum. | 473 |
| 113/24 | 23/05023-8 | Fyrispurningur um keyp av ognunum hjá katólsku kirkjuni í Føroyum | 475 |
| 114/24 | 22/01517-1 | Ungt summar | 478 |
| 115/24 | 23/02751-1 | Samskipan og tulkatænasta - flóttafólk úr Ukraina | 482 |
| 116/24 | 23/03546-1 | Framtíðartryggja eldraøkið - reingerðartænastan | 491 |
| 117/24 | 23/06151-1 | Ríðibreyt í Havnardali, Føroya Ríðingarfelag | 499 |
| 118/24 | 23/03453-2 | Nýggjur durur til fimleikahøllina í skúlanum á Argjahamri | 503 |
| 119/24 | 24/02478-2 | Høli til Tórshavn Boksing í Bacalao | 507 |
| 120/24 | 24/01809-2 | Bráðfeingis skiftirhølir til Hoyvíksvøllin | 510 |
| 121/24 | 16/02772-1 | 06-12 Málslýsing - Hoyvíkar skúli dagføring | 513 |
| 122/24 | 24/01788-1 | Skipan av nýggjum frítíðartilboðum til 3. - 6. flokk | 521 |
| 123/24 | 16/01243-4 | Trivnaðarnevndin: Umbøn frá eldraráðum um broyting av viðtøkunum, soleiðis at heimild verður fyri at útgjalda fundarpening e.l. | 526 |
| 124/24 | 24/02901-1 | Val av valnevnd til eldraráðsvalið 2024 | 532 |
| 125/24 | 23/01151-5 | Makaskifti við matr. nr. 1300a og Tórshavnar kommunu | 534 |
| 126/24 | 14/05161-3 | Útstykking á Kongavarða til grundstykkir á matr. nr. 255a, Argir | 536 |
| 127/24 | 24/00552-1 | Fleiri koyritímar til bussleiðina | 542 |
| 128/24 | 24/02102-1 | Fríðkan av býnum, Kongaminni o.a. | 547 |
| 129/24 | 20/00622-1 | Heildarætlan fyri Karlamagnusarbreyt | 549 |
| 130/24 | 21/02554-2 | Umsókn um serstøk byggisamtykt verður gjørd fyri matr. nr. 410a, 411d, 413a, 413b, Tórshavn | 559 |
| 131/24 | 21/04379-6 | Umsókn um broyting av almennu byggisamtyktini - krav um løðistøðir til elbilar | 564 |

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>30. mai 2024 | Blað nr.: 466<br>Formansins merki: |


| | | | |
|---|---|---|---|
| 132/24 | 22/04933-1 | Endurskoðan av byggisamtyktini fyri Hvítanes | 566 |
| 133/24 | 22/04934-1 | Endurskoðan av byggisamtyktini fyri Nólsoy | 569 |
| 134/24 | 22/04935-1 | Endurskoðan av byggisamtyktini fyri Kaldbak | 572 |
| 135/24 | 23/01978-1 | Broyting av byggisamtyktini fyri matr. nr. 320a, Kollafjørður. Frá B1 til D1 | 575 |
| 136/24 | 24/02743-1 | Kanningar flogvøllur á Glyvursnesi | 578 |
| 137/24 | 24/02715-1 | Uppskot um at hækka talið á býráðslimum | 581 |
| 138/24 | 24/02033-1 | Framflytingar fyri roknskaparárið 2023 | 583 |
| 139/24 | 24/00061-1 | Góðkenning av mánaðarroknskapinum 2024 | 585 |
| 140/24 | 15/01400-1 | Serstøk nevnd at fyrireika nýggjan svimjihyl | 587 |
| 141/24 | 22/02943-1 | Útstykking til sethús í Stórutjørn | 606 |

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>30. mai 2024 | Blað nr.: 467 |
| | Formansins merki: |

**Til viðgerðar**

## 109/24 Mál beind í nevndir 2024

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 25.01.2024 | 3/24 | 24/00063-1 |
| 2 Býráðsfundur | 29.02.2024 | 27/24 | 24/00063-1 |
| 3 Býráðsfundur | 21.03.2024 | 51/24 | 24/00063-1 |
| 4 Býráðsfundur | 24.04.2024 | 72/24 | 24/00063-1 |
| 5 Býráðsfundur | 30.05.2024 | 109/24 | 24/00063-1 |

**Upprunin til málið**

**Lýsing av málinum**

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:**

**Býráðsfundur 25. januar 2024:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 29. februar 2024:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 21. mars 2024:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 24. apríl 2024:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 30. mai 2024:** Einmælt samtykt.

| | Býráðsfundur 30. mai 2024 | Blað nr.: 469 |
|---|---|---|
| | | Formansins merki: |

## 110/24 Matr.nr. 91ah, Kollafjørður. Eigari letur óbygda grundstykkið innaftur til Kommununa.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 22.05.2024 | 139/24 | 23/04826-13 |
| 2 Býráðsfundur | 30.05.2024 | 110/24 | 23/04826-13 |

**Upprunin til málið.** Talan er um óbygt grundstykkið Eigari er sinnaður at lata grundstykkið innaftur til Tórshavnar kommunu.

**Lýsing av málinum**

Matr.nr. 91ah, Kollafjørður. ( í Útstykking á Hamrabøi )
Vídd 530 m².
Grundstykkið er ógrivið.
Søluprísur 249.105,30
Skeytið er tinglýst 22.02.2019

**Lógir, ásetingar o.a.**

- Kommunustýrislógin
- Kunngerð nr. 122 frá 22 desember 2000 um alment útboð av kommunalari ogn.
- Tinglýstir servituttir.
- Reglugerð fyri viðgerð av umsókn og útlutan av fastari ogn til privatan bústað

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl: Kortskjal. Tinglýst skeyti.**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | x | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

| | Býráðsfundur<br>30. mai 2024 | Blað nr.: 470 |
|---|---|---|
| | | Formansins merki: |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☒
Eyka játtan ☐
Lokað verkætlan ☐

| Játtast av: | | |
|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** |
| 6175 | | Keyp og søla |

| Játtast á: | | | |
|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** |
| | | | |

| **Upphædd** |
|---|
| |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | 249.105,30 |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2024 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | 0 |

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og leiðarin á stjórnarskrivstovuni mæla býráðnum til umvegis fíggjarnevndina, at keypa stykkið aftur fyri upprunaligan sølupris kr. 249.105,30 og at luta stykkið útaftur sambært reglugerð. Seljarin rindar kostnað fyri tinglýsing.

**Fíggjarnevndin 22. mai 2024:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 30. mai 2024:** Einmælt samtykt.

# 111/24 Matr.nr. 91ai, Kollafjørður.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 22.05.2024 | 138/24 | 24/02183-5 |
| 2 Býráðsfundur | 30.05.2024 | 111/24 | 24/02183-5 |

**Upprunin til málið.** Eigarar hava vent sær til kommununa við umbøn um at kommunan keypir grundstykkið aftur.

**Lýsing av málinum.**
Matr.nr. 91ai, Kollafjørður. ( Hamrabøur )
Vídd 601 m².
Grundstykkið er ógrivið.
Søluprísur kr. 295.000,00
Skeytið tinglýst 30.06.2021
Grundstykkið varð selt í fríðari sølu í 2021, men við vanligum kommunalum servituttum um byggifreist og víðarisølu.

**Lógir, ásetingar o.a.**

- Kommunustýrislógin
- Kunngerð nr. 122 frá 22 desember 2000 um alment útboð av kommunalari ogn
- Tinglýstir servituttir
- Reglugerð fyri viðgerð av umsókn og útlutan av fastari ogn til privatan bústað

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**. Kort.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☒ Nei
**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☒ Nei

| | **Býráðsfundur**<br>30. mai 2024 | Blað nr.: 472<br><br>Formansins merki: |
|---|---|---|

## Játtan:

Vanlig játtan ☐
Eyka játtan ☐
Lokað verkætlan ☐

| Játtast av: | | |
|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** |
| | | |

| Játtast á: | | | |
|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** |
| | | | |

| **Upphædd** |
|---|
| |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli:**

Talan er um eitt grundstykkið sum kommunan hevur selt í fríðari sølu til hægstbjóðandi.

Kommunustjórin og leiðarin á stjórnarskrivstovuni mæla býráðnum til, umvegis fíggjarnevndina,  ikki at keypa grundstykkið aftur, men heldur at loyva eigara at selja stykkið í fríðari sølu.

**Fíggjarnevndin 22. mai 2024:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 30. mai 2024:** Einmælt samtykt.

# 112/24 Matr.nr. 50v, Velbastaður. Eigari søkir um loyvi til víðarisølu av grundstykkinum.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 22.05.2024 | 140/24 | 24/02510-2 |
| 2 Býráðsfundur | 30.05.2024 | 112/24 | 24/02510-2 |

**Upprunin til málið.** Umsókn frá eigara.

**Lýsing av málinum.**
Matr. nr. 50v, Velbastaður. Óplanerað grundstykki. Vídd 661m².

Kommunan kravdi óbygda grundstykkið innaftur í 2017, og lýsti síðani grundstykkið til sølu í fríðari sølu hjá ognarmeklara. Sambært meklara var talan um brattlendi, og at tað einans ber til at byggja eini serstøk – arkitekt teknaði hús á stykkinum. Grundstykkið var út frá hesum virðismett til millum 125.000 og 150.000 kr. Verandi eigarar keyptu stykkið fyri hægsta boð kr. 200.000,- Skeytið varð tinglýst 08.02.2018

Eigarar hava kannað møguligan kostnað at planerað grundstykkið, og er metingin at hetta verður so dýrt, at tað verður ikki møguligt at fáa grundstykkið byggibúgvi.

Verandi eigarar víðariskeytað hin 15.04.2024 við gávubrævið grundstykkið. Virðið er ásett til kr. 400.000,-

Verandi eigarar meta, at tey kunnu geva/selja grundstykkið víðari, vísandi til at tey hava keypt grundstykkið í fríðari sølu.

**Lógir, ásetingar o.a.** Tinglýstir servituttir um byggifreist og víðarisølu.
Í søluskeytinum frá 25.09.2001. Tinglýstur servituttur § 3. Áðrenn 2 ár frá tí at skeytið er tinglýst, skulu sethús verða bygd á ognini. Annars kann seljarin krevja stykkið aftur ímóti, at keypararnir fáa keypspeningin og tað teir hava goldið fyri byggibúning afturgoldið uttan rentur.
Keypararnir kunnu ikki uttan loyvi selja ognina víðari, fyrr enn sethús eru bygd á stykkinum. Ásetingarnar verða at tinglýsa sum ítaksbindandi á ognini. Átalurætt hevur seljarin.

Í søluskeytinum frá 14.02.2018 verður víst til verandi tinglýstar servituttir.

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið.**

Mál 22/01848. Mál um grundstykki í Kaldbak. Vísandi til at talan var um eitt grundstykkið, sum kommunan hevði selt í fríðari sølu, samtykti kommunan at loyva víðarisølu av óbygda grundstykkinum.

Mál 23/04493. Mál um grundstykki í Kerjagøtu. Kommunan samtykti at strika servituttin um byggifreist, vísandi til, at talan var um eitt grundstykki, sum kommunan hevði selt í fríðari sølu.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

| | Býráðsfundur<br>30. mai 2024 | Blað nr.: 474 |
|---|---|---|
| | | Formansins merki: |

**Skjøl.** Kortskjal.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☒ Nei

**Tilmæli:** Visandi til, at talan er um eitt grundstykkið sum er selt í fríðari sølu til hægstbjóðandi, mæla kommunustjórin og leiðarin á stjórnarskrivstovuni til at loyva viðarisølu av ognini matr.nr. 50v, Velbastaður.

**Fíggjarnevndin 22. mai 2024:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 30. mai 2024:** Einmælt samtykt.

# 113/24 Fyrispurningur um keyp av ognunum hjá katólsku kirkjuni í Føroyum

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 20.09.2023 | 247/23 | 23/05023-8 |
| 2 Fíggjarnevndin | 29.05.2024 | 151/24 | 23/05023-8 |
| 3 Býráðsfundur | 30.05.2024 | 113/24 | 23/05023-8 |

**Upprunin til málið**
Fyrispurningur frá katólsku kirkjuni í Føroyum, fransiskanarasystrunum.

**Lýsing av málinum**
Eftir at hava verið í Føroyum síðani 1931, hevur katólska kirkjan gjørt av at steinga kleystrið hjá fransiskanarasystrunum, sum tískil fara úr Føroyum í juni í 2024. Umboð fyri katólsku kirkjuna hava í hesum sambandi verið á fundi við Tórshavnar kommunu, har tey hava boðið kommununi at yvirtaka bygningarnar hjá meinigheitini fyri eitt mett virði. Talan er um dagstovnin á matr. nr. 729g, sum verður rikin sum sjálvsognarstovnur, umframt kleystrið, sum stendur á matr. nr. 779a, ið eisini hýsur Mariukirkjuni, og sum ætlanin er at sundurbýta í egið matr. nr.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**
Dagstovnurin á matr. nr. 779g, Varðagøta 12, stendur á eini ogn, ið er til víddar 1.375 m². Bygningurin er bygdur í 1965 og er til víddar uml. 540 m², og íalt er bygningurin til víddar uml. 812 m² innan. Bygningurin er væl hildin og væl bygdur, og ábøtur eru gjørdar leypandi, síðani bygningurin varð bygdur. Takið og vindeygu eru skift í 2018.

Kleystrið á matr. nr. 779a, Varðagøta 16, stendur á eini ogn, ið er til víddar 2.762 m², og er talan um somu ogn, ið Mariukirkjan stendur á. Ætlanin er at sundurbýta ognina, so kleystrið og Marikukirkjan standa á hvør sínum matr.
Kleysturbygningurin er bygdur í 1980, víddin er uml. 304 m², og gólvvíddin er uml. 440 m². Talan er um arkitektteknaðan bygning í 3 hæddum. 11 kømur umframt skrivstova, uppihaldsrúm, stórur køkur v.m. eru í bygninginum.

Báðir bygningarnir kunnu hýsa kommunalum virksemi, sum tørvur er á. Dagstovnurin hevur væl virkandi viksemi í dag, og kann hetta halda fram í bygninginum, meðan kleysturbygningurin kann brúkast til annað kommunalt virksemi eitt nú á eldra- ella trivnaðarøkinum.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|

| | **Býráðsfundur**<br>30. mai 2024 | Blað nr.: 476<br><br>Formansins merki: |
|---|---|---|

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei
**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☐
Eyka játtan ☐
Lokað verkætlan ☐

| **Játtast av:** | | |
|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** |
| | | |

| **Játtast á:** | | | |
|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** |
| | | | |

| **Upphædd** |
|---|
| |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli:** Kommunustjórin og trivnaðarstjórin mæla til at heimila fyrisitingini at bjóða upp á matr. 779g og at leggja málið fyri aftur fíggjarnevnd og býráð, tá ella um samráðingarnar bera á mál.

**Fíggjarnevndin 20. september 2023:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:** Skt. Jósefs barnagarður er partur av kommunala ansingartilboðnum á dagstovnaøkinum, og umráðandi er at tryggja, at henda støða ikki broytist, nú katólska meinigheitin ætlar at avhenda ognirnar í Føroyum.

Samskifti hevur verið við meinigheitina seinastu tíðina, og Tórshavnar kommuna hevur í hesum sambandi boðið meinigheitini at keypa Skt. Jósefs barnagarð fyri eina upphædd áljóðandi kr. 8.000.000.

Meinigheitin hevur tikið av hesum tilboði, sum frá kommununnar síðu er treytað av góðkenning í fíggjarnevnd og býráði, og málið verður tískil lagt fyri býráðið umvegis fíggjarnevndina til støðutakan.

Tá ið kommunan hevur yvirtikið ognina, er ætlanin at halda fram við dagstovnavirkseminum í barnagarðinum, men skal hesin ikki longur rekast av sjálvsognarstovninum, sum higartil hevur tikið sær av at reka barngagarðin.

Ætlanin er, at stovnurin verður vanligur, kommunalur dagstovnur eins og aðrir kommunalir dagstovnar, og at kommunan bjóðar starvsfólkunum starv í yvirtikna kommunala dagstovninum. Raksturin verður framhaldandi fíggjaður yvir fíggjarætlanina hjá Tórshavnar kommunu eins og aðrir dagstovnar. Hinvegin dettur burtur leigugjald kr. 330.000, sum kommunan hevur rindað árliga.

**Tilmæli:**

Kommunustjórin og Trivnaðarstjórin mæla til at Tórshavnar kommuna keypir matr. nr. 779g, Tórshavn, fyri kr. 8.000.000,00 og játtar kr. 8.000.000 til keypið sum eykajáttan av konto 6175 Umsiting og røkt av fastari ogn íløgur (keyp og søla) og síðani yvirtekur Skt. Jósefs barnagarð, ið eftir hetta verður kommunalur dagstovnur.

**Fíggjarnevndin 29. mai 2024:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið til tvær viðgerðir.

**Býráðsfundur 30. mai 2024:** Einmælt samtykt við fyrstu viðgerð og beint víðari til aðru viðgerð

| | | |
|---|---|---|
| | **Býráðsfundur**<br>30. mai 2024 | Blað nr.: 478<br><br>Formansins merki: |

# 114/24 Ungt summar

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Trivnaðarnevndin | 07.04.2022 | 33/22 | 22/01517-1 |
| 2 Mentamálanevndin | 06.04.2022 | 109/22 | 22/01517-1 |
| 3 Trivnaðarnevndin | 20.09.2022 | 54/22 | 22/01517-1 |
| 4 Mentamálanevndin | 14.09.2022 | 195/22 | 22/01517-1 |
| 5 Mentamálanevndin | 08.03.2023 | 52/23 | 22/01517-1 |
| 6 Trivnaðarnevndin | 09.03.2023 | 23/23 | 22/01517-1 |
| 7 Mentamálanevndin | 15.05.2024 | 124/24 | 22/01517-1 |
| 8 Trivnaðarnevndin | 16.05.2024 | 25/24 | 22/01517-1 |
| 9 Fíggjarnevndin | 22.05.2024 | 124/24 | 22/01517-1 |
| 10 Býráðsfundur | 30.05.2024 | 114/24 | 22/01517-1 |
| 11 Býráðsfundur | | | 22/01517-1 |

**Upprunin til málið**
Tiltøk allan juli sum liður í trivnaði og fyribyrging.

**Lýsing av málinum**
"UNGt summar" er uppskot til verkætlan, sum hevur til endamáls at skapa upplivingar, góðar felagsskapir og trivnað millum tey ungu í kommununi. Málbólkurin eru ung í aldrinum 13-15 ár, og er málið at røkka áleið 100 børnum/ungum.

Endamálið við "UNGt Summar" er at skipa fyri ymsum verkstovum (áleið 12-14), sum kunnu vara alt frá einum degi til fýra dagar frá áleið kl.13:00-kl.17:00. Verkstovurnar skulu koyra parallelt og/ella forskotið av hvørjum øðrum allar vikudagar í juli mánað.

Verkstovurnar verða ymiskar, alt frá kreativum verkstovum til verkstovur úti í náttúruni, og til hvørja verkstovu verður tað ein verkstovuleiðari, sum hevur ábyrgdina at skipa innihaldið. Flestu verkstovurnar fara at hava avmarkað pláss, hetta fyri at tryggja góðskuna.

Hugskotið til verkætlanina kom m.a. í smb. við, at tað fyri fyrstu ferð í nógv ár ikki verður nakað Ung í arbeiði. Harumframt er summarfrítíðin hjá skúlunum 8 vikur. Uttan onkrar skipaðar karmar kennist ferian long bæði hjá teimum ungu og foreldrunum.
Hetta leiddi til spurningin, hvat er fyri tey ungu í Tórshavnar kommunu í summar 2022? Summarfrítíðin er long, og tað eru ikki øll ung, sum hava eitt starv, hóast tað er tørvur á arbeiðsmegi í samfelagnum. Harumframt eru tað eisini nógv ung, ið ikki eru knýtt at frítíðarvirksemi, har tað ofta verður skipað fyri átøkum um summarið, tað verið seg í Føroyum ella uttanlands.

Tí er umráðandi, at Tórshavnar kommuna skipar fyri møguleikum, har tey ungu eitt nú kunnu dyrkað teirra áhugamál, ella fáa íblástur til onnur áhugamál og felagsskapir, sum tey annars ikki høvdu havt møguleikan fyri at roynt.

Trivnaðurin hjá teimum ungu í kommununi er altíð umráðandi at hava í huga. Hetta er eisini ein máti at arbeiða fyribyrgjandi millum okkara børn og ungu.

Hetta sæst m.a. aftur í "Heildarætlan um at fyribyrgja og tálma rúsevnismisnýtslu í Føroyum 2022-2028", sum júst er almannakunngjørd. Tað eru sera nógv sjónarmið og hugskot í ætlanini, men afturvendandi verður dentur lagdur á trivnað og sunnar felagsskapir.

Har er tað avgjørt okkara meting, at Tórshavnar kommuna eigur at verða førandi á hesum økinum. At vit eru aktiv og gera spennandi átøk, har trivnaðurin og áhugin fyri okkara ungu er í hásæti.

**Skipan av verkætlanini**
Samskifti hevur verið millum Sosialu deild, Margarinfabrikkina og Barna- og ungdómsdeildina um verkætlanina sum felags verkætlan. Uppskot er at seta royndan samskipara at skipa verkstovurnar, finna verkstovuleiðarar, hølir osv.

Ætlanini er, at sjálvt verkstovurnar lata upp fyrstu viku í juli 2022, og at tær koyra fram til ólavsøku. Samskiparin byrjar at arbeiða frá áleið 15/04-22, har endamálið er at finna útav, hvørjar verkstovur skulu verða. Tað eru nógv hugskot, men tað skal skipast eftir verkstovuleiðarum, nær viðkomandi hevur tíð, finna hølir, sum eru tøk. Evt. hjálparar, tilfar osv. Alt hetta skal vera skipað, áðrenn 1. juli 2022.

**Kostnaðarmeting**
Samskipar 4 mðr * kr. 15.000): kr. 60.000
Verkstovur (14 * kr. 5.000): kr. 70.000
Tilfar (14 * kr. 3.000): kr. 42.000
Hjálparar (14 * kr. 3.000): kr. 42.000

Tilsamans er hetta kr. 214.000kr. Tó skal viðmerkjast, at tað ikki er vist, at tað verða júst 14 verkstovur, og at onkrar verkstovur verða meira kostnaðarmiklar enn aðrar. Tí verður mett, at rætta upphæddin at seta av til átakið skal verða kr. 250.000.

Skotið verður upp at játta kr. 100.000 av kontu 2460 Stuðul og verkætlanir innan almannamál. Harumframt at játta kr. 150.000 av kontu 3216 Verkætlanin innan ungdómsøkið (minninýtsla).

Verkætlanin verður eftirmett í august 2022 sum grundarlag fyri møguligari játtan til endamálið í fíggjarætlanini fyri 2023.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |

| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
|---|---|---|---|---|
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☒** **Nei ☐**

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, sosialdeildarleiðarin og leiðarin á barna- og ungdómsdeildini mæla til at játta kr. 250.000 til endamálið soleiðis: konta 2460 Stuðul og verkætlanir innan almannamál kr. 100.000 og konta 3216 Verkætlanir á ungdómsøkinum kr. 150.000, og at verkætlanin verður eftirmett í august sum grundarlag fyri at gera hetta sum afturvendandi tiltak um summarið og játtan í fíggjarætlanini 2023.

**Mentamálanevndin 06. apríl 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

Kristianna Winther Poulsen var ikki við í viðgerðini av málinum.

**Trivnaðarnevndin 07. apríl 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Løgd verður fram eftirmeting av tilakinum.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, sosialdeildarleiðarin og leiðarin á barna- og ungdómsdeildini mæla til at umrøða eftirmetingina.

**Mentamálanevndin 14. september 2022:** Kunnað varð um málið.

**Trivnaðarnevndin 20. september 2022:** Umrøtt.

**Ískoyti:**
Víst verður til eftirmetingina frá samskiparanum av Ungt summar, sum var fyrstu ferð í fjør sum ein roynd. Eftirmetingin lýsir ymsar betringar, sum kunnu gerast, eins og hon eisini lýsir Ungt summar sum eitt sera positivt og týðandi tilboð til tey 13-15 ára gomlu.

Verkætlanin kom seint í gongd í fjør, og øll játtanin varð ikki brúkt. Avlopið er tøkt. Um Ungt Summar 2023 hevur sama fíggjarkarm eins og í fjør, t.e. kr. 250.000, skulu játtast kr. 137.664 í ár, ella rundað upp til kr. 140.000.

Skotið verður upp, at mentamálanevndin og trivnaðarnevndin játta hesa upphædd í sama lutfallið sum í 2022, t.e. 60/40.

Skotið verður sostatt upp, at trivnaðarnevndin játtar kr. 56.000 av kontu 2460 Stuðul og verkætlanir innan almannamál, og mentamálanevndin játta kr. 84.000 av kontu 3215 Aðrar útreiðslur barnaansing.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, sosialdeildarleiðarin og leiðarin á barna- og ungdómsdeildini mæla til, at Ungt summar verður aftur í 2023, og at játtaðar verða kr. 56.000 av kontu 2460 Stuðul og verkætlanir innan almannamál, og kr. 84.000 av kontu 3215 Aðrar útreiðslur barnaansing. Mælt verður harumframt til, at játtanin verður flutt til Margarinfabrikkina, sum umsitur Ungt summar (konta 3302 Mentan Eind B, 3310 Margarinfabrikkin).

**Mentamálanevndin 08. mars 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Trivnaðarnevndin 09. mars 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Ungt summar var eina royndarætlan í 2022 og eftirmetingin vísti at Ungt summar var eitt sera týðandi og positivt tilboð til tey 13-15 ára gomlu. Smb. eftirmetingin frá 2022 so vóru tað yvir 40 ung sum tóku av tilboðnum.

Tað fyriliggur eingin eftirmeting frá tiltakinum fyri 2023, men skrásett vóru 65 ung sum luttóku. Leiðarin fyri Margarinfabrikkina og sosialdeildarleiðarin meta at tørvurin er størri í ár, tí fleiri børn í aldrinum 13-15 ár vitja Margarinfabrikkina.

Verkætlanin kemur seint í gongd í ár, tí verður mett at Ungt summar klárar seg við einum fíggjarkarmi á 200.000 kr.

Skotið verður upp at trivnaðarnevndin játtar 100.000 kr. av konto 2614 Barnaverndartænastan Familjustovan og mentamálanevndin játtar 100.000 kr. av konto 3214 Broytingar og minni umvælingar.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, leiðarin á barna – og ungdómsdeildini og sosialdeildarleiðarin mæla til at Ungt summar verður aftur í 2024 og at játtaðar verða 100.000 kr. av konto 2614 Barnaverndartænastan Familjustovan og 100.000 kr. av konto 3214 Broytingar og minni umvælingar. Mælt verður harumframt til, at játtanin verður flutt til Margarinfabrikkina, sum umsitur Ungt summar ( konta 3302 Mentan Eind B, 3310 Margarinfabrikkin.

At beina málið í býráðið til tvær viðgerðir umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 15. mai 2024:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið til tvær viðgerðir um fíggjarnevndina.

**Trivnaðarnevndin 16. mai 2024:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið til tvær viðgerðir um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 22. mai 2024:** Samtykt at taka undir við trivnaðarnevndini og beina málið í býráðið sum eykajáttanarmál, ið tørvar tvær viðgerðir.

**Býráðsfundur 30. mai 2024:** Einmælt samtykt við fyrstu viðgerð og beint víðari til aðru viðgerð.

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>30. mai 2024 | Blað nr.: 482<br><br>Formansins merki: |

## 115/24 Samskipan og tulkatænasta - flóttafólk úr Ukraina

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Trivnaðarnevndin | 16.05.2023 | 29/23 | 23/02751-1 |
| 2 Trivnaðarnevndin | 19.06.2023 | 35/23 | 23/02751-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 21.06.2023 | 209/23 | 23/02751-1 |
| 4 Trivnaðarnevndin | 16.05.2024 | 24/24 | 23/02751-1 |
| 5 Mentamálanevndin | 15.05.2024 | 123/24 | 23/02751-1 |
| 6 Fíggjarnevndin | 22.05.2024 | 125/24 | 23/02751-1 |
| 7 Býráðsfundur | 30.05.2024 | 115/24 | 23/02751-1 |
| 8 Býráðsfundur | | | 23/02751-1 |

**Upprunin til málið**
Tørvur á at samskipa tulkatænastu og vegleiðing v.m. í sambandi við flóttafólk, hetta bæði til borgaran og kommunalar funtktiónir.

**Lýsing av málinum**
Kríggið í Ukraina hevur ført við sær, at nógvir Ukrainar eru flýddir av landinum. Higartil eru fleiri enn 8 mió flóttar skrásettir í øðrum evropeiskum londum. Føroyar hava á fyrsta sinnið átikið sær leiklutin at taka ímóti flóttum, og mælt varð til at taka ímóti 200 fólkum.

Higartil eru uml. 150 fólk komin til Føroya, harav búgva 96 í Tórshavnar kommunu. Gongdin er, at tey flestu vilja búgva í Havn.

Tað eru liðin uml. 14 mánaðir síðani at tey fyrstu komu. Á sumri í fjør vóru uml. 40 komin í øllum Føroyum, men ígjøgnum heystið og veturin er talið vaksið støðugt. Fyrsta barn, ið kom á dagstovn, var í oktober í fjør.

Í Tórshavnar kommunu hevur Integratiónssamskiparin tikið uppgávuna at samskifta við Útlendingastovuna, haðani kommunan fær boð um flóttar, ið koma at búgva í Tórshavnar kommunu.

Ukrainarnir hava somu rættindi sum føroyingar til almennar tænastur og skipanir. Partur av hesum stendur kommunan fyri, t.d. dagstovnaøkið, skúlar- og frítíðarskúlar, ungdómshús, Kvøldskúli v.m. Eisini eldraøkið er partur av hesum, higartil eru trý fólk yvir pensjónsaldur.

Mentamálanevndin hevur í tveimum umførum fingið kunning um viðurskifti, sum hava við dagstovnaøkið og flóttar at gera. Í løtuni eru 11 børn í dagstovnaaldri í kommununi. Málbólkurin er nýggjur fyri økið, har neyðugt er við tulkatænastu, eykatímum til innkoyring, samskifti við foreldur, børn við serligum tørvi v.m.

Munur á vanligum tilflytarum og flóttafólkum er eisini eyðsýndur, tí kríggj, støðan í heimlandinum og tað at koma inn í føroyska samfelagið við hesum sum bakgrund er ørkymlandi eisini sálarliga.

Útlendingastovan hevur ábyrgd av at veita flóttafólkum bústað, men hevur ikki ítøkiliga ábyrgd av at integrera tey í samfelagið ella at hjálpa teimum í dagligum viðurskiftum annað enn við ymsum kunningartilfari og í mun til teirra formligu viðurskiftum viðvíkjandi uppihaldsloyvum.

Útlendingastovan hevur heitt á kommununa um at skipa fyri tiltøkum og tilboðum til ukrainar eisini fyri teirra sosiala trivnað og at koma í sambandi við føroyska samfellagið.

Ta uppgávuna hevur integratiónssamskiparin higartil staðið fyri og verið eitt millumlið millum Útlendingastovuna og allar funktiónir í kommununi – serliga viðv. barnafamiljum í mun til dagstovna, skúla og frítíðarvirksemi, og næmingar til Kvøldskúlan.

Haraftrat er nógv samskifti við stovnar og funktiónir innanhýsis í kommununi, sum eisini skal finna seg til rættis í nýggju uppgávuni.

Hetta hevur havt ta avleiðingar, at ætlaða integratiónsarbeiðið viðvíkjandi tilflytarum sum heild í Tórshavnar kommunu er nógv ávirkað, tí flóttafólkauppgávan er so mikið rúgvismikil. Integratiónsarbeiðið er tí á lágum støði, har tað í dag næstan bert verður arbeitt við Fjølmentanarvikuni, tí at har er annað starvsfólk sett til ta verkætlanina.

Skal kommunan veita eina góða hjálp og tænastu bæði til tilflytarar sum heild, flóttafólkini og teir stovnar og funktiónir, sum hava flóttafólk um hendi í dagstovnum, skúlum v.m., verður mett neyðugt at seta nýggja arbeiðsorku av.

Í hesum sambandi verður fyrst og fremst hugsað um 1) tulking og 2) samskipan. Hetta kann skipast sum tvey ymisk størv/uppgáva, ella í einum.

Arbeiðsmarknaður:
Higartil eru nakrir ukrainskir flóttar settir í starv hjá Tórshavnar kommunu, og sum størsta arbeiðspláss í landinum, fara allarhelst fleiri at vera sett í starv framyvir.

- Til setanarsamrøðu krevst tulkur.
- Til innleiðslu í starvið kann vera tørvur á tulki fyri at tryggja, at setta starvsfólkið er kunnað um rættindi og skyldur sum starvsfólk.
- Flóttafólkasamskiparin kann virka sum lyklafólk millum setta starvsfólkið og arbeiðsgevara, og kann kontaktast, tá ið ivamál og spurningarstinga seg upp í fyrsta tíðarskeiðinum.

**Lýsing av uppgávuøkinum hjá samskiparanum:**
Fyri at lýsa arbeiðsuppgávurnar hjá einum flóttafólkasamskipara, er niðanfyri eitt dømi um uppgávur við støði í tørvinum á dagstovnaøkinum. Líknandi uppgávur eru ella kunnu væntast eisini á øðrum uppgávuøkjum hjá kommununi – tað verið skúlar, barnavernd, heilsu- og umsorganartænastuna, starvsfólkaøkið v.m.

**Uppgávurlýsing:**
At samskipa tørvin, ið ukrainsku flóttafamiljurnar hava í Tórshavnar kommunu, og vera toghaldari í mun til alt samskiftið við ukrainar.

- Toghaldara uppgávurnar eru:
    - Fáa flóttarnar at kenna seg vælkomin í kommununi
    - At veita hjálp eftir tørvi í mun til fríplass, innskriving í skúla, frítíðarskúla og frítíðartilboð til børn og vaksin
    - At samskifta við skúlar, dagstovnar, kvøldskúla, almannaverkið og útlendingastovuna í mun til ukrainsku flóttarnar og tær avbjóðingar og spurningar ið dagliga eru á økinum.
    - At tryggja at Ukrainarnar vita hvørji lógartryggjaði rættindi og skyldur tey hava

- Um samskiparin dugir ukrainskt ella russiskt, so kann viðkomandi loysa hesar tulkauppgávur.
    - Til fyrstu samrøðuna við foreldrum tá barn byrjar á stovni (minst 2 tímar)
    - Til uppfylgjandi samrøðu við foreldur á stovnum (minst 2 tímar)
    - Til fyrsta dagarnar í “innkoyringini” á stovnunum (meira enn 2 tímar/eftir tørvi)
    - Til setanarsamrøður tá ukrainsk starvsfólk vera sett í starv í kommununi (tímar eftir tørvi)e
    - Til foreldrafundir á stovnum

- Til at týða kunningartilfar
- Sparring í mun til mentanarligar avbjóðingar

Hetta kann sum nevnt frammanfyri skipast sum samansett starv – tulkur og samskipari fullan starvsbrøk, ella tulkur fyri seg hálva tíð og samskipari hálva ella fulla tíð.

Kostnaður:
Ein samskipari/tuilkur fulla tíð kostar ml. kr. 43.000 - 55.000 um mðr. alt eftir útbúgvingarstigi. Í dag verður tulkatænasta rindað av viðkomandi økið, t.d. dagstovnaøkinum í mun til børn/foreldur á dagstovni.

Við skipaðari tulkatænastu liggur útreiðslan sentralt.

Uppskot er, at flóttafólkauppgávan verður løgd til Integratión eisini í fíggjarætlanini konta 2512. Skotið verður eisini upp, at starv/størv til tulkatænasta og samskipara verður tíðaravmarkað í eitt ár.

Fígging er ikki til endamálið.

Støðutakan er eisini neyðug fyri at kunna leggja ætlan fyri integratiósarbeiðinum, sum í dag er ein viðfáningur av tí, ætlanin var, tí uppgávan við flóttafólkum hevur annan karakter og tekur meiri tíð.

## Hagtøl

Yvirlit

| **Íbúgvarar í TK, ið eru flýdd úr Ukraina per 11.05.2023** | **tal** |
|---|---|
| **Fólk í alt** | **96** |
| - Kvinnur | 67 |
| - Menn | 29 |
| Yvir pensjónsaldur | 3 |
| 18-66 ár | **61** |
| - Undir 25 | 11 |
| - Mammur undir 25 | 5 av 11 |
| Børn undir 18 ár | **32** |
| - 16-18 | 3 |
| - Í skúlaaldri | 18 |
| - Undir skúlaaldur | 11 |

Talvan niðanfyri vísir teir dagstovnar, frítíðarskúlar og ungdómstilboð, ið higartil hava móttikið børn, ið eru flóttar úr Ukraina.

| | Tal av børnum | Stovnur | Tal av stovnum/skúlum |
|---|---|---|---|
| Børn í fólkaskúla skúla og móttøkuflokki | 18 børn | Eysturskúlin<br>Móttøkuflokkur í Eysturskúlanum<br>Hoyvíkar skúli<br>Móttøkuflokkur í Kvøldskúlanum | 3 |
| Børn í Frítíðarskúla | 1 barn | Smílibýlið | 1 |

| | | | |
|---|---|---|---|
| Dagstovnar | 8 børn á stovni<br>2 børn bíða eftir stovnsplássi<br>1 barn undir stovnsaldur | Miðstovnurin, Lonirnar í Hoydølum, Undir brúnni, Sólareyga, Birkilund, Lítliskógur, Dr. Ingridar Barnagarður, H. A. Djurhuus | 8 |
| Frítíðartilboð | 2-10 | Margarinfabrikkin Argjaskotið. | 2 |
| | | | 14 í alt |

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og integratiónssamskiparin mæla til at viðgera uppskotið at skipa tulk og samskipan í sambandi við flóttafólk úr Ukraina sum tíðaravmarkað størv sambært lýsingini omanfyri, og um so verður, at játta fígging til endamálið á einum seinni fundi.

**Trivnaðarnevndin 16. mai 2023:** Samtykt at taka undir við uppskotinum um tulk og samskipan, og at umsitingin ger neyvari uppskot til verkætlan og fígging at leggja fyri aftur í trivnaðarnevndini.

**Ískoyti:**
Víst til verður til lýsingina omanfyri.

Í hesi verkætlanlýsing verður lagt upp til, at ein samskipari verður settur at hava ábyrgdina av at geva ukrainsku flóttunum í Tórshavnar kommunu hjálp og vegleiðing. Harafturat kann økta arbeiðsorkan vera við til at tryggja grundarlagið fyri einari (eftir umstøðunum) góðari byrjan á tilveruna í Tórshavnar kommunu.

Samskiparin verður bindilið ímillum flóttarnir og teir myndugleikar og stovnar, sum vara av teimum økjunum, ið flóttarnir hava tørv á at samskifta við.

Lagt verður harumframt upp til eina skipaða tulkatænastu til stovnar, tænastur, arbeiðspláss og skúlar í kommununi. Her verður hugsað um samrøður við foreldur/avvarðandi, børn/ung, foreldrafundir, “innkoyring” á stovnum, starvssamrøður og “onboarding” á kommunalum arbeiðsplássum. Eisini er tørvur á tulking av teksti, so sum kunningarskriv, oyðubløð, heimasíður og annað.

Hetta kann gerast antin sum eitt sett starv hálva tíð ella sum keyp tænastu í avtalu.

**Endamál**
Endamálið við at seta eyka arbeiðsorku av er at tryggja eina góða integratión av øllum tilflytarum í Tórshavnar kommunu, í hesum føri fyrst og fremst viðvíkjandi flóttafólkum, sum kann gerast fyrimynd fyri samlaða integratiónsarbeiðinum. Við at seta fólk av til at vara av kommunala flóttafólkaøkinum, verður orka leysgivin til at taka sær av yvirskipaða tilflytaraøkinum í kommununi.

Við at seta eitt fólk av sum samskipara hjá ukrainskum flóttafólki í Tórshavnar kommunu, er endamál at fyribyrgja møguligar misskiljingar og trupulleikar, ið kunnu standast av, at fólk ikki fáa ta hjálp og vegleiðing, ið tey hava tørv á, fyri at finna seg til rættis í samfelagnum, og ikki minst at skapa umstøður fyri betri trivnaði.

Samskiparin kann arbeiða fyri, at ukrainsku flóttarnir fella til, trívast og fáa ta hjálp og vegleiðing, ið tey hava tørv á í einum nýggjum samfelagi.

Viðvíkjandi tulkatænastu, so er hon ætlað at hjálpa og betra um samskiftis og forstáilsi millum flóttafólkini og teir stovnar, arbeiðspláss og samrøður annars í kommunalum høpi, umframt at vera við til at framleiða og týða relevant skrivligt tilfar til ukrainskt.

Hetta er av stórum týdningi, tí førleikin hjá flóttunum at samskifta á enskum máli hjá fleiri er ikki so góður.

**Tíðarskeið**.
Samskipari fyri flóttafólk í Tórshavnar kommunu: Lýsast skal eftir samskipara í eitt tíðaravmarkað starv (12 mánaðir). Hetta vegna óvissuna um, hvussu nógvir flóttar koma afturat, og hvussu leingi kríggið væntast halda á. Ætlanin er, at starvið verður sett ikki seinni enn 1. oktober 2023.

Tulking: Tað er ivasamt, um tað verður gjørligt at finna ein egnaðan tulk, ið hevur møguleika fyri at starvast 0,5 tíð í kommununi. Mælt verður til fáa gjørt avtalu um slíka tænastu.

**Kostnaðarmeting**
Ein samskipari við kandidatútbúgving sum starvast fulla tíð, fær eina løn á kr. 54.450, tá øll avgjøld eru tald við. Hevur viðkomandi bachelorútbúgving, so er kostnaðurin við øllum avgjøldum kr 42.350

Ein tulkur, ið starvast hálva tíð, kostar ávikavist kr 27.225 fyri ein kandidat, og kr 21.175 fyri ein bachelor. Tað kann tó vera, at tulkurin hevur aðra útbúgvingarliga bakgrund og skal setast eftir øðrum sáttmála. Alternativ er at samráðast um eina tulkaavtalu, harundir kostnað, sí omanfyri.

**Planlegging**
Lýsing eftir samskipara og tulki eigur at fara út skjótast gjørligt og áðrenn 1. juli. At lýsa í feriutíð kann hava við sær færri umsøkjarar, so mælt verður til, at umsóknarfreistin er tí eigur lýsingin at vera úti til í minsta lagi mánadagin 14. august, so at starvssetti kann byrjað í seinasta 1. oktober.

Samskiparin hevur tørv á einum skrivstovuplássi og á arbeiðsamboðum, so sum telefon og teldu. Sama er galdandi fyri tulkin, um leisturin verður, at eitt fólk verður sett hálva tíð.

Játtanartørvur til løn fyri samskipara, sum er settur fulla tíð frá oktober 2023, er uml. kr. 150.000, er viðkomandi á hægsta lønarstigi. Harumframt verður mælt til at seta játtan av til keyp av tulking kr. 50.000. Tað vil siga uml. kr. 200.000 fyri tíðarskeiðið oktober-desember 2023.

Fyri 2024, um talan eru 9 mánaðir, er játtanartørvurin uml. 0,5 mió í lønum, og kr. 100.000 til tulking, tvs. kr. 600.000.

Mett verður, at konta 2460 Stuðul til almannamál kann fíggja tær kr. 200.000 fyri 2023, lutvíst av tøkum peningi og lutvíst tí, at fyribyrgingarverkætlanin á sosialu deild væntast ikki at brúka alla játtanina í ár.

**Nær er verkætlanin eydnað**
Dømi um væleydnaða verðætlan er, tí ið vit kunnu siga ja til flest gjørligt av hesum punktum:

- Tá ið tað ber til at veita vegleiðing og tulking til kommunal arbeiðspláss, soleiðis at setan av ukrainskum flóttu ikki verður darvað av málsligum ella mentanarligum forðingum.
- Tá ei eingin ukrainskur flótti "dettur ímillum" og ikki fær hjálp og vegleiðing, tá tørvur er á tí.
- Tá ið allir flóttar í Tk kenna tey tilboðini, ið kommunan hevur at veita.
- Tá ið samskiparin hevur eitt gott yvirlit yvir tørvin og status hjá ukrainsku flóttunum í Tk og kann arbeiða málrættað við at veita serliga vegleiðing til tær flóttafamiljur, ið hava tørv á tí.
- Tá ið allir flóttar vita, hvørji rættindi tey hava og vita, hvar tey kunnu venda sær við ivamálum.
- Tá ið skúlar og dagstovnar meta, at foreldur at ukrainsku børnunum fáa ta kunning teimum tørvar í samband við, at barnið byrjar í stovni og skúla.
- Tá ið kvøldskúlin hevur ein persón at venda sær til í mun til ráðgeving, hjálp og vegleiðing til ukrainar.
- Tá ið vit veita tulkatænastu svarandi til tørvin á økinum.
- Tá yvirskipaða integratiónsarbeiðið í Tk ikki er skert, vegna økt fokus á flóttar.

Verkætlanin skal ávegis eftirmetast hvønn ársfjórðing í verkætlanartíðarskeiðinum, og sum løgd verður trivnaðarnevndina.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og integratiónssamskiparin mæla til at skipa verkætlan frá 1. oktober 2023 til 30. september 2024, har settur verður samskipari til flóttafólk sambært verkætlanarlýsingini omanfyri, og at játtan verður sett av til tulkatænastu.

Mælt verður til at játta kr. 200.000 av kontu 2460 Stuðul til almannamál fyri virksemið í 2023, og at játtan til framhald í 2024 (9 mánaðir) verður fíggjað í fíggjarætlanini 2024.

At enda verður mælt til, at verkætlanin verður ávegis eftirmett hvønn ársfjórðing at leggja fyri trivnaðarnevndina.

**Trivnaðarnevndin 19. juni 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 21. juni 2023:** Samtykt at taka undir við trivnaðarnevndini.

Annika Olsen luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Ískoyti:**
Tørvur er á at leingja starvsetanina hjá flóttafólkasamskipara og tulki á integratións-eindini.

**Uppgávuøki hjá flóttafólkasamskipara og tulki**
Tykkum kunnugt, so býr størsti parturin av Ukrainsku flóttafólkunum í Føroyum í Tórshavnar kommunu. Tað hevur havt við sær tørv á øktari arbeiðsorku á flóttafólkaøkinum, og í oktober 2023 byrjaðu Angelina Johannesen og Sylvia Magnussen í starvi sum ávikavist tulkur og flóttafólkasamskipari. Í alt 1,5 ársverk. Tað hevur verið ein góð avgerð. Tær hava havt nógv at gera og eru nógv eftirspurdar bæði at stovnum, skúlum og deildum í kommununi, umframt av borgarum sum eru flóttar úr Ukreina, ið hava tørv á vegleiðing, kunning og hjálp av ymiskum slag. Harafturat hevur verkætlanin leysgivið orku til at flóttafólkasamskiparin kann brúka orku til at arbeiða yvirorðnað við integratiónsøkunum í Tórshavnar kommunu, til framan fyri tilflytarar úr øllum londum

**Tulking**
Tað er stórur eftirspurningur eftir tulki, tulkurin hjálpir flóttafólkum, ið venda sær til Tórshavnar kommunu og tulkar tá ið stovnar, skúlar og deildir í kommununi hava tørv á tulki. Hettar er eitt nú
- til foreldrasamrøður í skúla og dagstovni og Frítíðarskúla
- Til samrøður á sosialu deild
- Til samrøður á Mentamáladeildini við familjur at børnum, ið skulu í skúla
- Í kvøldskúlanum
- Til tiltøk fyri fólk úr Ukreina

Harafturat er uppgávan at tulka ymiskt skrivligt tilfar til ukrainskt, so sum teldupostar, boð og tekst á heimasíðum. Nógvir stovnar og onnur í kommununi venda sær til tulkin bæði í mun til munnliga og skrivliga tulking. Harafturat so er tað samstarv millum tulk og flóttafólkasamskipara, um at skipa fyri tiltøkum fyri ukrainskar flóttar í Tórshavnar kommunu. Tá er uppgávan hjá tulkinum m.a. at senda innbjóðingar út, eggja til luttøku og miðlar kunningina.

**Flóttafólkasamskipari**
Flóttafólkasamskiparin veitir vegleiðing til allar ukrainar í kommununi, ið venda sær til Tórshavnar kommunu. Samskiparin er bindilið ímillum flóttar og teir myndugleikar og stovnar, sum vara av teimum økjunum, ið flóttar hava tørv á at samskifta við.

Fløttarnir hava eitt nú spurningar um:
- Barnaansing. Uppskriving til dagstovn og bíðilista
- Skúlagongd og skúlaskipan
- Hjálp til at finna starv ella skriva umsókn og CV
- Hjálp til at finna lækna, sálarfrøðing, tannlækna ella aðra heilsuveiting
- Spurningar um arbeiðsviðurskifti, løgnaviðurskifti, skatt og líknandi
- Spurningar um møguleikar fyri fyri víðari lesnaði ella føroyskt undirvísing
- Spurningar um frítíðarviðurskifti
- Spurningar um bústað

Samskiparin hevur javnan samband við ein part av flóttunum, nøkur hava tørv á jøvnum sambandi, onnur hava lítlan og ongan tørv á hjálp og vegleiðing. Tað eru serliga tey ungu, sum eru komin uttan verja, har samstarvar samskiparin við sosialu deild.

Harafturat fer nógv tíð til samskifti og fundir við aðrir partar innanhýsis og uttanhýsis. Samskiparin skipar fyri umleið einum tiltaki um mánaðan fyri ukrainum í kommununi.

Í stuttum kann sigast, at tað er stórur tørvur á arbeiðsorkuni frá tulki og samskipara.

Harafturat verður skjótt ein avgerð tikin um, hvørt Føroyar fara at taka ímóti 50 flóttum afturat. Sum støðan er í løtuni, so er einki, ið bendi á, at tørvurin hjá flóttafólkunum eftir at fáa hjálp og vegleiðing verður minni, tá verandi verkætlanin endar 30.09.24.

Smb. verandi lóggávu, so hava flóttarnir fyribils uppihaldsloyvi fram til 1. mars 2025. Avgerð er ikki tikin enn, um lógin verður broytt.

Á sumri í 2023, vóru sett upp dømi um nær verkætlanin við samskipara og tulki kundi metast at vera væleydnað:

1. Tá ið tað ber til at veita vegleiðing og tulking til kommunal arbeiðspláss, soleiðis at setan av ukrainskum flóttum ikki verður darvað av málsligum ella mentanarligum forðingum.
    - Vegleiðing og tulking eru tøk, tó hevur kommunan ikki havt nógvan tørv á hesum, tí fáir Ukrainar eru settir í starv í Tórshavnar kommunu

2. Tá ið eingin ukrainskur flótti "dettur ímillum" og ikki fær hjálp og vegleiðing, tá tørvur er á tí.
    - Málið er eydnast

3. Tá ið allir flóttar í Tk kenna tey tilboðini, ið kommunan hevur at veita.
    - Hettar arbeiða vit áhaldandi við. Tó er vitan ring at finna á heimasíðuni hjá kommununi á enskum.

4. Tá ið samskiparin hevur eitt gott yvirlit yvir tørvin og status hjá ukrainsku flóttunum í TK og kann arbeiða málrættað við at veita serliga vegleiðing til tær flóttafamiljur, ið hava tørv á tí.
    - Málið er eydnast

5. Tá ið allir flóttar vita, hvørji rættindi tey hava og vita, hvar tey kunnu venda sær við ivamálum.
    - Hettar arbeiða vit áhaldandi við. Tó er vitan ring at finna á heimasíðuni hjá kommununi á enskum.

6. Tá ið skúlar og dagstovnar meta, at foreldur at ukrainsku børnunum fáa ta kunning teimum tørvar í samband við, at barnið byrjar í stovni og skúla.
    - Málið er eydnast

7. Tá ið kvøldskúlin hevur ein persón at venda sær til í mun til ráðgeving, hjálp og vegleiðing til ukrainar.
    - Hettar hava vit bøtt um. Tørvurin hjá Kvøldskúlanum fer tó at veða minni, tá málskúlin flytir út á Glasir

8. Tá ið vit veita tulkatænastu svarandi til tørvin á økinum.
    - Málið er eydnast.

9. Tá yvirskipaða integratiónsarbeiðið í Tk ikki er skert, vegna økt fokus á flóttar.
    - Málið er eydnast

## Hagtøl

| | Tal | M | K |
|---|---|---|---|
| **Flóttar í alt í TK** | **113** | **30** | **83** |
| **Børn** | **31** | **17** | **14** |
| -undir skúlaaldur | 11 | 7 | 4 |
| -í skúlaaldri | 20 | 10 | 10 |
| | | | |
| **Vaksin** | **82** | **13** | **69** |
| 18-25 | 21 | 4 | 17 |
| 25-67 | 60 | 8 | 52 |
| 67+ | 1 | 1 | 0 |

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
☐ Ja
☐ Nei

**Endamál**
Við at seta eitt fólk av sum samskipara hjá ukrainskum flóttafólki í Tórshavnar kommunu, er endamál at fyribyrgja møguligar misskiljingar og trupulleikar, ið kunnu standast av, at fólk ikki fáa ta hjálp og vegleiðing, ið tey hava tørv á, fyri at finna seg til rættis í samfelagnum, og ikki minst at skapa umstøður fyri betri trivnaði.

Samskiparin kann arbeiða fyri, at ukrainsku flóttarnir fella til, trívast og fáa ta hjálp og vegleiðing, ið tey hava tørv á í einum nýggjum samfelagi. Endamálið er mett at vera rokkið á ein nøktandi hátt

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og integratiónssamskiparin mæla til at leingja verkætlanina, so setanin hjá tulki og Samskipara heldur fram til 31.12.24. Ynskir Tórshavnar kommuna at verkætlanin heldur fram eftir 01.01.25 so verður mælt til, at fyriskipanin fær játtan á fíggjarlógini fyri 2025.

Mælt verður til at hækka játtanina við 200.000 kr. til endamálið, sum er at leingja verandi verkætlan, við at játta:
50.000 kr. av av konto 2460 Stuðul til almannamál
50.000 kr. av konto 2614 Barnaverndartænastan Familjustovan.
100.000 kr. av konto 4140 Ætlanir á skúlaøkinum (framskrivingin frá 2023)

At beina málið víðari í býráðið til tvær viðgerðir umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 15. mai 2024:** Kunnað varð um málið.

**Trivnaðarnevndin 16. mai 2024:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið til tvær viðgerðir um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 22. mai 2024:** Samtykt at taka undir við trivnaðarnevndini at leingja verkætlanina árið út og beina málið í býráðið sum eykajáttanarmál, ið tørvar tvær viðgerðir.

**Býráðsfundur 30. mai 2024:** Einmælt samtykt við fyrstu viðgerð og beint víðari til aðru viðgerð.

# 116/24 Framtíðartryggja eldraøkið - reingerðartænastan

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Heilsu- og eldranevndin | 19.06.2023 | 18/23 | 23/03546-1 |
| 2 Býráðsfundur | 21.06.2023 | 148/23 | 23/03546-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 05.07.2023 | 210/23 | 23/03546-1 |
| 4 Býráðsfundur | 05.07.2023 | 187/23 | 23/03546-1 |
| 5 Heilsu- og eldranevndin | 31.10.2023 | 26/23 | 23/03546-1 |
| 6 Fíggjarnevndin | 15.11.2023 | 302/23 | 23/03546-1 |
| 7 Býráðsfundur | 23.11.2023 | 280/23 | 23/03546-1 |
| 8 Býráðsfundur | 24.04.2024 | 108/24 | 23/03546-1 |
| 9 Heilsu- og eldranevndin | 14.05.2024 | 12/24 | 23/03546-1 |
| 10 Fíggjarnevndin | 22.05.2024 | 126/24 | 23/03546-1 |
| 11 Býráðsfundur | 30.05.2024 | 116/24 | 23/03546-1 |

**Upprunin til málið**

**Lýsing av málinum**
Tórshavnar kommuna stendur, eins og Føroyar sum heild, yvir fyri stórum fólkafrøðiligum avbjóðingum, sum setur verandi vælferðartænastur, sum kommunan hevur ábyrgd av, undir trýst.

Á eldraøkinum eru avbjóðingarnar stórar, samansettar og vaksandi.

Talið av eldri fólki økist, fólk liva longur, viðgerðarhættir í heilsuverkinum gerast alsamt betri. Tørvurin á tænastum og búplássum frá kommununi verður tískil alsamt størri. Í tráð við, at tað gerast fleiri eldri fólk, og at livialdurin hækkar, verða eisini elsamt fleiri borgarar við ellisbrekum og varandi sjúkum, og nógvir teirra fáa tørv á persónligari og praktiskari hjálp í gerandisdegnum. Tað er týdningarmikið, at hesir borgarar fáa góða umsorgan og røkt, sum tekur stæði í tørvinum hjá tí einstaka.

Harumframt eru borgarar vorðnir meira tilvitaðir, og seta alsamt størri krøv til, at kommunan skal veita tænastur, hvørjar tænastur kommunan skal veita, hvussu tænasturnar verða veittar og til góðskuna á tænastunum.
Samstundis bendir alt á, at tað gerast færri skattgjaldarar at rinda fyri tænasturnar komandi árini.

Búskaparráðið hevur víst á, at tað er neyðugt, at neyv mál verða sett fyri, hvørjar framtíðar vælferðartænastur skulu veitast til hvørjar borgarar, um fólkafrøðiliga avbjóðingin og vantandi starvsfólkaorkan skal loysast.

Tórshavnar býráð hevur sett sær fyri at loysa avbjóðingarnar, sum síggjast á eldraøkinum og at fara undir átøk, sum skulu viðvirka til at framtíðartryggja grundleggjandi tænastur fyri borgaran í Tórshavnar kommunu.

Á fundi í Heilsu- og eldranevndini tann 5. juli 2021 varð samtykt, at seta ein arbeiðsbólk at lýsa og greina verandi avbjóðingar á eldraøkinum, og gera tilmæli til, hvussu eldraøkið í Tórshavnar kommunu verður framtíðartryggjað. Ynski var um, at bæði borgarin, fakfólk og politiski myndugleikin skuldi takast við í arbeiðið.

Sum liður í hesum arbeiði eru settir tríggir arbeiðsbólkar, sum hava viðgjørt ávíkavist tænastur til heimabúgvandi fólkapensjónistar, tænastur á eldrabústovnunum og starvsfólk, útbúgving og rekruttering. Í arbeiðsbólkunum hava limir úr øllum fakbólkum verið umboðaðir. Endamálið við arbeiðsbólkunum hevur verið, at fakfólk á eldraøkinum fáa møguleika at greiða frá teirra sjónarmiðum, at luttaka í kjaki og at koma við ískoyti til møguligar loysnir.

Í arbeiðsbólkunum verður nú arbeitt við at orðað tilmæli til, hvussu eldraøkið í Tórshavnar kommunu verður framtíðartryggjað. Í hesum sambandi hevur arbeiðsbólkurin, sum hevur viðgjørt tænastur til heimabúgvandi pensjónistar, orðað tilmæli um reingerðartænastuna.

**Lýsing av reingerðartænastuni**

Reingerðartænastan er ein tænasta fyri heimabúgvandi fólkapensjónistar, ið ikki megna at gera reint sjálvi, og sum ikki búgva saman við frískum hjúnafelaga/maka ella vaksnum yvir 18 ár, ið megna at gera reint. Játtan til reingerðartænastu er treytað av, at visitator metir, at heilsufakligt grundarlag er fyri reingerðartænastu.

Borgari, sum hevur ansara, fær ikki játtað reingerðartænastu. Í serligum førum verður reingerðartænasta játtað í avmarkað tíðarskeið. Tænastan er tilskilað einkult persóni, men í ávísum førum, t.d í samband við deysðfall, verður støða tikin til, um eftirsitandi makin hevur tørv á at varðveita tænastuna.

Visitatión til reingerðartænastu fevnir í dag ikki um eina ADL metan av borgaranum. Ein ADL metan er ein metan av, hvussu væl borgari megnar gerandis uppgávur í heiminum, til arbeiðis og í frítíðini. Hetta kunnu vera uppgávur so sum persónligt reinføri, at lata seg í/úr, at eta, fara á wc, innkeyp, matgerð og reingerð. Tað er ergoterapeutur, sum ger ADL metanina.

Reingerð verður veitt 3. hvørja viku í 2 manntímar, sum svara til antin 1 tíma ið tveimum reingerðarfólkum ella 2 tímar við einum reingerðarfólki. Tað, sum vanliga verður gjørt reint, er støvsúgving, vask av gólvum og vask av vesi og baðirúmið. Reingerðin fevnir um viðlíkahaldsreingerð. Høvuðsreingerð er ikki ein partur av tilboðnum.

Núverandi játtan til reingerðartænastu er kr. 800.000 árliga, og kostnaðurin fyri tænastuna er í dag kr. 1.663.569 v/ netto MVG. Brúkaragjaldið er á kr. 170 fyri hvørja reingerðarveiting, svarandi til í alt kr. 451.520 árliga.

Upprunaliga varð avgjørt, at 1/3 av kostnaðinum skuldi fíggjast við brúkaragjaldi. Í dag er brúkaragjaldið 27% av kostnaðinum.

Reingerðartænastan var áður ein partur av tí tænastu, sum heimatænastan veitti heimabúgvandi borgarum. Reingerð varð tikin úr hesi tænastu fyri áleið 15 árum síðani, og hevur ikki verið partur av heimatænastuni síðani.

Tórshavnar kommuna valdi at seta reingerðartænastuna inn aftur í 2019, men skipað á tann hátt, at privat reingerðarfyritøka veitti reingerðarhjálpina.

Fyrsta tíðin var royndartíð, sum varð skipað soleiðis, at tað vóru teir borgarar, sum ikki megnaðu sjálvir at gera reint og sum ikki búðu saman við persóni sum kundi gera reint, sum kundu fáa reingerðartænastu. Eftir 1 ár varð skipanin sett í verk, og tá var brúkaragjald ásett. Við støði í royndarverkætlanini var mett, at pláss skuldi vera fyri 110 borgarum í skipanini.

Í 2021, tá sáttmálin við reingerðarfyritøkuna skuldi leingjast, varð víst á, at fleiri borgarar enn væntað, vóru í skipanini, og kostnaðurin av tí sama hækkaði. Tá varð avgjørt, at kommunan bar hækkingina, og brúkaragjaldið sostatt skuldi vera óbroytt.

Tað eru í løtuni 166 borgarar, sum fáa reingerðartænastu, og 42 borgarar hava fingið játtа reingerðartænastu men eru á bíðilista til reingerð.

Um reingerðartænasta skal veitast teimum 208 borgarum, sum í dag hava fingið játtað reingerðartænastu, og støði verður tikið í núverandi kostnaði, fer tænastan at kosta kr. 2.084.472 v/ netto MVG.

Sáttmálin við verandi reingerðarfyritøku er gingin út, og reingerðartænastan hevur tí júst verið í útboð. Um tikið verður av einum av innkomnu tilboðunum, fer kostnaðurin av reingerðartænastuni at hækka frameftir. Harumframt fer talið av eldri borgarum at hækka komandi árini, og tað verða tí helst fleiri og fleiri borgarar, sum fara at søkja um reingerðartænastu.

Sí viðfest um nøgdsemi við reingerðartænastuna

**Niðurstøða hjá arbeiðsbólkinum**
Arbeiðsbólkurin mælir til, at reingerðartænastan skal síggjast tí breiða høpinum, og í mun til tær avbjóðingar, sum eru fyri framman. Talið á eldri borgarum í Tórshavnar kommunu fer at vaksa skjótari komandi árini, og skal kommunan megna at veita neyðturviligar røktartænastur, verður neyðugt at raðfesta og møguliga eisini at skerja tænasturnar.

Um Tórshavnar kommuna skal raðfesta við støði í teimum tænastum, sum kommunan veitir eldri borgarum í dag, so er reingerðartænastan ein tænasta, sum kann verða avtikin. Hetta við atliti til, at hetta er ein tænasta, sum privatar fyritøkur kunnu veita borgarum, og sum borgarin tí kann keypa seg til sjálvur. Í hesum sambandi vísur nøgdsemiskanningin eisini, at reingerðarhjálp frá privatari fyritøku er á einum støði, sum er nøktandi fyri borgaran og avvarðandi.

Verður avgerð tikin um, at reingerðartænasta framhaldandi skal veitast, mælir arbeiðsbólkurin til, at skipanin verður endurskoðað og at kanna verður, um tænastan kann skipast á annan hátt.

Arbeiðsbólkurin mælir til, at reingerðartænastan verður avmarkað soleiðis, at tað verða settar neyvari treytir fyri at fáa tænastuna. Tað skulu einans vera teir borgarar í skipanini, sum fáa umfatandi hjálp frá Heimatænastuni, sum kunnu fáa játtað reingerðartænastu.

Arbeiðsbólkurin mælir eisini til, at tað verður gjørd ein ADL metan, tá visiterast skal til reingerðartænastu, fyri soleiðis at tryggja, at borgarar við størsta tørvi, fáa reingerðartænastu.

Eitt uppskot er harumframt, at reingerðartænastan verður ein partur av visitatión til heimatænastu, soleiðis at skilja, at tá borgari søkir um heimatænastu, metur visitator eisini, um borgarin hevur tørv á reingerðartænastu. Um tørvur er á reingerðartænastu, kunnar visitator borgaran um, at viðkomandi kann søkja um tænastuna.

Arbeiðsbólkurin hevur somuleiðis umrøtt spurningin, um reingerðarhjálp frameftir kann veitast av starvsfólki í Heimatænastuni. Vísandi til, at hjálp í heiminum fyri tað mesta verður veitt fyrrapartar, og at tað møguliga er rúm fyri, at starvsfólk kunnu brúka tíð seinnapart til reingerð.

Arbeiðsbólkurin mælir eisini til, at í minsta lagi 1/3 av kostnaðinum av tænastuni skal fíggjast við brúkaragjaldi, og at brúkaragjaldið verður hækkað um neyðugt.

Úrslitini frá nøgdsemiskanningini tala eisini fyri hesum, tá tey vísa á, at borgarar og avvarðandi yvirskipað eru nøgd við kostnaðarstøðið á tænastuni. Eitt hægri brúkaragjald hevði tí allarhelst ikki havt stórvegis ávirkan á, um borgarin valdi tænastuna til ella frá.

Arbeiðsbólkurin mælir Heilsu- og eldranevndini til at:

- Reingerðartænastan verður avtikin.

Verður reingerðartænastan ikki avtikin mælir arbeiðsbólkurin til, at:

- Neyvari treytir verða settar fyri at fáa játtað reingerðartænastu.
- Einans borgarar í skipanini, sum fáa umfatandi hjálp frá Heimatænastuni, kunnu fáa játtað reingerðartænastu.
- ADL metan verður gjørd, tá visiterast skal til reingerðartænastu, fyri soleiðis at tryggja, at borgarar við størsta tørvi fáa reingerðartænastu.
- Reingerðartænastan verður ein partur av visitatión til heimatænastu, soleiðis at skilja, at tá borgari søkir um heimatænastu, metur visitator eisini, um borgarin hevur tørv á reingerðartænastu.
- Kanna møguleikan fyri, at reingerðarhjálp frameftir kann veitast av starvsfólki í Heimatænastuni.
- Brúkaragjaldið á reingerðartænastuni verður hækkað, um tað er neyðugt fyri at røkka 1/3 av samlaða kostnaðinum av tænastuni.

**Viðmerkingar frá fyrisitingini:**
Sambært lóg um heimatænastu og eldrarøkt er tað ikki skylda hjá kommununi at veita fólkapensionistum reingerðartænastu. Tó kann kommunan seta tilboðið í verk um hon ynskir tað.

Umsitingin metir at tørvur er á at endurskoða reingerðartænastuna. At taka støðu til um reingerðartænastan skal halda fram og í øðrum lagi at gera skipanina soleiðis at tað er borgarin við veruligum tørvi sum kann fáa tænastuna. Hetta kann vera gjørt eftir leisti sum arbeiðsbólkurin mælir til. Umsitingin metir somuleiðis at reingerðartænastan altíð eigur at vera játta tíðaravmarka og tí skal revisiterast reguliga.

Reingerðartænastan er sera tíðarkrevjandi at umsita bæði fyrisitingarligt og hjá visitatiónini. Umsitingin metur at tíðin er koman at tillaga skipanina. Hetta kann gerast í trá við uppskoti frá arbeiðsbólkinum. Um skipanin skal halda fram sum nú, verður neyðugt at økja játtanina við áleið 1.5 mio. kr. í fíggjarætlanini fyri 2024

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |

| | | |
|---|---|---|
| | **Býráðsfundur**<br>30. mai 2024 | Blað nr.: 495<br>Formansins merki: |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:**
Kommunustjórin, Heilsu- og umsorganarstjórin og miðfyrisitingarstjórin mæla heilsu- og eldranevndini til at taka undir við tilmælinum frá arbeiðsbólkinum í fyrstu syftu at reingerðartænastan skal niðurleggjast. Um nevndin ikki tekur undir við fyrsta tilmælinum so í øðrum lagi at taka undir við antin samlaða alternativa uppskotinum ella pørtum av hesum. At leggja málið fyri býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Heilsu- og eldranevndin 19. juni 2023:** Nevndin tekur ikki undir við at avtaka reingerðarskipanina.

Nevndin tekur undir við at endurskoða, tillaga og broyta reingerðartænastuna í samsvari við alternativa uppskotið hjá arbeiðsbólkinum umframt at reingerðartænastan verður játtað tíðaravmarkað og verður revisiterað regluliga.

Nevndin tekur ikki undir við at hækka brúkaragjaldið. Nevndin ynskir málið aftur í nevnd, tá ið omanfyri nevndu broytingar eru settar í verk og endaligur fíggjartørvur fyriliggur.

At beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Býráðsfundur 21. juni 2023:** Tikið av skrá.

**Fíggjarnevndin 05. juli 2023:** Samtykt at taka undir við heilsu- og eldranevndini, og at málið verður lagt fyri eldranevndina, tá ið endaligur fíggjartørvur fyriliggur í mun til endurskoðaðu skipanina, sum alternativa uppskotið hjá arbeiðsbólkinum mælir til.

**Býráðsfundur 05. juli 2023:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Sum liður í arbeiðinum at framtíðartryggja eldraøkið, varð samtykt á fundi í heilsu- og eldranevndini tann 19. juni 2023, at taka undir við tilmæli um at endurskoða, tillaga og broyta reingerðartænastuna í samsvari við uppskoti frá arbeiðsbólkinum. Harumframt varð samtykt, at reingerðartænastan skal játtast í avmarkað tíðarskeið og revisiterast árliga.

Heilsu- og eldranevndin ynskti málið aftur í nevnd, tá ið broytingar í reingerðartænastuni vóru settar í verk og endaligur fíggjartørvur staðfestur.

Arbeiðsbólkur við umboðum frá eindarleiðsluni, heimatænastuni, visitatiónini, terapeuttoyminum og fyrisitingini hevur endurskoðað og tillagað reingerðartænastuna við støði í tilmælunum, og gjørt fylgjandi broytingar í reingerðartænastuni.

Borgarin skal fáa umfatandi heimahjálp fyri at fáa reingerðartænastu, og talan skal vera um varandi tørv – reingerðartænasta verður tí ikki játtað í styttri tíðarskeið. Umfatandi heimahjálp verður veitt borgara, sum við hjálp og stuðli kann luttaka aktivt fyri at nøkta egnan tørv, og borgara sum við fullari hjálp kann viðvirka til at nøkta egnan tørv.

Reingerðartænasta verður frameftir partur av visitatión til heimatænastu á tann hátt, at tá borgari søkir um heimatænastu, metir visitator eisini, um heilsufakligt grundarlag er fyri reingerðarhjálp. Um borgari lúkar treytirnar fyri reingerðartænastu, kunnar visitator borgara um, at viðkomandi kann søkja um tænastuna.

Reingerðartænasta verður játtað í eitt ár í senn, og revisitatión er árliga.

Reingerðartænasta verður ikki veitt í viku 30 og 51.

Ein tænastuveiting fevnir um reingerð av brúksrúmum og í mesta lagi fimm rúmum – gongd, køkur, ein stova, eitt kamar og eitt baðirúm/vesi.

Mett verður, at reingerðartænastan kann veitast av bæði heimatænastuni og uttanhýsis veitara. Um borgari fær reingerðartænastu frá heimatænastuni, útvegar borgari reingerðarútgerð.

Við støði í nýggju treytunum fyri reingerðartænastu væntast áleið 100 borgarar í skipanini. Mett verður, at heimatænastan kann veita reingerðarhjálp til 60 borgarar. 40 borgarar skulu tí hava reingerðartænastu frá uttanhýsis veitara. Við støði í hesum er metti bruttokostnaðurin fyri tænastuna kr. 750.000 árliga. Við einum brúkaragjaldið á kr. 170 svarandi til kr. 250.000 árliga, er nettokostnaðurin kr. 500.000 árliga.

Reingerðartænastan skal hava eitt loft svarandi til játtanina. Tá loftið er rokkið, verða fleiri borgarar ikki tiknir inn í skipanina.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og fulltrúi í H&U umsitingini mæla Heilsu- og eldranevndini til at taka undir við endurskoðaðu skipanini av reingerðartænastuni.

**Heilsu- og eldranevndin 31. oktober 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 15. november 2023:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein og Tróndur Sigurðsson, tekur undir við heilsu- og eldranevndini og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Annika Olsen og Jákup Dam, atkvøður blankt.

**Býráðsfundur 23. november 2023:** Atkvøtt varð um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við níggju atkvøðum fyri, fýra blankum atkvøðum og ongari atkvøðu ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Súna Mørk, Bjørg Dam, Súsanna Olsen og Bogi Andreasen.

Blankt atkvøddu: Turið Horn, Jákup Dam, Gunvør Balle og Annika Olsen.

**Ískoyti:**
Annika Olsen biður um at fáa málið á skrá til býráðsfundin 24. apríl 2024.

**Býráðsfundur 24. apríl 2024:** Atkvøtt varð um at beina málið í heilsu- og eldranevndina, ið varð einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Fyri tíð síðan bleiv arbeiðsætlanin hjá starvsfólkum í heimatænastuni broytt frá vaktum á 7 tímar til vaktir á 8 tímar. Hetta var liður í at ganga ynskinum hjá heilsuhjálparafelagnum á møti, og fyri at eggja fólki til at fara upp í tíð. Mest sum øll starvsfólkini arbeiða niðursettan brøk. Tá vaktirnar blivu lagdar um, fingu øll starvsfólkini í heimatænastuni bjóða at fara upp í tíð, men ongin tók av.

Seinni hevur tað víst seg, at tað er trupult at tryggja, at starvsfólk hava uppgávur, sum svara til eina 8 tímars vakt. Hetta er ein av fremstu grundgevingunum hjá arbeiðsbólkinum fyri, at reingerð sambært tí, sum stendur í málslýsingini, aftur verður partur av heimatænastuni. Sum liður í sparingum bleiv reingerð tikin úr heimatænastuni fyri gott 15 árum síðani. Í dag er støðan í heimatænastuni í TK ein onnur og rúm er fyri, at ein partur av uppgávuni aftur fer í heimatænastuna.
At arbeiðsuppgávur ikki eru til eina vakt á 8 tímar innber, at starvsfólkini koma aftur í Heilsuhúsið innan arbeiðsdagurin er farin og hareftir ongar uppgávur hava. Tí er ætlanin at leggja uppgávurnar at dustsúgva og vaska gólv inn aftur í heimatænastuna, soleiðis at tøku tímarnir verða nýttir skynsamt. Sum sæst í málslýsingini, sum er samtykt, eru neyvar treytir fyri, hvør kann fáa reingerð, eins og talan er um visiteraða tænastu sambært tørvi. Talan er tí ikki um, at reingerð er tilboð til øll.

Tá tað ikki eru nokk av arbeiðsuppgávum at tryggja eina 8 tímars vakt fyri heimatænastuna, so kann arbeiðsgevarin velja at leggja aðrar uppgávur inn í arbeiðsdagin. Leiðslan hevur verið á fundi við KAF at umrøða at leggja part av reingerðini aftur í heimatænastuna.

KAF metir, at kommunan hevur heimild at taka uppgávur inn aftur, sum áður hava verið partur av starvinum sum heimahjálp, og at kommunan kann skipa hesar uppgávur sambært tørvinum.

Ein annar møguleiki er at venda aftur til fyrrverandi skipan og broyta aftur til 7 tímars vaktir. Hetta broytir ikki brøkin hjá starvsfólkunum, men arbeiðið verður deilt á fleiri dagar enn nú. Ein annar møguleiki er at minka normeringina í heimatænastuni og umskipa arbeiðið, so tað er pláss fyri at hava vaktir á 8 tímar, men so vera færri starvsfólk í skipanini. Tað er rættur og skylda hjá leiðaranum at skipa arbeiðið mest skynsamt, bæði tá talan er um tænastuna og fíggjarliga partin.

Lættari reingerð er longu partur av uppgávuni hjá heilsuhjálparum, har eitt nú baðirúmið verður gjørt reint, eftir at borgarin hevur verið í bað, eins og uppvask verður tikið og onnur lættari reingerð, sum starvsfólkið sær, at tørvur er á.

Vísandi til hvørt dustsúgving og at vaska gólv eiga at vera partur av arbeiðsuppgávuni í heimatænastuni, kann vísast á, at Heilsuskúli Føroya í samband við heilsuhjálparaútbúgvingina sambært teirra námsætlan undirvísir í reingerð. Tí er uppgávan ikki ókend fyri starvsfólkini.

Somuleiðis er hetta natúrligur partur av uppgávuni í heimatænastuni í Danmark.

Ført hevur verið fram, at tað er óheppið at skilmarka uppgávur millum fakbólkar, tí hetta setur kílar í millum starvsfólk. Á eldraøkinum starvast nógvir ymsir fakbólkar, hvør við sínari fakligheit og førleikum. Seinastu tíðina hevur Landslæknin verið á eftirliti á fleiri stovnum á eldraøkinum í Føroyum. Fleiri støð hava fingið boð um at gera broytingar og at laga virksemi til galdandi lóggávu. Eitt sum landslæknin hevur givið boð um er, at skilmarka uppgávubýti millum fakbólkar, at gera sonevndar kompetenceprofilar, sum gera greitt hvat hvør fakbólkur kann og skal gera í sínum arbeiði. Hetta arbeiðið er farið í gongd - eisini í heilsu- og umsorganartænastuni – og verður væntandi liðugt og sett í verk seinni í ár. Tí ber ikki til at siga, at øll starvsfólk skulu loysa somu uppgávur, men at uppgávur vera loystar eftir autorisatión, fakligheit og førleikum.

**Tilmæli**

Heilsu- og umsorganarstjórin, leiðarin í heilsuhúsinum og fulltrúi í H og U mæla eldranevndini til at hildið verður fast í verðandi samtykt.

**Heilsu- og eldranevndin 14. mai 2024:** Samtykt at taka undir við tilmælinum, tó við tí broyting at ætlaða reingerðingin ikki verður skipað sum uppgáva hjá heimatænastuni og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 22. mai 2024:** Samtykt at taka undir við heilsu- og eldranevndini, og kunnað varð um, at verandi reingerðarsáttmáli verður longdur í mesta lagi árið út. Málið beint í býráðið.

**Býráðsfundur 30. mai 2024:** Einmælt samtykt.

## 117/24 Ríðibreyt í Havnardali, Føroya Ríðingarfelag

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 01.11.2023 | 184/23 | 23/06151-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 15.11.2023 | 300/23 | 23/06151-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 22.11.2023 | 321/23 | 23/06151-1 |
| 4 Býráðsfundur | 23.11.2023 | 272/23 | 23/06151-1 |
| 5 Býráðsfundur | 14.12.2023 | 310/23 | 23/06151-1 |
| 6 Mentamálanevndin | 16.05.2024 | 131/24 | 23/06151-1 |
| 7 Fíggjarnevndin | 22.05.2024 | 127/24 | 23/06151-1 |
| 8 Býráðsfundur | 30.05.2024 | 117/24 | 23/06151-1 |

**Upprunin til málið**
Umsókn

**Lýsing av málinum**
Føroya Ríðingarfelag hevur sent mentamálanevndini umsókn um endurgjald.

Felagið vísir til dagførdu tunnilsætlanina í Marknagili, har verandi ríðingarbreyt hjá felagnum er. Sambært felagnum kemur tunnilin og ferðslan so nær ríðingarbreytini, at hon er ikki nýtilig. Sjónarmið felagsins er, at ferðslan fer at órógva hestarnar, so til ber ikki at venja ella kappast á breytini.

Felagið søkir tí um endurgjald frá kommununi, so at felagið kann gera nýggja ríðingarbreyt niðri á økinum hjá felagnum í Havnardali. Sjónarmið teirra er, at felagið hevur goldið ríðingarbreytina í Marknagili og hevur staðið fyri viðlíkahaldinum øll árini.

Felagið hevur gjørt uppskot til nýggja ríðingarbreyt, sum lutvíst er tillaging av verandi ringbreyt.

Tillagaða ringbreytin er uml. 576 metrar long. Langbreytin 500 metrar long, 10 metrar breið. Langbreytin fer niðan um Tvørá, har rør verður lagt í.

Felagið vil hava, at kommunan tekur teir 600 metrarnar, sum felagið hevur í Marknagili, og rindar fyri sama metratal til felagið til nýggju breytina í Havnardali.

Felagið ynskir sjálvt at standa fyri arbeiðinum, sum mett verður kostar uml. kr. 5,9 mió u/mvg. Miðalkostnaður pr. metur er eftir hesum uml. kr. 9.800.

Sí viðfestu skjøl, sum lýsa kostnaðarmeting, nøgdir, skurðir og tekningar.

Møguliga skal leigusáttmáli um lendi við Føroya Ríðingarfelag víðkast, um langbreytin gongur út um verandi økið.

Tað áleggur felagnum at fáa til vega øll myndugleikaloyvi til verkætlanina, áðrenn arbeiðið kann byrja og møgulig fígging frá kommununi verður goldin.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**
Hædd er ikki tikin fyri nøkrum fíggjarligum endurgjaldi til nýggja ríðingarbreyt í Havnardali í løgujáttanini til innkomuveg/tunnil. Tekniska deild metir harumframt, at tað er ikki vist, at innkomuvegurin fer at hava við sær, at ríðingarbreytin í Marknagili ikki kann nýtast longur.

Mentamálanevndin hevur ikki tøka játtan til endamálið.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
22/02539 Umsókn frá felagnum Føroysk Íslandsrossafelag um langa ríðingarbreyt (skeiðbreyt). Í málinum er upplýst niðurstøða frá friðingarmyndugleikanum, at einki má byggjast nærri enn 10 metrar frá Tvørá. Í málinum er eisini meting frá býarskipanardeildini um, at tað møguliga kundi verði bara ein long felags ríðingarbreyt, sum øll feløgini kundi nýtt saman.

21/02231 Umsókn um stuðul til víðkan og dagføring av kappingarøkinum hjá Føroya Íslandsrossafelag undir Kráarheyggi í Havnardal. Býráðið hevur játtað kr. 1 mió til endamálið. Sbrt. samtyktini er hetta grundað á, at feløgini missa kappríðingarbreytina við Hotel Føroyar orsakað av, at lendið skal brúkast til nýggja innkomuvegin. Peningurin verður játtaður av konto 8175 Vegir.

Mentamálanevndin hevur ikki viðgjørt hesi mál.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
Ríðingarbreyt longdarskurðir
Kostnaðarmeting
Yvirlit yvir verkætlan langbreyt
Nøgdir (skurður og fylla)

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | x | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei
**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☐
Eyka játtan ☒
Lokað verkætlan ☐

| Játtast av: | Játtast á: | |
|---|---|---|

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>30. mai 2024 | Blað nr.: 501 |
| | Formansins merki: |

| Deild | Verk-ætlan | Navn |
|---|---|---|
| | | |

| Deild | Verk-ætlan | Navn | Nýggj verkætlan |
|---|---|---|---|
| | | | |

| Upphædd |
|---|
| 5.905.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | 5.905.000 u/mvg |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at umrøða málið vísandi til vantandi fígging.

**Mentamálanevndin 01. november 2023:** Nevndin mælir til, at kommunan fíggjar kr. 5.500.000 av kostnaðinum, og játtar í hesum sambandi kr. 4.145.000 til ríðingarbreytina innan grein 5 soleiðis:

- kr. 1.180.000 av kontu 5275 LK52002 Kvøldskúlin
- kr. 1.000.000 av kontu 5275 LK52003 Kvøldskúlin, Hoydalar,
- kr. 1.965.000 av kontu 5475 LK54001 Býarbókasavn, og
- at restupphæddin verður løgd til fíggjarnevndina at játta.

Treyt fyri útgjaldi er, at Føroya Ríðingarfelagið hevur fingið til vega øll loyvi til byggingina. Málið at beina í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 15. november 2023:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Annika Olsen og Jákup Dam, tekur undir við tilmælinum og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson, atkvøður blankt.

**Fíggjarnevndin 22. november 2023:** Samtykt at játta 1,5 mió. kr., sum restar í, av konto 5775, íløguætlan 2024 Ríðibreyt í Havnardali og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 23. november 2023:** Atkvøtt varð um tilmælini frá meirilutanum í fíggjarnevndini 15. november 2023 og tilmælið frá fíggjarnevndini 22. november 2023, ið vórðu einmælt samtykt við fyrstu viðgerð.

Málið beint víðari til aðru viðgerð.

**Býráðsfundur 14. desember 2023:** Einmælt samtykt við aðru viðgerð. Málið avgreitt.

**Ískoyti:**
Føroyar Ríðingarfelag víðkar um økið til nýggj fjós, og í tí sambandi skal atkomuvegurin flytast suðureftir. Talan er um vegalongd 120 m og 4 m breið, har kostnaðurin pr. m3 er kr. 250 + mvg. Samlað nøgd er 366 m3.

Tilfar frá vegaarbeiðinum verður brúkt aftur til arbeiðið við ríðingarbreytini. Uppskot er, at kr. 1,3 mió verða játtaðar, har grovplanering og asfalt, sum kommunan skal gera, er íroknaður. H.V. Lützen Byggilfelag ger arbeiðið.

Uppskot er, at kr. 1,3 mió verða játtaðar til vegarbeiðið av tí upphæddini, sum er samtykt til ríðingarbreytina, sí omanfyri (játtanin er á konta 5370 stuðul til íløgur 2023), og at kr. 1,3 mió verða játtaðar aftur til ríðingarbreytina í fíggjarætlanini fyri 2025.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla nevndini til at taka undir við málinum soleiðis, at kr. 1,3 mió av játtini til ríðibreytina á kontu 5370 verða brúktar til vegaarbeiðið, og at kr. 1,3 mió verða játtaðar aftur til ríðibreytina sum stuðul í fíggjarætlanini 2025.

**Mentamálanevndin 16. mai 2024:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 22. mai 2024:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 30. mai 2024:** Einmælt samtykt.

## 118/24 Nýggjur durur til fimleikahøllina í skúlanum á Argjahamri

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 27.06.2023 | 143/23 | 23/03453-2 |
| 2 Mentamálanevndin | 01.11.2023 | 196/23 | 23/03453-2 |
| 3 Mentamálanevndin | 10.04.2024 | 58/24 | 23/03453-2 |
| 4 Fíggjarnevndin | 17.04.2024 | 84/24 | 23/03453-2 |
| 5 Býráðsfundur | 24.04.2024 | 81/24 | 23/03453-2 |
| 6 Býráðsfundur | 30.05.2024 | 118/24 | 23/03453-2 |

**Upprunin til málið**
Í fleiri á hava avbjóðingar verið við, at íðkarar, sum skulu inn í fimleikahøllina (ítróttahøllina) í skúlanum á Argjahamri, skulu ganga í gjøgnum allan skúlan fyri at koma inn í fimleikahøllina. Borgarstjórin hevur á ástaðisfundi tann 21. mars 2023 ynskt eina loysn.

**Lýsing av málinum**
Í fleiri á hava avbjóðingar verið við, at íðkarar, sum skulu inn í fimleikahøllini í á skúlanum á Argjahamri, skulu ganga í gjøgnum allan skúlan fyri at koma inn í høllina.

Høvuðsinngongdin og høvuðsgongdin gjøgnum allan skúlan má í dag standa opin eftir skúlatíð og í vikuskiftinum. Hetta m.a. givið fylgjandi avbjóðingar:

1) Stórar avbjóðingar eru við reingerð, tí nógv ferðsla er gjøgnum høvuðsgongdina gjøgnum allan skúlan frá morgni til myrkurs.
2) Um kvøldið eru til tíðir nógvar avbjóðingar við at ungdómar gera ónáðir inni í skúlanum. Hetta er møguligt, tí at stórt økið inni í skúlanum stendur víðopið, so leingi sum aktivitetur er í høllini.
3) Stóra hølið uttanfyri fimleikahøllina verður brúkt til upphiting og køkurin, sum skúlin brúkar, verður stundum brúktur av ítróttafeløgunum. Hesi viðurskiftini eru stundum til ampa fyri skúlan.

Fyri at steðga ferðsluni í gjøgnum skúlan um kvøldarnar, er ein møguleiki at gera eina sjálvstøðuga inngongd við duri í norðara enda av høllini. Á hendan hátt skal ongin ferðsla í gjøgnum skúlan, og loysir hetta eina stóra avbjóðing.

Ein the-køkur skal eisini verða í durinum, so at neyðugt er ikki hjá ítróttafeløgunum at brúka umstøðurnar í sjálvum skúlanum.
Skúlastjóri og hondbóltsfelagið meta, at tað er eitt gott hugskot at gera durin.

Umsitingin hevur gjørt eina fyribils tekning og eina varisliga kostnaðarmeting, sum liggur sum skjal 23/03453-1 í hesum málinum.

Kostnaðarmetingin er varislig, m.a. tí at skúlin á Argjahamri er tann fyrsti bygningurin í Føroyum sum hevur eina sokallaða “brand-strategi”. “Brand-strategiin” fer útyvir vanligu bygningskunngerðina, har m.a. útlendskur brunaserfrøðingar skal góðkenna allar broytingar, út frá strategiini.

Í dag hava aðrir stórir bygningar, s.s. Glasir og Landssjúkrahúsið, eisini eina “brand-strategi”.

**Lógir, ásetingar o.a.**

| | Blað nr.: 504 |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>30. mai 2024 | Formansins merki: |

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
Tekning og varislig kostnaðarmeting liggur sum skjal 23/03453-1 í hesum málinum.
Tilboð frá ráðgevingarfyritøku liggur sum skjal 23/03453-5 í hesum málinum.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei
**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☐
Eyka játtan ☐
Lokað verkætlan ☐

| Játtast av: | | |
|---|---|---|
| Deild | Verk-ætlan | Navn |
| | | |

| Játtast á: | | | |
|---|---|---|---|
| Deild | Verk-ætlan | Navn | Nýggj verkætlan |
| | | | |

| Upphædd |
|---|
| |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| Íløgujáttan | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at geva umsitingini heimild til at fyrireika byggiætlanina og at bjóða út arbeiðið at leggja aftur fyri nevnd, og at fígging verður tikin við í fíggjarætlanina 2024.

**Mentamálanevndin 27. juni 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti 26. oktober 2023**
Bygningsdeildin hevur ikki orku í løtuni til at fyrireika byggiætlan, bjóða arbeiðið út og hava fakeftirlit við hesari verkætlanini. Bygningsdeildin hevur sostatt biðið um tilboð frá ráðgevingarfyritøku hesum viðvíkjandi. Ráðgevin er sama fyritøka, sum stóð fyri byggingini av Skúlan á Argjahamri.

Tilboðið um ráðgeving liggur sum skjal 23/03453-5 í hesum málinum.

Ein fyribils kostnaðarmeting at gera durin er umleið kr. 2.000.000.

Eingin játtan er til endamálið.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamáleiðarin mæla til at viðgera tilboðið um ráðgeving samsvarandi omanfyri standandi sum grundarlag fyri víðari støðutakan um fígging til verkætlanina í figgjarætlanini.

**Mentamálanevndin 01. november 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Bygningsdeildin hevur broytt skitsurnar, so dururin er minkaður. Í mun til fyrra uppskotið er talan um uml. 12 fermetur í mun til 27 fermetur.

Sí fylgiskjal «SkúlinArgjahamarDururFimleikahøllBroyttUppskot» Byggimálsdeildin hevur játta byggiloyvi til hesa ætlan.

Bygningsdeildin hevur verði í sambandi við heildararbeiðstakaran ÁTS, sum arbeiða í bygninginum í.s.v. serøki. ÁTS kunnu gera neyðugar arbeiðstekningar út frá skitsuuppskotinum, og byggja durin í ár. Sí viðfesta fylgiskjal «Kostnaðarmeting frá heildararbeiðstakara

Viðfest er eisini kostnaðarmeting við tilhoyrandi gjøldum, sosum MVG. Sí viðfesta fylgiskjal «HeildarkostnaðurDurur»

Mett verður at fígging kann fáast til vega av tí sum er játta til Dagstovnin á Argjahamri, men ikki verður brúkt í ár.

**Játtan:**

Vanlig játtan ☐
Eyka játtan ☒
Lokað verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| 3175 | L31011 | Dagstovnurin á Argjahamri | 5775 | Nýggj verkætlan | Durur til høllina á Argjahamri | | 1.018.000 |

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin,mentamálaleiðarin og leiðarin á bygningsdeildini mæla til at geva umsitingini heimild at gera sáttmála við ÁTS sambært omanfyristandandi.

At játta verður 1.018 mió av L 31011 til nýggja løgukonto á 5775.

**Mentamálanevndin 10. apríl 2024:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 17. apríl 2024:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið at viðgera tvær reisir sum eykajáttanarmál.

**Býráðsfundur 24. apríl 2024:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 30. mai 2024:** Einmælt samtykt við aðru viðgerð.

| | | |
|---|---|---|
| | **Býráðsfundur**<br>30. mai 2024 | Blað nr.: 507<br><br>Formansins merki: |

# 119/24 Høli til Tórshavn Boksing í Bacalao

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 15.05.2024 | 109/24 | 24/02478-2 |
| 2 Fíggjarnevndin | 22.05.2024 | 131/24 | 24/02478-2 |
| 3 Býráðsfundur | 30.05.2024 | 119/24 | 24/02478-2 |
| 4 Býráðsfundur | | | 24/02478-2 |

**Upprunin til málið**
Fundur millum borgarstjóran og Tórshavn boksing um at felagið ynskir at flyta sítt virksemi inn í Bacalao.

**Lýsing av málinum**
Tórshavn Boksing hevur leingi leita eftir betri hølum til sítt virksemi. í løtuni húsast tey uppi í einum hølum á Hjalla. Felagið leigar hølið privat, og tað tyngir raksturin hjá felagnum sera nógv. Harumframt er hølið so avsíðis, at tað er ein avbjóðing hjá nøkrum íðkarum at koma til venjing. Sostatt hevur felagið leingi ynskt at komi inn í eitt høli í Bacalao.

Í viðgerðini um hvør møguliga skal inn í Bacalao, skal eisini viðmerkast, at tað eru fleiri aðrar ítróttargreinar sum eisini ynskja at sleppa inn í Bacalao. Talan er serliga um styrkifeløgini og Parkourfelagið. Harumframt vil mentanarøkið eisini inn í Bacalao, og hetta sást m.a. á almenna kjakfundinum “List til eitt vist í Bacalao”, í einari fullsettari Perlu síðst í januar 2024.

Sbrt. mál 23/01026 (umsókn frá Tórshavn boksing um at sleppa inn í høli á Bacalao) so hevur Tórshavnar Havn kanna bygningin og staðfestast kann, at hølini eru ikki góðkend av myndugleikunum í mun til brunaviðurskifti og rýmingarleiðir, nógvur soppur er í hølunum, eingin hitaskipan er, og vindeyguni mugu skiftast. Fyri at hølini kunnu nýtast, verður neyðugt at seta hølini í stand og fáa tey góðkend av byggi- og brunamyndugleikunum til ætlaða virksemið. Ongin kostnaðarmeting fyriliggur um hvussu nógv tað kostar at fáa hesi viðurskiftini í rættlag.

Og vísandi til til mál 23/07326 (Heildarætlan fyri Vestaru bryggju), har býráðið tann 29. februar 2024 samtykti, at taka undir við at gera eina heildarætlan fyri Vestaru bryggju, so samtykti Mentamálanevndin tann 10. apríl 204, at bíða verður við at gera fleiri leigumál á Bacalao til frítíðar- og ítróttarvirksemi, inntil heildarætlanin fyri Vestaru bryggju er gjørd. Tórshavn boksing hevur fingið skriv um hetta tann 17. apríl 2024.

**Verandi virksemi**
Bacalao-bygningurin stendur ikki heilt tómur. Í dag er bæði Skate- og Klintrifelagið inni í hvørjum sínum høli.
Vísandi til mál 16/04764 (umsókn vegna Skatefelagið um stuðul til eina innandura skatepark), so fór umsitingin í 2018, saman við Tórshavnar havn, í samskifti við byggivaldið um loyvi at brúka hølini til skate- og Klintrifelagið. Eftir at byggivaldið hevði kannað viðurskiftini, var ein stórur partur av verkætlanini at gera eina røð av átøkum fyri at liva upp til galdandi krøv til brunatrygd.
Tórshavnar Havn ber rakstrarútreiðslurnar av Bacalao. Í samband við skate- og klintrihøllirnar bleiv tí avtala gjørd, at ítróttaanlegg rindar 10.000 kr um mánan í leigugjald til Tórshavnar havn (fyri m.a. EL).

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
16/04764 Umsókn vegna Skatefelagið um stuðul til eina innandura skatepark
23/01026 Umsókn frá Tórshavn boksing um at sleppa inn í høli á Bacalao
23/05414 Tórshavnar Boksing : Umsókn um at fáa innvist í Bacalao
23/07326 Heildarætlan fyri Vestaru bryggju

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei
**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☐
Eyka játtan ☒
Lokað verkætlan ☐

| Játtast av: | | |
|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** |
| | LK57042 | Frælsur ítróttur |

| Játtast á: | | | |
|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** |
| | 5370 | Stuðul til tíløgur | Tórshavn Boksing |

| Upphædd |
|---|
| 600.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til, at Mentamálanevndin tekur støðu til, um 600.000 kr. skulu frá konto LK 57042 (frælsur í ítróttur) og yvir á nýstovnaða løgukonto "høli til boksing undir 5775 Ítróttaanlegg, smærri ítróttaanlegg L57029.

At beina málið í býráðið til tvær viðgerðir umvegis fíggjarnevndina.

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>30. mai 2024 | Blað nr.: 509 |
| | Formansins merki: |

**Mentamálanevndin 15. mai 2024:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið til tvær viðgerðir umfíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 22. mai 2024:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Anfinn Brekkstein og Tróndur Sigurðsson, tekur undir við mentamálanevndini og beinir málið í býráðið sum eykajáttanarmál, ið tørvar tvær viðgerðir.

Ein minniluti, Annika Olsen og Gunvør Balle, tekur ikki undir við tilmælinum, vísandi til, at peningurin verður tikin av játtanini til frælsan ítrótt.

**Býráðsfundur 30. mai 2024:** Samtykt við 11 atkvøðum fyri og 2 ímóti.

**Fyri atkvøddu**: Heðin Mortensen, Anfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Súna Mørk, Bjørg Dam, Turið Horn, Jákup Dam, Birgir Nielsen og Súsanna Olsen.

**Ímóti atkvøddu**: Annika Olsen, Gunvør Balle

# 120/24 Bráðfeingis skiftirhølir til Hoyvíksvøllin

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 10.04.2024 | 78/24 | 24/01809-2 |
| 2 Fíggjarnevndin | 17.04.2024 | 83/24 | 24/01809-2 |
| 3 Býráðsfundur | 24.04.2024 | 83/24 | 24/01809-2 |
| 4 Býráðsfundur | 30.05.2024 | 120/24 | 24/01809-2 |

**Upprunin til málið**
FC Hoyvík ger vart, við at tey hava bráðfeingis tørv á at fáa fleiri skiftishøli við fótbóltsvøllin í Hoyvík. Harumframt er hevur takið á verandi lonum fingið vindskaða í vetur.

**Lýsing av málinum**
FC Hoyvík ger vart við, at vegna stóra øking í talinum av fótbóltsleikarum, av báðum kynum, nøkta núverandi umklæðingarrúm ikki dagliga tørvin, tá venjing ella dystir eru.

Tað eru ofta umleið 40 leikarar í hvørjum skiftirúmi (sum eru 2 í tali), og tað eru skiftingarrúmini alt ov lítil til.
Tá dystur og kappingar eru í vikuskiftinum vísir trupulleikin seg ofta við ov lítlum og ov fáum skiftingarrúmum. Hetta ger tað avbjóðandi fyri FC Hoyvík at fáa kabaluna at ganga upp. Eitt dømi er, tá í t.d. mannfólk spæla ein dyst fyrst, og kvinnulið skal spæla aftaná, so sleppa tær ikki inn fyrrenn mannfólkini eru liðug at skifta, tvs. at dysturin hjá kvinnunum kann blíva forskotin við tveimum tímum.

FC Hoyvík sendi borgarstjóranum skriv um hesi viðurskifti fyri jól 2023, og hevur FC Hoyvík verið á fundi við borgarstjóran, kommunustjóran og trivnaðarstjóran tann 6. februar 2024.

Á fundinum var umrøtt, at ein bingjuloysn skuldi útvegast beinanvegin. Umboð fyri FC Hoyvík hevur samskift við NCC. Upprunaliga var talan um 4 bingjur, men nú er talan um 2 bingjur.
FC Hoyvík boðar sjálvt frá, at prísurin fyri hvørja bingju er 20.000 kr. Hartil kemur kostnaðurin av flutningi til Hoyvíksvøllin og at gera bingjurnar fastar, so tær ikki fara í ódnarveðri.
Afturat sjálvum keyps- og flutningskostnaðinum koma eisini útreiðslur til endaliga innrætting so sum brúsurúm umframt el- og vatninnleggjan.

Vísandi til eitt nú mál 23/00994 (Umsókn um byggiloyvi til bingju 1 - matr. nr. 135er, Karlamagnusarbreyt 41A, Hoyvík), sum er um dómarabingjuna á Hoyvíksvølli, so skulu hesar bingjurnar eisini hava byggiloyvi.
Trivnaðarstjórin hevur avtalað við FC Hoyvík, at felagið tekur sær av samskiftinum við byggimálsdeildina um loyvir at seta bingjurnar við Hoyvíksvøllin. FC Hoyvík hevur ynski um at bingjurnar verða settar á Karlamagnussarbreyt 43, sum kommunan eigur (matr 138dy, matr.138dq og 138do).

Verandi skiftingarrúm hjá FC Hoyvík hava fingið ein vindskaða á takinum í vetur. Inn er komið tilboð at gera takið í stand aftur. Tilboðið liggur hjálagt í hesum málinum sum skjal 24/01809-3.

Kostnaðarmetingin fyri at at gera takið aftur, keypa tvær bingjur og fáa tær upp á pláss er 500.000 kr.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
23/00994 Umsókn um byggiloyvi til bingju 1 - matr. nr. 135er, Karlamagnusarbreyt 41A, Hoyvík

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
24/01809-3 Innkomið tilboð.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/læ ttar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei
**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☐
Eyka játtan ☐
Lokað verkætlan ☐

| Játtast av: | | |
|---|---|---|
| Deild | Verk-ætlan | Navn |
| | | |

| Játtast á: | | | |
|---|---|---|---|
| Deild | Verk-ætlan | Navn | Nýggj verkætlan |
| | | | |

| Upphædd |
|---|
| |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| Íløgujáttan | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at játta 500.000 tkr. av LK57039 (Fótbóltsvøllir Argir/Hoyvík) til konto 5717 Ítróttaanlegg.

Verkætlanin við báðum bingjunum er treytað av, at byggiloyvi fæst til at seta bingjurnar við Hoyvíksvøll.

Málið verður beint í fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 10. apríl 2024:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í fíggjarnevndina.

| | | |
|---|---|---|
| | **Býráðsfundur**<br>30. mai 2024 | Blað nr.: 512<br><br>Formansins merki: |

**Fíggjarnevndin 17. apríl 2024:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðsfundur 24. apríl 2024:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 30. mai 2024:** Einmælt samtykt við aðru viðgerð.

## 121/24 06-12 Málslýsing - Hoyvíkar skúli dagføring

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 31.08.2016 | 214/16 | 16/02772-1 |
| 2 Mentamálanevndin | 16.01.2019 | 13/19 | 16/02772-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 23.01.2019 | 17/19 | 16/02772-1 |
| 4 Býráðsfundur | 31.01.2019 | 14/19 | 16/02772-1 |
| 5 Mentamálanevndin | 15.01.2020 | 3/20 | 16/02772-1 |
| 6 Trivnaðarnevndin | 11.03.2021 | 18/21 | 16/02772-1 |
| 7 Trivnaðarnevndin | 10.03.2022 | 22/22 | 16/02772-1 |
| 8 Fíggjarnevndin | 16.03.2022 | 73/22 | 16/02772-1 |
| 9 Býráðsfundur | 24.03.2022 | 59/22 | 16/02772-1 |
| 10 Trivnaðarnevndin | 15.11.2022 | 78/22 | 16/02772-1 |
| 11 Trivnaðarnevndin | 30.11.2023 | 64/23 | 16/02772-1 |
| 12 Trivnaðarnevndin | 11.04.2024 | 16/24 | 16/02772-1 |
| 13 Trivnaðarnevndin | 16.05.2024 | 18/24 | 16/02772-1 |
| 14 Mentamálanevndin | 15.05.2024 | 128/24 | 16/02772-1 |
| 15 Fíggjarnevndin | 22.05.2024 | 122/24 | 16/02772-1 |
| 16 Býráðsfundur | 30.05.2024 | 121/24 | 16/02772-1 |

**Málslýsing:**
Arbeiðssetningur og arbeiðsbólkur:
Í álitinum um skúlabygnað og skúlabygging árini 2012-2021 ( mál 2011-0679), sum skúlastýrini eisini hava viðgjørt og gjørt viðmerkingar til, er mælt til, at bygnaðurin í Hoyvíkar skúla verður tann sami, umframt at forskúli verður í skúlanum. Mælt er eisini til, at samstarvið millum báðar skúlarnar í Hoyvík um 8. og 9. flokk heldur fram, so næmingarnir í hádeildini hava fleiri valmøguleikar.

Hoyvíkar skúli er ein tvey-sporaður skúli við næmingum úr 1. – 9. fl., umframt frítíðarskúla til fyrsta og annan flokk og tveimum serflokkum. Haraftrat er Klubb 188 í skúlanum.

Viðvíkjandi høvuðsumvæling og dagføring av Hoyvíkar skúla, verður víst til samtyktina frá 26. februar 2015 (mál 14/01124), at arbeiða víðari við ætlan at byggja uppí sjálvan skúlan til tess, at alt skúlavirksemið kann rúmast har, verður harumframt samtykt at játta kr. 445.000 av íløgukarminum til dagføring av skúlum til íløgukontu L41013 Hoyvíkar skúli, høvuðsumvæling og dagføring, til at fáa til vega tørvslýsing, skitsuprojekt og kostnaðarmeting fyri uppíbygging og høvuðsumvæling, herundir hvussu skúlavirksemið kann skipast, meðan byggiarbeiðið fer fram og tíðarætlan tí viðvíkjandi.

Umsitingin hevur í vár havt fundir við leiðsluna í Hoyvíkar skúla um høvuðsumvæling, dagføring og hølistørv. Við støði í teimum fundunum og við støði í álitinum um skúlabygnað og skúlabygging árini 2012-2021, er arbeiðssetningurin hesin:

Hoyvíkar skúli skal høvuðsumvælast og dagførast, so karmarnir eru tíðarhóskandi og pláss er fyri øllum virkseminum í skúlanum.

Í Hoyvíkar skúla skal pláss vera fyri tveimum flokkum í 10 árgangum frá forskúla til og við 9. flokki, fyri tveimum serflokkum og fyri frítíðarskúla frá forskúla til og við 3. flokki. Skúlin ynskir at halda fast við skipanina av hølunum, soleiðis at skilja, at kjarnin er námsfrøðiligur tænastudepil, leiðsla/fyrisiting, starvsfólkarúm, og at næmingar og lærarar ikki hvørva út í lonir, men eru í trimum deplum. Grunddeild forskúli-3.fl., miðdeild 4.- 6.fl., hádeild 7. – 9.fl., og at sertilboðið er í friðarligari eind skúlanum.

Hølini til handverk og list eru ikki nøktandi og ikki nóg nógv, sostatt er neyðugt at útvega fleiri og dagføra tey, sum eru.

Umstøðurnar at eta hjá næmingum og starvsfólkum skulu vera góðar, so ikki er neyðugt at eta í flokshølunum.

Tørvur er á førleikastovu, fleiri fundar- og bólkahølum og námsfrøðiligum tænastudepli.

Klubb 188 er í skúlanum.

Starvsfólkini skulu hava umstøður at ráðleggja og fyrireika í skúlanum, so ikki er neyðugt at gera ein part av arbeiðinum við hús.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at samtykkja arbeiðssetningin og geva umsitingini heimild til at útvega byggiskrá.

**Mentamálanevndin 31. august 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti**
Arbeiðið at gera byggiskrá er komið væl áleiðis, men er ikki gjørt liðugt. Byggiskráin varð sett í bíðistøðu í januar 2018, tí greiði var ikki á løgujáttan til dagføring og høvuðsumvæling av Hoyvíkar skúla. Í langtíðar løguætlanini er nú peningur settur av til verkætlanina frá 2020 og nøkur ár fram. Ætlanin er tí at gera byggiskránna lidna í ár.

Hóast ætlanina at dagføra og høvuðsumvæla Hoyvíkar skúla, er neyðugt at gera ábøtur og umvælingar, áðrenn sjálv høvuðsumvælingin fer í gongd. Átrokandi umvælingar, sum verða gjørdar í 2019, eru umvæling av ávísum útveggjum, tekjan á nýggja bygninginum verður skift, og haraftrat verða nøkur vindeygu skift.

Í sambandi við umvælingarnar í 2019, er ætlanin, at ein partur verður gjørdur, meðan næmingarnir hava frí, so umvælingin órógvar undirvísingina sum minst. Men meginparturin verður væntandi gjørdur, meðan

skúlagongd er, og tí má støða takast til, hvussu skúlin verður skipaður, meðan arbeitt verður. Ein møguleiki er at flyta úr tveimum flokshølum, starvsfólkarúminum og hølunum til fyisiting og so brúka kantinuna í Hoyvíkshøllini og møguliga kjallaran í Hoyvíkar kirkju, meðan útveggir verða umvældir. Húsaumsitingin, mentamáladeildin og skúlin samskifta um, hvussu umvæling og skúlagongd verða skipað.

<u>Innbúgv</u>
Fyri at bøta um umstøðurnar serliga í miðhøllini/bókasavninum hevur skúlaleiðslan ynski um at keypa innbúgv, soleiðis at hølini verða hugnaligari og kunnu verða brúkt til fjølbroyttari virksemi, bæði til sosiala samveru í fríløtum, til undirvísing og næmingaarbeiði. Mett verður at 150.000 kr. kunnu setast av til tað. Ætlanin er, at innbúgvið eisini verður brúkt í høvuðsumvælda bygninginum.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, leiðarin á barna- og ungdómsdeildini og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja, at hildið verður fram við at gera byggiskrá fyri høvuðsumvæling og møguliga útbygging av Hoyvíkar skúla, íroknað frítíðarskúla og forskúla.

Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at játta 150.000 kr. av 4175 Dagføring av skúlum til innbúgv til Hoyvíkar skúla.

Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 16. januar 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 23. januar 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 31. januar 2019:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Nú høvuðsumvælingin av Hoyvíkar skúla er útsett á langtíðarløguætlanini, verður mett skilabest at bíða við at gera byggiskránna lidna til greitt er, nær játtan verður tøk, so farast kann undir høvuðsumvæling og møguliga útbygging av Hoyvíkar skúla og Frítíðarskúlanum í Hoyvík.

Hildið verður fram at gera ábøtur og umvælingar í skúlanum, og í 2019 eru hesi arbeiði gjørd í Hoyvíkar skúla: Klædningur og tak eru skift í vestara bygningi, og nýggjur útveggur og vindeygu eru skift á suðursíðuni í elsta parti av skúlanum.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, mentamálaleiðarin og leiðarin á barna- og ungdómsdeildini mæla mentamálanevndini til at samtykkja , at byggiskráin fyri høvuðsumvæling og møguliga útbygging av Hoyvíkar skúla íroknað frítíðarskúla og forskúla verður útsett.

**Mentamálanevndin 15. januar 2020:** Ein meiriluti, Gunvør Balle, Jákup Dam og Marin Katrina Frýdal, tekur undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Halla Samuelsen og Helena Dam á Neystabø, heldur fast í at man heldur fram við arbeiðnum at gera byggiskrá í Hoyvíkar skúla

**Ískoyti**

Tørvur er at fáa greiði á nær ætlanin er at gera møguliga høvuðsumvæling og útbygging av Hoyvíkar skúla v.m. Hetta m.a. soleiðis at húsaumsitingin kann avgera nærri í mun til neyðugar umvælingar.

Aftur í fjør vóru ein røð av umvælingum gjørdar tí tað ikki toldi at bíða.

Fígging er ikki raðfest til endamálið í 2021. Umsitingin metir at tað ikki er upplagt at byrja arbeiðið við byggiskrá fyrrenn tað er greitt viðv. nær løgufígging umleið kann vera tøk.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, mentamálaleiðarin og leiðarin á barna- og ungdómsdeildini mæla nevndini til at taka støðu nær farast skal undir at gera byggiskrá. Málið verður beint í mentamálanevndina.

**Trivnaðarnevndin 11. mars 2021:** Nevndin er samd um at farast skal undir at gera byggiskrá, sum skal verða liðug í heyst, tá ið fíggjarætlanin fyri 2022 verður gjørd.

**Ískoyti**:
Arbeiðið við at gera byggiskrá byrjaði ikki sum ætlað í fjør vegna ógreiðu um raðfesting av hesi lutfalsligu stóru verkætlan. Síðani tá hevur býráðið í sambandi við fíggjarætlanina fyri 2023 samtykt at játta 2.000 tkr. til Hoyvíkar skúla. (LK41013 Hoyvíkar skúli, høvuðsumvæling og dagføring), umframt at tað longu eru 158 tkr. á L41013 Hoyvíkar skúli, høvuðsumvæling og dagføring.

Umsitingin er byrjað uppá tilgongdina og hevur eisini fundur verið her í feb. við skúlastýrið í Hoyvíkar skúla.

Avrátt er, at fyrsta stigið er at bygningsdeildin fær gjørt eina neyva støðulýsing av bygninginum, ið kann vera grundarlag fyri víðari støðutakan til umvælingar, umbyggingar og útbyggingar. Henda støðulýsing verður væntandi tøk í mai 2022.

Samstundis er ætlanin í mai 2022 at halda fram við gerð av byggiskrá saman við leiðslu og starvsfólkum í skúlanum og frítíðarskúlanum. Ætlandi skal byggiskráin vera liðug í september 2022, soleiðis at málið kann vera tikið við í sambandi við fíggjarætlanartilgongdina fyri 2023.

**Innbúgv**
Á fundi í skúlastýrinum var ynski sett fram um at fáa játtað nakað av innbúgvi til skúlan og sum kann vera brúkt eisini í sambandi við komandi verkætlanina. Nevnd var upphædd á umleið 200-300 tkr.

**Onnur arbeiðir**
Í játtanini hjá bygningsdeildini á kontu 6110 er sett nakað av til umbyggingar ves'um í Hoyvíkar skúla.

**Tilmæli**:
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla trivnaðarnevndini til at samtykkja:

a). at flyta 2.000 tkr. av LK41013 til L41013 Hoyvíkar skúli, høvuðsumvæling og dagføring.
b). at játta Hoyvíkar skúla 300 tkr. til keyp av innbúgvi.

Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Trivnaðarnevndin 10. mars 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum. Pkt. b. verður at játta av projektkontu L41013.

**Fíggjarnevndin 16. mars 2022:** Samtykt at taka undir við trivnaðarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 24. mars 2022:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Leiðslan í  Hoyvíkar skúli og leiðslan í Fríðtíðarskúlanum í Hoyvík mæla til, at frítíðarskúlin skipar alt sítt virksemi í í lítla bygninginum, og at og 1. og 2. flokkur verða fluttir í høvuðsbygningin. Sum er, er ikki pláss fyri fleiri flokkum í høvuðsbygninginum, men í sambandi við høvuðsumvæling og dagføring, kann byggjast út, so grunddeildin verður savnað á einum stað.

Býráðið hevur í februar 2022 samtykt, at forskúlar verða skipaðir sum tilboð í øllum kommunalu skúlunum. Sostatt skal forskúli verða í Hoyvíkar skúla.

Um lítli bygningurin verður til frítíðarskúlan burturav, er pláss fyri bæði frítíðarskúla til forskúla og til frítíðartilboð til 3. flokk, tvs. frítíðarskúla til forskúla -2. fl., frítíðarskúla til sertilboðið, til 3. floks tilboðið  og Klubb 188.

Í høvuðsbygninginum er tørvur á 8 flokshølum aftrat. Tvey til forskúla, og fýra (tvær dupultstovur, sum eru í lítla bygninginum) til 1. og 2. flokk, og so tvey til 9. flokk, sum er í fyribilshølum í skúlagarðinum.

Allar fakstovur eru í skúlanum, men tær flestu eiga at verða dagførdar. Umstøðurnar at eta eru ikki nøktandi, námsfrøðilig tænastudepilin er í høllini, sum upprunaliga er felagsøki til uppihald og tiltøk.

Samanumtikið er tørvur á nøkrum hølum aftrat í skúlanum og dagføring av nøkrum av verandi hølum. Fyri víðari tilgongdina er tørvur á at fáa til vega eitt hugskotsupplegg, sum lýsir vavið av hesum, og hvussu hetta kann loysast bæði í mun til skúlan og frítíðarskúlan.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla trivnaðarnevndini til at samtykkja, at umsitingin fær til vega eitt hugkotsupplegg við støði í, at skúli og frítíðarskúli vera í hvør sínum bygningi.

**Trivnaðarnevndin 15. november 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Løgd verða fram dømi um møguleikar fyri bygging á økinum, har Hoyvíkar skúli er í dag, út frá ymsum fortreytum.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, mentamálaleiðarin og leiðarin á bygningsdeildini mæla nevndini til at umrøða málið.

**Trivnaðarnevndin 30. november 2023:** Umrøtt.

**Ískoyti:**
Fleiri orsøkir eru til at seta dagføring av Hoyvíkar skúla á breddan.

Øllum kunnugt er skúlin niðurslitin og hevur tørva eina høvuðsumvæling í mong ár sum bert gerst meira og meira átrokandi.

Í samband við meting av gongdini í barnatalinum og framtíðar tørvi á skúlaplássum verður mett at støðan er rættuliga góð í løtuni, men at tørvur er á at kommunan er fyrireika til at møta møguligum avbjóðingum.

Ein møguliga lækking av næmingahámarkinum í flokkunum, har lógaruppskot er til viðgerða í Løgtinginum, fer at seta krøv um nýggja skúlabygging.

Framtíðar øking í barnatalinum og broytingar millum verðandi skúlaøkir fer við tíðini eisini at seta krøv um nýggja skúlabygging. Meira enn helmingurin av ætlaðari sethúsa og íbúðarbygging í kommununi, tey mongu komandi árini verður upp í Hoyvíkshaganum.

Ein nærri meting av skúlatørvinum í økinum verður gjørd til fundin.

Tað fyriliggja fleiri uppskot um endurnýggja av Hoyvíkar skúla

Seinast hevur nevndin umrøtt skitsulýsing og kostnaðarmeting av møguligum nýggjum 2 sporaðum ella 3 sporaðum skúla á økinum har Hoyvíkar skúli í dag stendur.

Mentamála deildin hevur enn ikki gjørt endaliga niðurstøðu av hvat er besta loysnin fyri Hoyvíkar skúla og fyri skúlaøkið uppi í Hoyvík, men vísir á fylgjandi punkt sum ega at verða umrødd:

1. Íbúgvarnir í skúlaøkinum, skúli og starvsfólk eiga at fáa eina haldgóða skúlaloysn og nútímans skúlakarmar skjótast gjørligt.
2. Tá avgerð verður tikin er umráðandi at hon røkkur fram í tíðina, baði í mun til tørvin á skúlaplássum og nútímans skúlaskap.
3. Í samband við eina komandi loysn fyri Hoyvíkar skúla er eisini vert at umhugsa samlaða skúlabygnaðin í økinum.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla nevndini til at umrøða málið.

**Trivnaðarnevndin 11. apríl 2024:** Umrøtt.

Ískoyti:
Við støði í framskriving av næmingatalinum, staðseting og tí standi bygningurin er í verður ikki mett neyðugt enn at byggja út við einum spori aftrat í Hoyvík.

Sambært fólkaskúlalógini § 20 skal næmingatalið vanliga ikki fara upp um 24 næmingar við skúlaársbyrjan. Ein skúlaflokkur verður tó ikki býttur sundur, fyrrenn næmingatalið fer upp um 26 næmingar.

Eitt uppskot er í Løgtinginum, at næmingatalið í flokkunum fer niður á 20 næmingar. Uppskotið er ikki samtykt enn og fellur burtur um, tað ikki er avgreitt, áðrenn tingið fer í summarfrí. Sum støðan er í løtuni, verður arbeitt við støði í verandi mesta næmingatalið. Verður uppskotið um 20 næmingar so samtykt, er støðan ein onnur, og neyðugt verður at finna útav, hvar byggjast skal til tey tvey, sum so koma aftrat í Tórshavnar kommunu.

Á økinum hjá Hoyvíkar skúla er pláss fyri einum trý-sporaðum skúla, men tað er ikki ráðiligt at byggja til trý spor, tí so verður sera trongligt. Um tað seinni kemur upp á tal at byggja eitt spor aftrat í Hoyvík, kundi verið roynt at funnið eitt øki nærindis Skúlanum við Løgmannabreyt, har tað ber til at byggja til eitt spor aftrat, og tað sporið bleiv so partur av Skúlanum við Løgmannabreyt.

Um Hoyvíkar skúli skal víðkast til trý spor, verður ov trongt á økinum, og neyðugt verður at finna neyðloysnir, og tað er ikki nøktandi, tí hølisviðurskiftini eiga at vera góð og á einum støði, sum ein nýggjur skúli eigur at hava.

15. november 2022 samtykti trivnaðarnevndin, at umsitingin fekk heimild at fáa til vega hugskotsupplegg við støði í, at skúli og frítíðarskúli vera í hvør sínum bygningi. Hóast hugskotið frá SNA tekur støði í, at skúli og frítíðarskúli eru í sama bygningi og partvís í somu hølum, verður mælt til at halda fast við samtyktina, og at arbeitt verður víðari við, at frítíðarskúlin skipar alt sítt virksemi í lítla bygninginum og at 1. og 2. flokkur verða fluttir í høvuðsbygningin.

Arbeiðssetningur
Høvuðsbygningurin í Hoyvíkar skúla skal høvuðsumvælast og dagførast, soleiðis at hann lýkur nútíðarkrøv viðvíkjandi umstøðum til undirvísing og tí virksemi, sum har til hoyrir. Skúlin skal dagførast og útbyggjast til tvey spor í hvørjum árgangi, 52 næmingar í hvørjum árgangi frá forskúla til og við 9. flokki og til sertilboð, sum er býtt í tríggjar aldursbólkar (grund-, mið-, og hádeild) 21 næmingar tilsamans. Orsøkin til, at mælt verður til at byggja til 52 næmingar í hvørjum árgangi, er, at hóast mesta næmingatal er 24, verður ein flokkur ikki býttur sundur fyrrenn næmingatalið fer upp um 26 næmingar.

Mentamáladeildin metir, at besta loysnin er at taka skúlan og fimleikahøllina niður og byggja nýggjan bygning á staðnum.

Alt skúlavirksemið skal vera í høvuðsbygninginum, frítíðarvirksemið skal vera í lítla bygninginum, har sum fyrsti og annar flokkur, frítíðarskúlin til fyrsta og annan flokk og Klubb 188 halda til. Tá skúlavirksemið er flutt út verður eisini pláss til frítíðarskúla til forskúla har. Ávísar tillagingar skulu gerast í bygninginum soleiðis, at hann er hóskandi til alt námsfrøðiliga virksemið hjá frítíðarskúlanum og KLUBB 188.

Byggiskrá
Umsitingin biður um heimild at at fáa til vega byggiskrá og at játta upphædd av LK41013 Hoyvíkar skúli, høvuðsumvæling og dagføring til endamálið.

Hýsing
Meðan Hoyvíkar skúli verður tikin niður og bygdur upp aftur, ber ikki til at hava skúlavirksemið í bygninginum.

Umboð fyri mentamáladeildina og bygningsdeildina og leiðslan í Hoyvíkar skúla hava verið og hugt at skúlanum í Hoydølum við tí endamálið at meta um, um hann er egnaður til at hýsa virkseminum í Hoyvíkar skúla í byggitíðini. Sí hjálagt skjal j.nr, 24/02519-1.

Hóast ivasamt er, um skúlabygningurin í Hoydølum kann hýsa Hoyvíkar skúla í byggitíðini, verður mælt til at kanna tað nærri, tí tað kann vera einasti møguleiki at hýsa øllum skúlanum á einum stað og í einum øki, sum er nærindis skúlanum.

Um tað ikki ber til at hava skúla í Hoydølum, kann verða neyðugt at keypa ella leiga fyribilshøli og haraftrat finna eina staðseting til tey.

Áðrenn støða kann takast til, um tað ber til at hava skúla í bygninginum í Hoydølum, má ein støðulýsing gerast við eini kanning av inniklima. Haraftrat má ætlan gerast fyri útiøkið, ferðslu og parkering.

Fígging

Um øll játtanin, sum er eftir á LK41013 Hoyvíkar skúli, høvuðsumvæling og dagføring, verður framflutt, eru 826 tkr. tøkar til endamálið. Mett verður, at upphæddin er nóg mikið til byggiskrá og til eina støðulýsing av skúlabygninginum í Hoydølum.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, mentamálaleiðarin, leiðarin á Barna- og ungdómsdeildini og leiðarin á Bygningsdeildini mæla trivnaðarnevndini at:

a) at taka undir við arbeiðssetningi, at Hoyvíkar skúli framhaldandi verður ein tvey- sporaðan skúli við næmingum úr forskúla til og við 9. flokki
b) at játta 1 mió. av LK41013 Hoyvíkar skúli, høvuðsumvæling og dagføring til byggiskrá til tvey sporaðan skúla við næmingum úr forskúla til og við 9. flokki og til dagføring av hølunum til frítíðarskúlan
c) at játta fígging av LK41013 Hoyvíkar skúli til støðulýsing av skúlabygninginum í Hoydølum

og leggja málið aftur fyri trivnaðarnevndina til kunningar umframt at beina málið umvegis fíggjarnevndina í býráðið.

**Mentamálanevndin 15. mai 2024:** Kunnað varð um málið.

**Trivnaðarnevndin 16. mai 2024:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 22. mai 2024:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og trivnaðarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 30. mai 2024:** Einmælt samtykt.

# 122/24 Skipan av nýggjum frítíðartilboðum til 3. - 6. flokk

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 10.04.2024 | 69/24 | 24/01788-1 |
| 2 Mentamálanevndin | 15.05.2024 | 103/24 | 24/01788-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 22.05.2024 | 132/24 | 24/01788-1 |
| 4 Fíggjarnevndin | 29.05.2024 | 150/24 | 24/01788-1 |
| 5 Býráðsfundur | 30.05.2024 | 122/24 | 24/01788-1 |

**Upprunin til málið**
Avgerð frá Barna- og Útbúgvingarmálaráðnum viðv. kæru um 3. floks tilboðið hjá Tórshavnar kommunu

**Lýsing av málinum**
Mentamálanevndin samtykti tann 10. Januar 2024, í máli nr. 23/06810, at arbeiða víðari við at skipa nýggj frítíðartilboð til børn og ung frá 3. flokki upp til 18 ár. Samtyktin er gjørd út frá avgerð frá Barna- og Útbúgvingarmálaráðnum viðvíkjandi frítíðartilboðnum hjá Tórshavnar kommunu til 3. flokk.

Barna- og Ungdómsdeildin hevur, við støði í samtyktini, arbeitt víðari við loysnini at skipa nýggj og sjálvstøðug frítíðartilboð, líknandi Margarinfabrikkini, sum kunnu bjóða frítíðar- og virkistilboð til børn og ung frá 3. flokki upp til 18 ár.

Mælt verður til at seta á stovn tvey frítíðartilboð afturat Margarinfabrikkini, eitt í Hoyvík og eitt á Argjum, har alt frítíðarvirksemi til børn og ung frá 3. flokki til 18 ár verður savnað á sama stað. Mælt verður somuleiðis til, at tilboðini verða skipað eftir júst sama leisti sum Margarinfabrikkin, sum ein blanding av frítíðartilboðum og virkistilboðum.

Virksemið er í høvuðsheitum gerandisdagar frá 12-17 fyri 3-6. flokk, meðan tað fyri ung (7. flokk til og við 17 ár) er gerandisdagar frá 18-22, tó fríggja- og leygarkvøld seinni út á náttina.

*Námsfrøðiligt innihald*
Talan er fyrst og fremst um eitt námsfrøðiligt stað við blandaðum starvsfólkum. Tað vil siga at kjarnan á staðnum eru námsfrøðingar, og at tað verður lagt afturat við øðrum fakbólkum, alt eftir virksemi og tørvi.

Virksemið í frítíðartilboðunum er klubbtilboðið til 3-6, sum altíð eru opin gerandisdagar frá 11:30 – 17:00. Harumframt verður skipað fyri virkistilboðum og tiltøkum, sum ung kunnu koma til. Sum dømi um hetta kunnu verða verkstøð av ymiskum slag, tiltøk til ávís áhugamál og spøl og annað virksemi, ið kann hava áhuga og draga fólk til.

Umframt hetta ber til at skipa fyri verkætlanum í samstarvi við uttanhýsis partar. Dømi um hetta frá Margarinfabrikkini eru Umhvørvisvikan, Barnajól, Summarfabrikk, Talent, samrøðubólkar fyri børn og ung í skilnaði (saman við Almanna- og Mentamálaráðnum), Sangskrivaraskeið, SSP – Ungdómslív, Leygardagsverkstovur fyri øll og Ungt summar. Afturat hesum kann nevnast, at Lopfjølin er partur av Margarinfabrikkini.

Annað virksemi, so sum at vera úti millum tey ungu í kvøldar- og náttarlívinum, kann eisini vera partur av fyribyrgjandi virkseminum hjá ungdóms- og frítíðartilboðunum.

Margarinfabrikkin hevur í dag eitt samstarv við Almannaverkið, har Almannaverkið keypir tænastur frá Margarinfabrikkini til børn við serligum tørvi, sum koma í frítíðartilboðini. Tá søkja foreldur umvegis Almannaverkið um at nýta frítíðartilboðið, og verður gjørd ein visitatión saman við Almannaverkinum um samstarvið. Tað kann til dømis vera saman við einum stuðli.

Sosiala deild hjá Tórshavnar kommunu nýtir eisini Margarinfabrikkina sum part av teirra virksemi til børn og ung við avbjóðingum. Nøkur starvsfólk á Margarinfabrikkini hava tímar frá Sosialu deild.

Mett verður at tørvurin á hesum tilboðum frá ávikavist Almannaverkinum og Sosialu deild er stórur. Tí kann væntast, at verða líknandi frítíðartilboð sum Margarinfabrikkin sett á stovn á Argjum og í Hoyvík, fer tørvur eisini at vera á at nýta hesi tilboð til børn við serligum tørvi og børn og ung við avbjóðingum. Tað hevur týdning og er eitt stórt virði í, at talan er um eitt námsfrøðiligt tilboð, har stuðlar hjá hesum børnum og ungu kunnu koma inn í.

At hugsa hesi viðurskifti inn í frítíðartilboðið frá byrjan er eisini við til at tryggja, at talan verður um eitt frítíðartilboð sum er inkluderandi og lýkur okkara skyldur. Víst verður til *Avgerð frá Barna- og útbúgvingarmálaráðnum viðv. kæru um 3. floks tilboðið hjá Tórshavnar kommunu*, har júst tilboðið til børnum við serligum tørvi er snúningspunktið.

*Bygnaður*
Fyri at skipa frítíðartilboð eftir nevnda leistinum verður mælt til at leggja frítíðartilboðini frá 3-6 flokk saman við verandi ungdómstilboðum. Tað merkir so eisini, at ungdómstilboðini um dagin og á kvøldi skipanarliga verða tikin út verandi frítíðarskúlum á Argjum og í Hoyvík og løgd í eitt nýtt frítíðartilboð, sum skal fevna um virksemið frá 3. flokki til upp til 18 ár, eins og Margarinfabrikkin.

*Uppskot til staðseting*
Eindarleiðararnir á Barna- og Ungdómsdeildini hava kannað møguligar staðsetingar av frítíðartilboðum til børn og ung frá 3. flokki upp til 18 ár.

Í Hoyvík verður mælt til at frítíðartilboðið verður staðsett í sama bygningi sum Frítíðarskúlin í Hoyvík og Klubb 188 eru í dag. Í dag brúkar Hoyvíkar Skúli ein part av bygninginum, sum upprunaliga varð ætlaður frítíðarskúla burturav. Við at leysgeva allan bygningin til frítíðarskúla, frítíðartilboðið og ungdómstilboðið ber til at savna alt í eitt Barna- og Ungdómshús, har øll frítíðartilboðini eru savnaði. Skipanarliga má tó gerast munur á frítíðarskúlanum og frítíðartilboðnum, soleiðis at hesi eru tveir ymiskir stovnar, hóast teir húsast í sama bygningi.

Tórshavnar kommuna eigur bygningin og er tí ikki neyðugt at byggja nýtt ella at leiga onnur høli til endamálið.

Á Argjum verður mælt til at frítíðartilboðið verður staðsett í gamla Argja Skúla (Argjavegur 32). Talan er um ein bygning, sum Tórshavnar kommuna eigur og hevur fult ræðið á. Bygningurin krevur umvælingar og tillagingar, men staðseting og umstøður kring bygningin gera, at talan er um eina góða varandi loysn, um bygningurin verður umvældur til endamálið.

Til ein varandi loysn stendur klár, verður mælt til at leiga onnur høli til frítíðartilboðið á Argjum.

*Frítiðartilboðini í bygdunum*
Eins tilboð eiga at verða boðin øllum børnum og ungum í Tórshavnar kommunu. Tí skulu frítíðartilboð til 3. – 6. flokk og ungdómstilboð frá 7. flokki til 18 ár eisini skipast í bygdunum, t.e. á Velbastað, í Nólsoy, í Kaldbak og í Kollafirði. Mælt verður til at hesi verða skipað í somu hølum sum frítíðarskúlarnir og ungdómstilboðini eru í dag. Viðvíkjandi leiðslu og skipan av innihaldi í tilboðunum, verður mælt til at hesi verða savnaði undir somu leiðslu sum dagstovnarnir, eins og í dag. Upplatingartíðir og tilboð skulu eisini taka hædd fyri tørvinum og umstøðunum í bygdunum.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Løgtingslóg nr. 67 frá 10. mai 2000 um dagstovnar og dagrøkt, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 45 frá 30. apríl 2018 (Dagstovnalógin)

Kommunufulltrúin

**Upplýsingar frá umsitingini**
Frítíðartilboðið til 3. flokk hevur bert játtan til og við juli mánað í 2024, og tí er neyðugt at taka skjóta støðu til, hvussu farast skal fram eftir summarsteðgin.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
23/03085 Frítíðartilboðið til 3. Flokk, fíggjarstøða og skipan frameftir
23/06810 Avgerð frá Barna- og útbúgvingarmálaráðnum viðvíkjandi kæru um 3. floks tilboðið hjá Tórshavnar kommunu

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | X | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | X | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | X | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og deildarleiðarin á Barna- og Ungdómsdeildini mæla til at støða verður tikin til, um nýggj frítíðartilboð skulu skipast til 3. – 6. flokk eftir uppskotna leistinum.

**Mentamálanevndin 10. apríl 2024:** Umrøtt málið og kannað verður møguleikar. Málið verður lagt fyri mentamálanevndina aftur til støðutakan.

**Ískoyti:**
Umsitingin arbeiðir við uppskoti til at skipa nýggj frítíðartilboð til 3. – 6. flokk í Tórshavnar kommunu.

Mett verður, at rættast er at arbeiða við at seta á stovn at nýggj frítíðartilboð til 3. – 6. flokk eftir summarsteðgin í 2025, heldur enn eftir summarsteðgin í 2024, tá tíðin er sera knøpp at fáa skipað innihaldsligu, starvsfólkaligu og bygningsviðurskiftini innan so stutta tíð.

Mælt verður tí til at halda áfram við frítíðartilboðnum til 3. flokk, inn til nýggj frítíðartilboð til 3. – 6. flokk eru klár.

Frítíðartilboðið til 3. flokk hevur bert játtan til og við juli mánaði í 2024. Skal tilboðið halda áfram eftir summarsteðgin, verður neyðugt við eykajáttan fyri restina av árinum. Mælt verður somuleiðis til at seta játtan á Fíggjarætlan fyri 2025 fram til og við juli mánaði, soleiðis at tilboðið kann koyra skúlaárið 2024/25.

Mettur kostnaður fyri hetta er uml. 3,8 mió. kr. í 2024 og uml. 5,2 mió. kr. í 2025.

Harumframt verður neyðugt, fyri at fylgja avgerðini hjá Barna- og Útbúgvingarmálaráðnum viðvíkjandi stuðli til børn við serligum tørvi, við hægri játtan til Serstovurnar og Tímagrunnin.

Um tiltøkini fyri tey frítíðarskúlabørnini, sum í inniverandi skúlaári fáa tímar frá Tímagrunninum ella serstovujáttanini, skulu longjast fyri eitt skúlaár afturat, kemur hetta at kosta uml. 2,2 mió. kr. Av hesum fella uml. 1,0 mió. í 2024 og uml. 1,2 mió. í 2025.

Sí viðfest skjal um kostnað av at longja tiltøkini úr Tímagrunninum og serstovunum við einum ári.

Samanlagt verður tí mett, at neyðugt er at játta 4,8 mió kr. í 2024 og 6,4 mió. kr. í 2025 fyri at frítíðartilboðið til 3. flokk kann halda áfram í eitt skúlaár afturat.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og deildarleiðarin á Barna- og Ungdómsdeildini mæla til at frítíðartilboðið til 3. flokk verður longt fyri skúlaárið 2024/25.

Eykajáttan verður latin á 4,8 mió kr. í 2024.

Játtan á 6,4 mió. kr. verður sett á Fíggjarætlan 2025.

**Mentamálanevndin 15. mai 2024:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 22. mai 2024:** Tikið av skrá.

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☐
Eyka játtan ☒
Lokað verkætlan ☐

| **Játtast av:** | | |
|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** |
| 3175 | L31011 | Dagstovnurina Argjahamri |

| **Játtast á:** | | | |
|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** |
| 3216 | | Verkætlanir á ungdómsøkinum | |

| **Upphædd** |
|---|
| 4 mió |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Ískoyti:**
Frítíðartilboðið til 3. flokk hevur bert játtan til og við juli mánaði í 2024. Skal tilboðið halda áfram eftir summarsteðgin, verður neyðugt við eykajáttan á 4 mió fyri restina av árinum. Mett verður at fígging kann fáast til vega av tí sum er játtað til Dagstovnin á Argjahamri, men ikki verður brúkt í ár

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og deildarleiðarin á Barna- og ungdómsdeildini mæla fíggjarnevndini til at játta kr. 4 mió av L31011 Dagstovnurin á Hamrinum til kontu 3216 Verkætlanir á ungdómsøkinum. At beina málið í býráðið til tvær viðgerðir.

**Fíggjarnevndin 29. mai 2024:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið til tvær viðgerðir.

**Býráðsfundur 30. mai 2024:** Einmælt samtykt við fyrstu viðgerð og beint víðari til aðru viðgerð.

# 123/24 Trivnaðarnevndin: Umbøn frá eldraráðum um broyting av viðtøkunum, soleiðis at heimild verður fyri at útgjalda fundarpening e.l.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Trivnaðarnevndin | 26.09.2016 | 41/16 | 16/01243-4 |
| 2 Trivnaðarnevndin | 28.11.2016 | 57/16 | 16/01243-4 |
| 3 Trivnaðarnevndin | 06.12.2016 | 61/16 | 16/01243-4 |
| 4 Fíggjarnevndin | 07.12.2016 | 408/16 | 16/01243-4 |
| 5 Býráðsfundur | 15.12.2016 | 327/16 | 16/01243-4 |
| 6 Býráðsfundur | 17.12.2020 | 310/20 | 16/01243-4 |
| 7 Heilsu- og eldranevndin | 14.05.2024 | 13/24 | 16/01243-4 |
| 8 Býráðsfundur | 30.05.2024 | 123/24 | 16/01243-4 |

**Málslýsing:**
Eldraráðið hevur í telduposti dagfest 26. aug. 2016 sent umsókn um broyting í § 6, stk. 4 í viðtøkunum fyri Eldraráðið:

§ 6, stk. 4 er soljóðandi: Tað er sjálvboðið at vera limur í Eldraráðnum. Samsýning verður ikki latin, men limirnir kunnu fáa endurgjald fyri skjalprógvaðar útreiðslur til ferðing til og frá fundum í Eldraráðnum.

Eldraráðið heitir á Tórshavnar Býráð um at endurskoða, tillaga og dagføra viðtøkurnar fyri Eldraráðið soleiðis, at tað verður gjørligt at veita ráðslimunum eina ella aðra samsýning fyri tað eykaarbeiði, tað er at sita í Eldraráðnum í eitt 4-ára skeið.

Sambært Eldraráðnum er vanligt, at ráðs- og nevndarlimir fáa eina ella aðra samsýning fyri sítt nevndararbeiði. Í tí liggur ein viðurkenning av og virðing fyri tí arbeiði, ráðs- og nevndarlimir gera. Sagt verður víðari, at limirnir í teimum báðum føroysku eldraráðunum munnu vera millum tey einastu, ið ikki verða samsýntir á nakran hátt.

Valbærisaldurin er 60 ár, og metir ráðið, at tað kann vera torført at fáa fólk í arbeiðsførum aldri at lata seg velja í ráðið.

Eldraráðið vísir til viðtøkurnar fyri eldraráðið í Keypmannahavn § 7, stk. sum grundarlag fyri ynsktu broytingini soleiðis, at ráðslimirnir kunnu fáa samsýning.

Har stendur m.a., at “Borgerrepræsentationen yder diæter, erstatning for dokumenteret arbejdsfortjeneste og udgiftsgodtgørelse efter reglerne i § 16 a i lov om kommunernes styrelse til Ældrerådets medlemmer. Ældrerådets
medlemmer kan modtage diæter for deltagelse i ældrerådsmøder, i forretningsudvalgsmøder og i Ældrerådets fagudvalgsmøder. Borgerrepræsentationin fastsætter årligt med vedtagelsen af komunens budget det beløb, som maksimalt må udbetales til diæter m.v. i henhold til § 16 a i lov om kommunernes styrelse.”

Omanfyri nevnda § 16 a í donsku kommunustjórnarlógini er soljóðandi: Der ydes et fast vederlag til kommunalbestyrelsens medlemmer. Økonomi- og indenrigsministeren fastsætter nærmere regler om vedarlaget. Vederlaget omfatter medlemmernes a) deltagels i møder i kommunalbestyrelsen og dennes udvalg samt underudvalg,...”

Danska lógin um rættartrygd (Retssikkerhedsloven) § 31, stk 3 er soljóðandi: “Kommunalbestyrelsen yder diæter, erstatning for dokumenteret tabt arbejdsfortjeneste og udgiftsgodtgørelse efter reglerne i § 16 a i lov om kommunernes styrelse til ædrerådets medlemmer.”

Danska Velfærdsministeriet hevur í 2008 svarað fyrispurningi viðvíkjandi tulking av reglunum um diæter (allýsing: endurgjald latið sum skattafrí samsýning, ið skal dekka útreiðslur til kost, logi v.m., um ein er burtur frá arbeiði ella ferðast longri enn 4 tímar) í mun til limir í eldraráði vísandi til, at ráðið verður fatað sum "underudvalg" sambært omanfyri nevndu § 16 a.

Eitt nú vísandi til donsku lógina um rættartrygd omanfyri er niðurstøðan, at "I de tilfælde, hvor kommunalbestyrelsen har godkendt vedtægter for ældrerådet, hvoraf det fremgår, at ældrerådet organiseres i specifikke underudvalg, arbejdsgrupper mv., skal ældrerådsmedlemmerne have diæter mv. i forbindelse med møder i disse.
Ældrerådsmedlemmer er ikke berettigede til at modtage diæter for frivillig deltagelse i konferencer, kurser m.v.
Det afgørende for, om ældrerådsmedlemmers arbejde i underudvalg, deltagelse i konferencer o.a. berettiger til diæter, er således, hvorvidt aktiviteterne indgår som en del af den arbejdsfordeling for ældrerådets virke, som er pålagt og godkendt af kommunalbestyrelsen."

Hetta er í samsvari við verandi viðtøkur fyri eldraráðið hjá Tórshavnar kommunu. Tað er tí skeiv fatan, at limir í donskum eldraráðum fáa fundarpengar ella aðra samsýning útyvir skjalprógvaðar útreiðslur.

Eldraráðið hevur fund tvær ferðir um mánaðin, 5 limir eru í eldraráðnum. Er fundarvirksemi 10 mánaðir um árið, eru 20 fundir. Um eldraráðið skal vera fevnt av reglunum um fundarsamsýning (kr. 540 fyri fundir undir 3 tímar), so kemur hetta við støði í 20 fundum um árið at kosta kr. 54.000 samlað fyri allar limirnar, hetta svarar til 27% av játtanini til ráðið uppá kr. 200.000. Tað kunnu vera fleiri fundir og luttøkur á ráðstevnum.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og sosialdeildarleiðarin mæla til ikki at broyta viðtøkurnar í § 6, stk. 4.

**Trivnaðarnevndin 26. september 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum. Harumframt samtykt at taka viðtøkurnar upp til endurskoðan.

**Ískoyti:**
Forkvinnan ynskir málið á skrá.

**Trivnaðarnevndin 28. november 2016:** Samtykt at gera uppskot til viðtøkubroyting í § 6 við tí endamáli, at eldraráðslimunum verður veitt fundarsamsýning.

**Ískoyti:**
Við støði í omanfyri standandi samtykt er uppskot, at eldraráðnum verður veitt mánaðarlig samsýning svarandi til tað til eina og hvørja tíð galdandi gjald fyri fund undir 3 tímar, t.e. kr. 552. Um árið er talan um kr. 6.624 fyri hvønn eldraráðslimin. Fyri allar fimm eldrarráðslimirnar verður samlaði kostnaðurin fyri 12 mðr. kr. 33.120. Tað er konta 1315 ráð og nevndir, sum ber kostnaðin av virksemi eldraráðsins.

Ásetingarnar í § 6, stk. 4 í viðtøkunum fyri eldraráðið kunnu tí broytast til soljóðandi:

"Til limirnar í Eldraráðnum verður veitt mánaðarlig samsýning svarandi til tað til eina og hvørja tíð galdandi gjald fyri fund undir 3 tímar. Limirnir kunnu fáa endurgjald fyri skjalprógvaðar útreiðslur til ferðing til og frá fundum í Eldraráðnum".

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og heilsu- og umsorganarstjórin mæla til at taka undir við uppskotinum til viðtøkubroyting.

**Trivnaðarnevndin 6. desember 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 07. december 2016:** Samtykt at taka undir við trivnaðarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 15. desember 2016:** Einmælt samtykt.

<u>Broyting av viðtøkunum fyri Eldraráðið</u>
Halla Samuelsen, Bjørghild Djurhuus, Turið Horn og Bogi Andreasen, býráðslimir
hava í telduposti dagf. 27. nov. 2020 biðið um at fáa málið fyri Býráðið. Málið snýr seg um broyting í § 4, stk. 2 og í § 6, stk. 4 í viðtøkunum fyri Eldraráðið.
Teldupostur frá Eldraráðnum frá 25. nov. 2020 við umbøn um broytingar eru viðlagdur.
§ 4 , stk. 2 er soljóðandi:

Varalimirnir kunnu eisini møta á fundunum hjá Eldraráðnum, men hava ikki atkvøðurætt.

**Við broytingini verður § 4, stk. 2 soljóðandi:**
§4, stk 2: Varalimir kunnu eftir áheitan møta á fundunum hjá Eldraráðnum, men hava ikki atkvøðurætt
§ 6, stk. 4 er soljóðandi:
Til limirnar í Eldraráðnum verður veitt mánaðarlig samsýning svarandi til tað til eina og hvørja tíð galdandi gjald fyri fund undir 3 tímar. Limirnir kunnu fáa endurgjald fyri skjalprógvaðar útreiðslur til ferðing til og frá fundum í Eldraráðnum

**Við broytingini verður § 6, stk. 4 soljóðandi:**
Til limirnar í Eldraráðnum verður veitt mánaðarlig samsýning svarandi til tað til eina og hvørja tíð galdandi gjald fyri fund undir 3 tímar. Limirnir kunnu fáa endurgjald fyri skjalprógvaðar útreiðslur til ferðing til og frá fundum í Eldraráðnum.
Til varalim verður veitt samsýning, tá hann møtir eftir áheitan.

**Viðmerkingar til broytingarnar:**
Til § 4, stk. 2 Orsøkin til, at Eldraráðið ynskir broytingarnar, er eitt ynski um betri arbeiðsgongd í Eldraráðnum.

Til § 6, stk. 4 Varalimur fær fundarboð, tá ið limur berst frá at møta, harumframt kann varalimur verða kallaður til fundar, tá tørvur er á hansara førleikum.
Tá varalimur møtir vegna forfall hjá nevndarlimi hevur hann atkvøðurætt.
Fyrstvaldi varalimur verður boðin til fundar, tá forfall er hjá nevndarlimi. Um fyrstvaldi berst frá at møta, verður næstvaldi varalimur boðin at møta o.s.fr.
Tá varalimur møtir vegna førleika, hevur hann ikki atkvøðurætt.
Uttan mun til um varalimur møtir vegna forfall ella vegna førleika, verður fundarsamsýning veitt fyri ein mánaðarligan fund.

| Verandi tekstur | Nýggjur tekstur | viðmerkingar |
|---|---|---|

| | | |
|---|---|---|
| **§ 4 , stk. 2** er soljóðandi: Varalimirnir kunnu eisini møta á fundunum hjá Eldraráðnum, men hava ikki atkvøðurætt. | §4, stk 2: Varalimir kunnu eftir áheitan møta á fundunum hjá Eldraráðnum, men hava ikki atkvøðurætt | Orsøkin til, at Eldraráðið ynskir broytingarnar, er eitt ynski um betri arbeiðsgongd í Eldraráðnum.<br>Vanligt er, at varalimur møtir, tá fastur limur hevur forfall. |
| **§ 6, stk. 4** er soljóðandi: Til limirnar í Eldraráðnum verður veitt mánaðarlig samsýning svarandi til tað til eina og hvørja tíð galdandi gjald fyri fund undir 3 tímar. Limirnir kunnu fáa endurgjald fyri skjalprógvaðar útreiðslur til ferðing til og frá fundum í Eldraráðnum | Til limirnar í Eldraráðnum verður veitt mánaðarlig samsýning svarandi til tað til eina og hvørja tíð galdandi gjald fyri fund undir 3 tímar. Limirnir kunnu fáa endurgjald fyri skjalprógvaðar útreiðslur til ferðing til og frá fundum í Eldraráðnum.<br>Til varalim verður veitt samsýning, tá hann møtir eftir áheitan. | Varalimur fær fundarboð, tá ið limur berst frá at møta, harumframt kann varalimur verða kallaður til fundar, tá tørvur er á førleikum hjá viðkomandi varalimi.<br><br>Tá varalimur møtir vegna forfall hjá nevndarlimi hevur hann atkvøðurætt.<br><br>Fyrstvaldi varalimur verður boðin til fundar, tá forfall er hjá nevndarlimi. Um fyrstvaldi berst frá at møta, verður næstvaldi varalimur boðin at møta o.s.fr.<br><br>Tá varalimur møtir vegna førleika, hevur hann ikki atkvøðurætt.<br><br>Uttan mun til um varalimur møtir vegna forfall ella vegna førleika, verður fundarsamsýning veitt fyri ein mánaðarligan fund. |

**Tilmæli:**
Halla Samuelsen, Bjørghild Djurhuus, Turið Horn og Bogi Andreasen, býráðslimir mæla Býráðnum til at taka undir við broytingum til § 4, stk. 2 og § 6, stk. 4.

**Býráðsfundur 17. desember 2020:** Samtykt við 12 atkvøðum fyri, ongari ímóti og 1 blankari.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrin Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Bogi Andreaen, Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson, Bjørghild Djurhuus. Helena Dam á Neystabø, Halla Samuelsen og Annfinn Brekkstein.

Blankt atkvøddi: Bergun Kass.

**Ískoyti:**
Mett er neyðugt at gera broytingar í viðtøkunum fyri Eldraráðið, tí við verandi viðtøkum hevur víst seg, at tað kann vera trupult at manna Eldraráðið, og at valhátturin er stirvin og avmarkandi.

Eldraráðið hevur fleiri ferðir heitt á umsitingina um at fáa í lag, at broyta samansetingina av Eldraráðnum, soleiðis at valdir verða 5 limir umframt 2 varalimir.

Á fundi í mars 2023 hevur Eldraráðið tó sett spurning við, um tað er skilagott at minka talið av varalimum til 2, tí í hesum valskeiðinum hevur ein limur meldað seg út, og aðrir limir hava ikki kunnað møtt orsakað

av heilsustøðuni. Eldraráðið hevur tó ikki sent nýggja ella aðra umbøn viðvíkjandi samanseting av Eldraráðnum.

Ein limur hevur í hesari setanini melda seg úr eldraráðinum og varalimur er komin í ráðið fyri viðkomandi.

Tað vísir seg vera trupult at fáa nógv fólk at stilla upp til eldraráðið. Tá seinast var boðað frá vali til Eldraráðið, var Tórshavnar kommuna noydd at søkja eftir valevnum av nýggjum, tí talið av teimum sum stillaðu upp var undir 10, tá freistin var av. Nýggj freist var sett, men endaliga úrslitið var, at einans 11 fólk stillaðu upp.

Umsitingin, eins og ráðið setur spurning við um 2 varalimir er ov lítið og umsitingin metir at hóskandi tal av varalimum er 3.

§ 4 Eldraráðsins samanseting verður sostatt broytt:

| Verandi áseting | Eftir broyting |
|---|---|
| Valdir verða 5 limir og 5 varalimir til Eldraráðið | Valdir verða 5 limir og 3 varalimir til Eldraráðið |

**Broytan av valhátti**

Smb. §5 stk. 5 í viðtøkunum hjá Eldraráðnum er ásett, at: *"Valið skal fara fram við brævatkvøðu".*
Mett verður at í dag eru aðrir møguleikar, sum kunnu gera valið smiðligari fyri allar partar.
H&U fyrisitingin hevur verið í samskifti við Eldraráðið um møguleikan at hava partvíst talgilt væl, og vóru tey avgjørt sinnaði at royna aðrar møguleikar, og eru spent at royna talgilt val.

**Tøkniliga loysnin**
Sambært Talgildu Føroyum ber til at menna eina sjálvgreiðslu á Vanganum, sum bara sæst hjá teimum, ið hava valrætt. Hesir borgarar kunnu eisini fáa boð frá kalendaraskipanini hjá Vanganum, um nær seinasta freist at velja er, eins og til ber at senda eina áminning.
Teir borgarar, sum hava veitt øðrum fulltrú teirra vegna, hava møguleikan at fáa hesi at hjálpa sær við at velja talgilt.

Skipanin tryggjar at valið fer fram í trúnaði, soleiðis at ikki ber til at knýta veljaran til atkvøðuna. Hetta er sama tøkni, sum var nýtt til Fólkaheilsukanningina, sum var framd í 2023.

Tey sum ikki meta seg føran at velja talgilt, hava møguleikan velja í Snarskivuna. Um veljarin ikki er førur fyri at koma Snarskivuna, ber til at atkvøða við brævatkvøðu.

**Kostnaðarmeting**
Kostnaðarmetingin av einum talgildum valið er kr. 150.000. Ein partur av hesum er ein eingangsútreiðsla, tí skipanin skal mennast. Framyvir kann loysnin eisini nýtast til eitt nú borgarakanningar.

Við talið á veljarum og tí valluttøku, sum plagar at vera, vil metti kostnaður fyri Eldraráðsvalið 2024 verið millum 200.000 - 220.000kr, um bert skal veljast við brævkvøðu.

Fyri at hava møguleika at nýta aðrar valhættir, krevst broyting í viðtøkunum fyri Eldraráðið og fyri viðtøkur fyri val av eldraráðið.

Sambært §8 stk 2, er ásett, at Býráðið kann koma við uppskoti til broytingar í viðtøkunum. Í stk 3 stendur: *"Broytingarnar í viðtøkunum koma í gildi, tá tær eru samtyktar í Býráðnum."*

§5 Val til Eldraráðið

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>30. mai 2024 | Blað nr.: 531<br><br>Formansins merki: |

| Verandi áseting | Eftir broyting |
|---|---|
| Stk 5. Valið skal fara fram við brævatkvøðu | Valnevndin skipar fyri valinum, og tekur støðu til, hvussu valið fer fram |

**Tilmæli:**
Heilsu- og umsorganarstjórin og fulltrúi í H&U umsitingini mæla býráðnum til, umvegis Heilsu- og eldranevndina, at taka undir við tilmælinum um at minka talið av varalimum úr 5 til 3 við virkna frá komandi valskeiðið.

Somuleiðis at taka undir við, at valnevndin ger av, hvussu val til Eldraráð fer fram.

**Heilsu- og eldranevndin 14. mai 2024:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 30. mai 2024:** Einmælt samtykt.

| Býráðsfundur<br>30. mai 2024 | Blað nr.: 532<br><br>Formansins merki: |
|---|---|

# 124/24 Val av valnevnd til eldraráðsvalið 2024

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 30.05.2024 | 124/24 | 24/02901-1 |

**Upprunin til málið**

**Lýsing av málinum**
Sambært viðtøkunum fyri eldraráðið í Tórshavnar kommunu skal val verða 4. hvørt ár ta fyrstu vikuna í oktober. Eldraráðsvalið verður skipað sambært reglugerð fyri eldráðsval.

Seinast val var til eldraráðið var í 2020. Sostatt skal tað sambært viðtøkunum vera val til eldraráðið í heyst.

Sambært reglugerð um eldraráðsval § 3 verður valið fyrireikað og fyriskipað av eini valnevnd, sum er sett av býráðnum. Valnevndin situr sama tíðarskeið sum býráðið.

Valnevndin skal áseta valdag og seinastu freist at lata valevnisfráboðan inn.

Undanfarin val er tað avvarandi faknevnd íð hevur verið valnevnd. Avvarandi faknevnd er heilsu- og eldranevndin.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og heilsu- og umsorganarstjórin mæla býráðnum til at taka undir við at eldra- og heilsunevndin verður valnevnd til eldraráðsvalið 2024.

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>30. mai 2024 | Blað nr.: 533 |
| | Formansins merki: |

**Býráðsfundur 30. mai 2024:** Einmælt samtykt.

| | | |
|---|---|---|
| | **Býráðsfundur**<br>30. mai 2024 | Blað nr.: 534<br><br>Formansins merki: |

# 125/24 Makaskifti við matr. nr. 1300a og Tórshavnar kommunu

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 13.05.2024 | 91/24 | 23/01151-5 |
| 2 Fíggjarnevndin | 22.05.2024 | 133/24 | 23/01151-5 |
| 3 Býráðsfundur | 30.05.2024 | 125/24 | 23/01151-5 |

**Upprunin til málið**
Eigarin av matr.nr. 1300a, Tórshavn, søkti um at sundurbýta sína ogn. Málið varð lagt fyri nevnd, sum samtykti ikki at ganga umsóknini á møti, grundað á fornminni sum liggur á økinum.

Nú søkir eigarin um at gera gerðabýti við kommununa.

**Lýsing av málinum**
Umsøkjarin ynskir at gera gerðabýti við kommununa, soleiðis at kommunan fær 293,6 $m^2$ av matr.nr. 1300a, tað er økið har fornminni stendur, og kommunan letur 293,6 $m^2$ burtur av matr.nr. 727d, sum er fríøki millum býlingarnar.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Ognirnar liggja í umráðispartinum A1 í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu.

Lendið, sum kommunan letur, er umfatað av serstøku byggisamtyktini nr. 3, har tað liggur í umráðispartinum A, sum er til sethúsabygging.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Á matr.nr. 1300a er skrásett eitt krígsminni, Antiluftskyts. Víst verður til kortskjal »22/01471-8 Krígsminni 1300a«

Tjóðsavnið er komið við eini greiðari frágreiðing um krígsminnið. Krígsminnið er ein kanónstøð og einasta av hesum slag av teimum fýra, ið vóru bygdar í 1942 og virkaðu til 1944, ið er varðveitt í Tórshavn.

Í dag er kanónstøðin á ein hátt vard, tí hon liggur í einum garði/hava, har eigari ger brúk av goymslurúmunum, ið upprunaliga vóru bygd til lóðurgoymslu og skýli hjá hermonnum.
Víst verður til skjal »22/01471-13 Úrdráttur úr Bretskar støðir í Føroyum under seinni heimsbardaga í strategiskum høpið. Jon S. Hansen. Masteruppgáva. 2-12-2019.pdf«

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Fyrra umsóknin um sundurbýti, okkara jnr. 22/01471-14, varð ikki gingin á møti grundað á fornminni, sum liggur á økinum.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Onki

**Skjøl**

| | |
|---|---|
| 23/01151-4 | Uppskot til gerðabýti og sundurbýti av matr. nr. 1300a, Tórshavn |
| 22/01471-13 | Úrdráttur úr Bretskar støðir í Føroyum under seinni heimsbardaga í strategiskum høpi. Jon S. Hansen. Masteruppgáva. 2-12-2019.pdf |

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| Býráðsfundur<br>30. mai 2024 | Blað nr.: 535 |
|---|---|
| | Formansins merki: |

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á byggimálsdeildini mæla til at ganga umsóknini á møti, treytað av at Søvn landsins geva sítt viðmæli, og at beina málið í fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 13. mai 2024:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 22. mai 2024:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 30. mai 2024:** Einmælt samtykt.

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>30. mai 2024 | Blað nr.: 536 |
| | Formansins merki: |

## 126/24 Útstykking á Kongavarða til grundstykkir á matr. nr. 255a, Argir

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 28.11.2014 | 73/14 | 14/05161-3 |
| 2 Byggi- og býarskipanarnevndin | 27.02.2015 | 41/15 | 14/05161-3 |
| 3 Fíggjarnevndin | 11.03.2015 | 57/15 | 14/05161-3 |
| 4 Byggi- og býarskipanarnevndin | 27.03.2015 | 97/15 | 14/05161-3 |
| 5 Fíggjarnevndin | 22.04.2015 | 92/15 | 14/05161-3 |
| 6 Byggi- og býarskipanarnevndin | 02.10.2015 | 190/15 | 14/05161-3 |
| 7 Tekniska nevnd | 04.11.2015 | 133/15 | 14/05161-3 |
| 8 Fíggjarnevndin | 11.11.2015 | 279/15 | 14/05161-3 |
| 9 Byggi- og býarskipanarnevndin | 16.02.2016 | 55/16 | 14/05161-3 |
| 10 Fíggjarnevndin | 17.02.2016 | 63/16 | 14/05161-3 |
| 11 Býráðsfundur | 25.02.2016 | 61/16 | 14/05161-3 |
| 12 Byggi- og býarskipanarnevndin | 16.03.2016 | 79/16 | 14/05161-3 |
| 13 Fíggjarnevndin | 17.03.2016 | 119/16 | 14/05161-3 |
| 14 Býráðsfundur | 17.03.2016 | 91/16 | 14/05161-3 |
| 15 Byggi- og býarskipanarnevndin | 07.06.2016 | 166/16 | 14/05161-3 |
| 16 Fíggjarnevndin | 08.06.2016 | 217/16 | 14/05161-3 |
| 17 Býráðsfundur | 16.06.2016 | 175/16 | 14/05161-3 |
| 18 Byggi- og býarskipanarnevndin | 22.09.2016 | 220/16 | 14/05161-3 |
| 19 Fíggjarnevndin | 19.10.2016 | 324/16 | 14/05161-3 |
| 20 Býráðsfundur | 27.10.2016 | 256/16 | 14/05161-3 |
| 21 Byggi- og býarskipanarnevndin | 27.11.2023 | 193/23 | 14/05161-3 |
| 22 Byggi- og býarskipanarnevndin | 08.04.2024 | 69/24 | 14/05161-3 |
| 23 Tekniska nevnd | 22.04.2024 | 36/24 | 14/05161-3 |
| 24 Fíggjarnevndin | 23.04.2024 | 118/24 | 14/05161-3 |
| 25 Býráðsfundur | 24.04.2024 | 93/24 | 14/05161-3 |
| 26 Býráðsfundur | 30.05.2024 | 126/24 | 14/05161-3 |

**Málslýsing**:
Tórshavnar kommuna hevur keypt ognina undir Kongavarða, matr. nr. 255a, Argir, frá Valbjørn Dalsgarð.

Sambært uppruna ætlanini fyri Kongavarða skuldi ovasti parturin av økinum nýtast til raðhúsabygging, men kommunan hevur ætlanir at útstykkja økið til sethúsagrundstykkir.

Neyðugt er at gera skipanarætlan fyri alt økið.

**Tilmæli**:
Tekniski stjórin mælir til, at nevndin heimilar umsitingini:

- at umsitingin, saman við ráðgeva, ger eitt skipanaruppskot fyri alt økið, sum umfatar byggiøki, felags- og fríøkir, atkomuviðurskifti, vegir og gøtur v.m. og at gera eina fyribils kostnaðarmeting.
- at arbeiði, sum er mett at kosta kr. 100.000, í fyrsta umfari verður fíggjað av serkønari hjálp á teknisku fyrisitingini 1313.

- At skipanaruppskotið verður at leggja fyri nevndina aftur.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 28. november 2014:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Býarskipanardeildin hevur gjørt eitt skipanaruppskot fyri fyri ognina undir Kongavarða. Eftir uppskotinum er pláss til 30 raðhús, 4 íbúðarhús og 50 grundstykkir til sethús.Fyri at náa einum talið uppá 50 grundøkir til sethús, er tó neyðugt at gera eitt makaskifti uppá uml. 1500 $m^2$ við Búnaðarstovuna, soleiðis at teir fáa uml. 1500 $m^2$ burtur av matr. nr. 255a fyri uml. 1500 $m^2$ av matr. nr. 4a Kirkjubøhagi Fyri Handan, Poul Müller festari.

Atkomuvegurin niðan til tey 50 sethúsagrundstykkini er uml. 375 m, max hall er 120 promillu. Hesin vegurin er mettur at kosta uml. 6,5 milliónir. Hesin vegurin kann verða atkoma til fleiri grundstykkir, um kommunan fær ognað sær meira lendi burtur av matr. nr. 4a.

Grundstykkini eru uml. 400 $m^2$ til støddar.

Tað ber ikki til at gera eina kostnaðarmeting út frá verandi tilfari.

**Tilmæli**:
Tekniski stjórin mælir til at taka undir við skipanaruppskotinum, at abeiða víðari við at gera eina kostnaðarmeting og løgdeildin tekur samráðingar upp við Búnaðarstovuna um makaskiftið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 27. februar 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at beina málið í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevnd 11. marts 2015:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur arbeitt víðari við skipanaruppskotinum og gjørt tilhoyrandi kostnaðarmeting. Fyri at minka um hallið á býlingsvegnum, eru smávegis broytingar gjørdar í ætlanini. Fyri at fáa so gott útsýni sum møguligt frá hvørjum grundstykki sær, verður arbeitt við fastløgdum planeringskotum . Sí skjal nr. 4 og 5.

1. Býlingsvegur til 4 íbúðarblokkar og p-pláss til 24 íbúðir. Býlingsvegurin er 200 m langur og pláss er fyri 2 bilum til hvørja íbúð.
2. Býlingsvegur til útstykking við 50 grundstykkjum. Býlingsvegurin er umleið 345 m langur, og gongubreyt er uttarumegin vegin. Partar av vegnum krevja nógv fyrireikandi lendisarbeiði. Hægsta veghall er umleið 120 promilli.
3. Sethúsavegur við 50 grundstykkjum. Vegurin er 490 m langur, 9 m breiður, og 1,5 m breið gongubreyt er báðumegin. Hægsta veghall er umleið 100 promilli.

Viðheft er kostnaðarmeting við mettum kostnaði á
Skjal nr. 1. Býlingsvegi til íbúðarblokkarnar
Skjal nr. 2. Útstykking undir Kongavarða
Skjal nr. 3. Býlingsvegi til útstykkingina undir Kongavarða
Viðheft er eisini
Skjal nr. 4. Útstykking og atkomuvegur.

Skjal nr. 5. Útsýni

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin mælir til at seta í gongd projektering av projektuppskoti við kostnaðarmeting og tíðarætlan fyri nummar 2. Býlingsveg til útstykkking, og nummar 3. Sethúsaveg við 50 grundstykkjum, at uppskot til serstaka byggisamtykt verður gjørt, at leggja fyri nevndina aftur og at beina málið í teknisku nevnd.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 27. mars 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at beina málið í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevnd 22. april 2015:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini.

**Ískoyti:**
LBF hevur gjørt útbjóðingartilfar til útstykkingina við 48 grundstykkjum. Afturat uppruna uppskotinum er gjørt 2 felags parkeringspláss í útstykkingini og gongubreyt og súkklubreyt báðu megin atkomuvegin. Projektið er granskað og góðkent við smávegis broytingum.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at bjóða útstykkingina út í almennari lisitatión og at innkomnu boðini verða løgd fyri byggi- og býarskipanarnevndina skjótast gjørligt.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 02. oktober 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum, men at bjóða arbeiðið út í innbodnari lisitatión.

**Ískoyti:**
Tekniska nevndin skal taka støðu til vegaføringina og teknisku veitingarnar í sambandi við útstykkingarætlanina.

**Tekniska nevnd 04. november 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum hjá býararkitektinum og tekniska stjóranum til fundin í byggi- og býarskipanarnevndini 2. oktober 2015. Nevndin hevur tó hesar viðmerkingar:

- Býlingsvegur til íbúðarblokkarnar (skjal 1) skal hava gongubreyt á báðum síðum.
- Útstykking undir Kongavarða (skjal 2) – vegurin skal hava gongu- og súkklubreyt á báðum síðum.
- Býlingsvegur til útstykkingina undir Kongavarða (skjal 3) – skal hava gongubreyt á báðum síðum.

Nevndin tekur ikki støðu til útbjóðingarhátt.

**Ískoyti:**
Fíggjarnevndin skal taka støðu til samtyktina hjá Byggi- og býarskiparnevndini 02. oktober 2015 og samtyktina hjá Teknisku nevnd 04. november 2015.

**Fíggjarnevndin 11. november 2015:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og teknisku nevnd.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur, samsvarandi samtykt byggi- og býarskipanarnevndarinnar tann 2. oktober 2015 og eftirfylgjandi býráðsnevndarsamtyktum, boðið arbeiðið at gera atkomuvegin og útstykkingina út í innbodnari lisitatión.

Inn komu fylgjandi tilboð og tilboðsupphæddir:

| | |
|---|---|
| Sp/f TG Verk: | kr. 25.966.157,-. |
| P/f Articon: | kr. 16.644.779,-. |
| P/f J. & K. Petersen: | kr. 19.619.450,-. |

Ráðgevi kommununnar hevur eftirkannað tilboðini og mælir til at taka av tilboðnum frá P/f Articon.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býararkitekturin og býarverkfrøðingurin mæla til at taka av tilboðnum frá P/f Articon og heimila umsitingini at samráðast við P/f Articon um sáttmála um arbeiðið, at leggja fyri nevndina aftur saman við samlaðari kostnaðarmeting av arbeiðinum.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 16. februar 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 17. februar 2016:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 25. februar 2016:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur latið gera samlaða kostnaðarmeting, við støði í uppskoti til sáttmála við P/F Articon (sí j. nr. 14/05161-73), har prosjektering, forkanningar, byggileiðsla, fakeftilit, fyrisiting, óvæntað og MVG v.m. er íroknað.

Við grundarlag í nevnda sáttmálauppskoti við P/f Articon metir umsitingin, at útstykkingararbeiðið kann gerast fyri kr. 26.284.793,- tá allar útreiðslur eru íroknaðar (sí j. nr. 14/05161-72) har væntað verður, at helvtin av upphæddini fellur til gjaldingar í 2016.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býararktekturin og býarverkfrøðingurin mæla til, at góðkenna uppskotið til sáttmála og játta kr. 26.284.793,- til gerð av útstykkingini.
Mælt verður til at helvtin av játtaðu upphæddini 13 mió. verður fíggjað við ávegisgjøldum í sambandi við sølu av grundøkjum í 2016 og restfíggingin verður tikin upp við endaliga áseting av søluprísi og íløguætlan kommununnar í 2016 og 2017.
Eisini verur mælt til at heimila umsitingini at útvega prosjekt og tilboð uppá at planera grundøkini.
Málið verður beint í fíggjarnevndina og býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 16. mars 2016:** Samtykt at góðkenna uppskotið til sáttmála og at játta kr. 21.554.795,- til gerð av útstykkingini. Eisini verður mælt til at heimila umsitingini at útvega projekt og tilboð uppá at planera grundstykkini.
Málið verður beint í figgjarnevndina og býráðið.

**Fíggjarnevndin 17. marts 2016:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og játta kr. 21.554.795 av konto 6475, ið verður fíggjað við gjøldum í sambandi við sølu av grundøkjum í 2016. Málið beint í býráðið.

**Býráðsfundur 17. mars 2016:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
P/F Articon hevur eftir áheitan latið kommununi tilboð uppá at planera grundøkini, sum koma at liggja fram við útstykkingarvegnum, við skitsum frá býarskipanardeild kommununnar sum fyrimynd.
Tilboðið frá P/F Articon i hevur støði í tekningum, nøgdarútrokningum, metingum v.m. sum P/F Articon sjálvi hava útvegað. Umsitingin hevur ikki havt umstøður at eftirkanna nøgdir o.a. og má tí endaligi kostnaðurin takast við fyrivarni um, at nøgdirnar sum P/F Articon hevur roknað seg fram til, eru røttu og endaligu nøgdirnar sum eru, tá arbeiðið er liðugt.

Tilboðið frá P/F Articon (sí j. nr. 14/05161-89) fyri at planera tey 48 grundøkini er uppá kr. 4.952.255,- uttan MVG.

Umsitingin hevur latið gera samlaða kostnaðarmeting, við støði í tilboðnum frá P/F Articon, har trygging, byggileiðsla, fakeftilit, fyrisiting, óvæntað og MVG v.m. er íroknað.

Við grundarlag í nevnda tilboði frá P/f Articon metir umsitingin, at arbeiðið at planera grundøkini kann gerast fyri kr. 6.473.816,-, tá allar útreiðslur eru íroknaðar (sí j. nr. 14/05161-88), har væntað verður, at helvtin av upphæddini fellur til gjaldingar í 2016.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararktekturin mæla til at heimilað verður umsitingini at gera sáttmála við P/F Articon um planering av gundøkjunum, við støði í tilboði teirra og innanfyri samlaða fíggjarkarm á kr. 6.473.816,- og at játtaðar verða nevndu kr. 6.473.816,- til arbeiðið.
Mælt verður til at helvtin av játtaðu upphæddini 3,2 mió. verður fíggjað við ávegisgjøldum í sambandi við sølu av grundøkjum í 2016 og restfíggingin verður tikin upp við endaliga áseting av søluprísi og íløguætlan kommununnar í 2016 og 2017.
Eisini verur mælt til at málið verður beint í fíggjarnevndina og býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 07. juni 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 08. juni 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 16. juni 2016:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Eftirspurningurin eftir grundstykkjum hevur víst seg at vera størri enn tey 48 stykkini, sum verandi útstykking, sum er í gerð Undir Kongavarða, kann nøkta.

Fyrisiting kommununnar hevur tí fyrireika ávegis uppskot til framhald av útstykkingini vestureftir við umleið 45 grundstykkjum omanfyri verandi bygging Undir Kongavarða, við íbinding í verandi atkomuvegi í gerð (sí j.nr. 14/05161-96).

Fyrisitingin hevur somuleiðis fyrireika sáttmála við ráðgeva um prosjektuppskot og høvuðsprosjekt fyri kr. 275.000,- í sambandi við framhald av útstykkingini.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at játtaðar verða kr. 275.000,- til at prosjektera framhald av útstykkingini Undir Kongavarða, fíggjað við ávegisgjøldum í sambandi við sølu av grundøkjum í 2016, og restfíggingin verður tikin upp við endaliga áseting av søluprísi og íløguætlan kommununnar í 2016 og 2017, og at málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 22. september 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 19. oktober 2016:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 27. oktober 2016:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti**
Sáttmáli um útstykkingararbeiðið varð gjørdur við Pf Articon tann 2. mai 2015.
Útstykkingararbeiðið gekk væl, og varð útstykkingin handað kommununi tann 21. juni 2017.
L64008 Útstykking á Kongavarða til grundstykkir hevur eitt avlop á kr. 3.809.000.

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja**
**Játtan:**

Vanlig játtan ☐

Eyka játtan ☐

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>30. mai 2024 | Blað nr.: 541 |
| | Formansins merki: |

Loka verkætlan ☒

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| 6475 | L64008 | Útstykking á Kongavarða til grundstykkir | 6475 | L00002 | Framfluttur løgukarmur, ógreinað | | 3.809.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli**
Tekniski stjórin, býararkitekturin og býarverkfrøðingurin mæla til:

- at avlopið av verkætlanini L64008 Útstykking á Kongavarða til grundstykkir á kr. 3.809.000 verður flutt til L00002 løgukarmur fyri Byggibúning til bústaðir, og at verkætlanin L64008 verður lokað, at málið verður beint í býráðið umvegis teknisku nevnd og fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 27. november 2023:** Útsett.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 08. apríl 2024:** Samtykt at taka undir við tilmælinum, men at avlopið verður flutt á konto 8112 Asfalt.

**Ískoyti**
Við avgerðini hjá Byggi- og býarskipanarnevsnini frá 8. apríl 2024, har samtykt er, at verkætlanin verður lokað, og avlopið flutt á konto 8112 Asfalt, er talan um eykajáttan, sambært játtanarreglunum. Slík mál krevja tvær viðgerðir í býráðnum.

**Tekniska nevnd 22. apríl 2024:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 23. apríl 2024:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og teknisku nevnd og beina málið í býráðið sum eykajáttanarmál, ið tørvar tvær viðgerðir.

**Býráðsfundur 24. apríl 2024:** Einmælt samtykt við fyrstu viðgerð og beint víðari til aðru viðgerð.

**Býráðsfundur 30. mai 2024:** Einmælt samtykt við aðru viðgerð.

| | Býráðsfundur<br>30. mai 2024 | Blað nr.: 542<br><br>Formansins merki: |
|---|---|---|

# 127/24 Fleiri koyritímar til bussleiðina

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 13.02.2024 | 9/24 | 24/00552-1 |
| 2 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 12.03.2024 | 11/24 | 24/00552-1 |
| 3 Tekniska nevnd | 22.04.2024 | 37/24 | 24/00552-1 |
| 4 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 22.04.2024 | 21/24 | 24/00552-1 |
| 5 Fíggjarnevndin | 23.04.2024 | 116/24 | 24/00552-1 |
| 6 Býráðsfundur | 24.04.2024 | 96/24 | 24/00552-1 |
| 7 Býráðsfundur | 30.05.2024 | 127/24 | 24/00552-1 |

**Upprunin til málið**
Í umhvørvispolitikkinum hjá Tórshavnar kommunu, Grøna Leiðin, er samtykt, at arbeitt verður fram ímóti eini grønari kommunu. Bussleiðin er ein týðandi liður í arbeiðinum hjá Tórshavnar kommunu at minka um $CO_2$-útlátið og ovurstóru ferðsluna, sum er í Tórshavnar kommunu. Endamálið við ókeypis bussleiðini, ella eini bussleið uttan ferðaseðlar, er at økja um nýtsluna av bussunum og samstundis flyta fólk frá bilinum yvir í kollektivu ferðsluna.

**Lýsing av málinum**
Fleiri fólk brúka dagliga bussleiðina í Tórshavnar kommunu, og bussleiðin er í dag hjá mongum eitt alternativ til egnan bil. Bussleiðirnar eru ymiskar alt eftir fólkagrundarlagnum, men t.d. leið 1, sum koyrir millum Argir og Hoyvík gjøgnum Steinatún, koyrir upp til 4 ferðir um tíman gerandisdagar kl 07-16. Leið 1 er eisini tann mest brúkta farleiðin. Bussleiðin hóskar væl til dagliga ferðing hjá skúlabørnum og øllum, sum hava ørindi í dagtímunum, og er eisini væl egnað hjá teimum, sum búgva nakrar kilometrar frá arbeiðsplássinum.

Fyri at enn fleiri skulu nýta buss, er neyðugt, at bussleiðin verður útbygd við fleiri túrum eftir vanliga arbeiðstíð, um kvøldið og í vikuskiftinum. Fyri tann einstaka hevur tað týdning, at bussur er sambærligur við egnan bil, og gerst hann tað, fara fleiri at velja at brúka buss.

Fleiri broytingar eru seinastu árini gjørdar í bussleiðini. Í 2008 gjørdist tað ókeypis at nýta buss, í 2011 øktist túratali og í 2019 øktist túratalið uppaftur og bussarnir fóru aftur at koyra bæði leygardag og sunnudag í Havn. Í 2023 komu tveir elbussar uppí busshópin.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |

| | | |
|---|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>30. mai 2024 | Blað nr.: 543 | |
| | Formansins merki: | |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

## Játtan:

Vanlig játtan ☐
Eyka játtan ☒
Loka verkætlan ☐

| **Játtast av:** | | | **Játtast á:** | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| 6177 | | Umsiting og røkt av byningum, Orkuátøk | 7510 | | Bussleiðin | | 2.000.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin mælir til:

- at flyta kr. 2 mió. av kontu nr. 6177 Umsiting og røkt av bygningum, Orkuátøk, inn á kontu 7510, Bussleiðin.
- at beina málið í fíggjarnevndina umvegis teknisku nevnd og síðani í býráðið til tvær viðgerðir.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 13. februar 2024:** Tikið av skrá.

**Ískoyti**
Skal bussleiðin veruliga gerast eitt val í mun til bilin, so má bussleiðin koyra fleiri túrar longur út á dagin, serliga um kvøldið og í vikuskiftinum, hetta er nakað, sum nógv fólk hava gjørt vart við, og tí verður skotið upp, at bussleiðin fær 2 mió. kr. eyka at koyra fyri restina av 2024.

Umsitingin hevur hugt eftir, hvar hesin peningurin kemur at gagna flest brúkarum av bussleiðini, har "flest fáa mest".

Leið 1, er tann nógv mest brúkta farleiðin hjá bussleiðini. Henda leiðin koyrir frá Hamaranum á Argjum, gjøgnum býin, niðan í Hoyvík og Inn á Gøtu, og út aftur til Hamaran. Leiðin koyrir framvið landssjúkrahúsinum, skúlum, kirkjum, samkomuhúsum og ítróttaøkjum. Tí er besta loysnin at seta fleiri eykatúrar inn á hesa leiðina, bæði gerandisdagar, leygardag og sunnudag.

Uppskotið er:

<u>Gerandisdagar: Mánadag til Fríggjadag</u>

Leið 1, sum byrjar á Hamaranum kl. 06:50, kemur nú at koyra ein túr longur út á dagin og endar kl. 17:36 ístaðin fyri kl. 16:36.
Sum nakað nýtt, kemur leið 1, sum byrjar at koyra kl. 07:35 av Hamrinum, at koyra til kl. 23.21. Tað vil siga, at 2 bussar koma at koyra á leið 1 um kvøldið, soleiðis at teir koyra hálva hvønn tíma.

Leið 2, sum byrjar av Norðasta Horni kl. 06:45, koyrir ein túr longur út á dagin og endar at koyra kl. 17:31, í staðin fyri sum nú kl. 16:31.

Leið 4, sum byrjar við Glasir kl. 07:50, koyrir eisini ein túr longur út á dagin og endar at koyra kl. 18:36, í staðin fyri sum nú kl. 17:36.

Leygardagar
Leið 1, sum byrjar kl. 10:05, kemur at byrja ein túr fyrr um morgunin kl.09:05, koyra ein túr longur um kvøldið og endar at koyra kl. 23:51, í staðin fyri sum nú kl. 22:51.
Sum nakað nýtt, kemur ein bussur afturat at koyra á leið 1 frá kl. 09:35 til kl. 23:21. Hetta merkir, at bussur koyrir tvær ferðir um tíman á leið 1 leygardag, í staðin fyri sum nú eina ferð um tíman.

Leið 2 koyrir ein túr longur um kvøldið og gevst kl. 23:51, í staðin fyri sum nú kl. 22:51

Leið 3 koyrir ein túr longur um kvøldið og gevst kl. 23:26, í staðin fyri sum nú kl. 22:26.

Sunnudag
Leið 1, leið 2 og leið 3 koyra allar 2 túrar longur út á kvøldið og enda ávíkavist kl. 20:51, kl. 20:51 og kl. 21:26, ístaðin fyri sum nú áleið kl. 19:00.

Samlaða tímatalið fyri omanfyri nevndu koyring er 2019 effektivir koyritímar, sum verða býttir soleiðis:

| **Ferðaætlan eykakoyring 2024:** | **Tímar** |
|---|---|
| Eykakoyring vanligar dagar - 1. april til 31 des. | 1242:00 |
| Eykakoyring leygardag - 1. apríl til 31 des. | 554:40 |
| Eykakoyring sunnudag - 1. apríl til 31 des. | 222:40 |
| Eykakoyring, tímar íalt: | 2019:20 |

Núverandi tímatakstur er 823,35 kr.u/mvg. Við núverandi uppskoti til eykakoyring, verður lagt upp fyri, at tímataksturin verður prístalsviðgjørdur 1. apríl 2024.

Við núverandi prísi gevur hetta íalt kr. 1.662.344, uttan mvg, afturat hesum koma mvg og prístalsregulering.

Viðmerkjast skal, at kostnaðurin omanfyri er fyri tíðarskeiðið 1. apríl - 31. desember 2024. Um hesar broytingar skulu halda fram í 2025, má rakstrarjáttanin á konto 7510, Bussleiðin, tillagast samsvarandi.

**Skjøl:**
24/00552-3 Uppskot til nýggja ferðaætlan frá 1. apríl 2024
24/00552-4 Núverandi ferðaætlan.pdf

**Tilmæli:**
Víst verður til tilmælið til fundin tann 13. februar 2024.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 12. mars 2024:** Samtykt at heita á teknisku nevnd um at taka málið upp og finna fígging.

**Ískoyti**
Hetta málið varð lagt fyri náttúru- og umhvørvisnevndina, men átti helst at verið byrjað í teknisku nevnd. Tí verður sama mál nú lagt fyri teknisku nevnd.

Harumframt er politiskt ynski um at skifta ein ella fleiri av verandi diesel-bussum út við ein ella fleiri nýggjar el-bussar. Í tí sambandi er neyðugt at taka upp samráðingar við HZ Bussar. Tá ið avtala hesum viðvíkjandi er komin uppá pláss, verður vent aftur um fígging.

Í sambandi við at innkomuvegurin verður liðugur 1. november 2024, skal bussleið skipast eftir innkomuvegnum og til Oyggjarvegin, og í tí sambandi skal verða heimilað HZ Bussum at gera uppskot til bussleið eftir hesum strekki. Hædd skal seinni takast fyri fígging til nýggju bussleiðina eftir Innkomuvegnum til Oyggjarvegin fyri mánaðirnar november og desember 2024.

**Tilmæli**
Teknisk stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til:
- at økt verður um túratalið hjá bussleiðini, sum lýst omanfyri,
- at hetta verður fíggjað við at flyta 2 mió kr. sum eykajáttan av kontu 6177, LK61705 Orkupolitikkur, á konto 7510,
- at heimila umsitingini at fara í samráðingar og at gera avtalu við HZ Bussar um at skifta ein ella fleiri dieselbussar út við ein ella fleiri el-bussar, og tá avtalan er komin uppá pláss at leggja málið aftur fyri teknisku nevnd í sambandi við fígging,
- at heimila HZ Bussum at gera uppskot til bussleið eftir innkomuvegnum og til Oyggjarvegin, og at støða seinni verður tikin til fígging fyri hesa leið fyri november og desember 2024,
- og at beina málið í býráðið til tvær viðgerðir umvegis náttúru- og umhvørvisnevndina og fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 22. apríl 2024:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 22. apríl 2024:** Ein meiriluti, Bjørg Dam og Súna Mørk, tekur undir við tilmælinum.

Annfinn Brekkstein atkvøður blankt.

**Fíggjarnevndin 23. apríl 2024:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson, Annika Olsen og Jákup Dam, tekur undir við teknisku nevnd og meirilutanum í náttúru- og umhvørvisnevndini og beinir málið í býráðið sum eykajáttanarmál, ið tørvar tvær viðgerðir.

Ein minniluti, Annfin Brekkstein, atkvøður blankt.

**Býráðsfundur 24. apríl 2024:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 30. mai 2024:** Fyrst varð atkvøtt um broytingaruppskotið frá Tjóðveldi, í er soljóðandi:

«Skotið verður upp at taka undir við tilmælinum, men at fíggingin verður funnin á rakstrinum á tekniska økinum».

5 atkvøður vóru fyri, 7 ímóti og 1 blank

Fyri atkvøddu Turið Horn, Jákup Dam, Gunvør Balle, Annika Olsen og Súsanna Olsen.

Ímóti atkvøddu Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Súna Mørk og Bjørg Dam.

Blankt atkvøddi Birgir Nielsen

Síðandi var atkvøtt um tilmæli frá fíggjarnevndini í var einmælt samtykt við aðru viðgerð.

| | | |
|---|---|---|
| | **Býráðsfundur**<br>30. mai 2024 | Blað nr.: 547<br><br>Formansins merki: |

# 128/24 Fríðkan av býnum, Kongaminni o.a.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 22.04.2024 | 86/24 | 24/02102-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 23.04.2024 | 110/24 | 24/02102-1 |
| 3 Býráðsfundur | 24.04.2024 | 90/24 | 24/02102-1 |
| 4 Býráðsfundur | 30.05.2024 | 128/24 | 24/02102-1 |

**Upprunin til málið**
Politiskt er ynski at uppraðfesta fríðkanina av býnum.

**Lýsing av málinum**
Tað eru fleiri økir í býnum, sum tørva ábøtur og dagføringar.

Sum dømi kann nevnast, at økið kring Kongaminnið er rættiliga illa farið, og treingir tað til dagføringar. Atkomuviðurskiftini eru sera vánalig, umframt at tað hevði gagnað økinum, at tað varð ljóssett, soleiðis at tað gjørdist meiri trygt og hugnaligt at vitja í myrku árstíðini.

Somuleiðis er ynski at planta fleiri trø í býnum, umframt at raðfesta aðra fríðkan av býnum.

Ynskiligt er tískil at seta fígging av til at raðfesta fríðkanina í býnum.

**Lógir, ásetingar o.a.**
-

**Upplýsingar frá umsitingini**
Játtanin til Fríðkan og viðlíkahald, Lendisliðið, kt. 6212, er sera sperd, og tískil røkkur hendan ikki til at dagføra og viðlíkahalda býin, sum við árunum er vaksin heilt nógv.

Játtanin til Fríðkan av býnum, kt. 6210, nýggj átøk, verður í stóran mun játtað út til ymisk átøk kring allan býin, eigarafeløg, bóltvallir osfr.

Skal miðbýurin uppraðfestast, so er neyðugt við eini eykajáttan til hesi átøk.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
-

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
-

**Skjøl**
-

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |

| | **Býráðsfundur**<br>30. mai 2024 | Blað nr.: 548 |
|---|---|---|
| | | Formansins merki: |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

## Játtan:

Vanlig játtan ☐
Eykajáttan ☒
Loka verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| 6175 | LK61027 | Dagføring kommunalir bygningar | 6210 | | Fríðkan og viðlíkahald | | 1.000.000 |
| 6275 | LK62996 | Miðbýarætlan | 6210 | | Fríðkan og viðlíkahald | | 2.000.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | 3.000.000 |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2024 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | 200.000 |

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til:
- at seta arbeiðið í verk at uppraðfesta miðbýin við endurbøting, planting og dagføringum av ymiskum økjum í býnum,
- at játtaðar verða kr. 1 mió. av kt. 6175, LK61027, Dagføring kommunalir bygningar á kt. 6210, Fríðkan og viðlíkahald,
- at játtaðar verða kr. 2 mió. av kt. 6275, LK62996, Miðbýarætlan á kt. 6210, Fríðkan og viðlíkahald
- at beina málið umvegis fíggjarnevndina til tvær viðgerðir í býráðnum.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 22. apríl 2024:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 23. apríl 2024:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið sum eykajáttanarmál, ið tørvar tvær viðgerðir.

**Býráðsfundur 24. apríl 2024:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 30. mai 2024:** Einmælt samtykt við aðru viðgerð.

# 129/24 Heildarætlan fyri Karlamagnusarbreyt

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 10.03.2020 | 13/20 | 20/00622-1 |
| 2 Byggi- og býarskipanarnevndin | 01.04.2020 | 61/20 | 20/00622-1 |
| 3 Tekniska nevnd | 09.06.2020 | 31/20 | 20/00622-1 |
| 4 Byggi- og býarskipanarnevndin | 10.06.2020 | 128/20 | 20/00622-1 |
| 5 Ferðslunevndin | 24.06.2020 | 16/20 | 20/00622-1 |
| 6 Byggi- og býarskipanarnevndin | 08.03.2021 | 42/21 | 20/00622-1 |
| 7 Tekniska nevnd | 08.03.2021 | 18/21 | 20/00622-1 |
| 8 Fíggjarnevndin | 17.03.2021 | 57/21 | 20/00622-1 |
| 9 Býráðsfundur | 25.03.2021 | 89/21 | 20/00622-1 |
| 10 Býráðsfundur | 29.04.2021 | 120/21 | 20/00622-1 |
| 11 Tekniska nevnd | 07.03.2022 | 19/22 | 20/00622-1 |
| 12 Fíggjarnevndin | 16.03.2022 | 75/22 | 20/00622-1 |
| 13 Býráðsfundur | 24.03.2022 | 62/22 | 20/00622-1 |
| 14 Byggi- og býarskipanarnevndin | 11.09.2023 | 132/23 | 20/00622-1 |
| 15 Fíggjarnevndin | 20.09.2023 | 228/23 | 20/00622-1 |
| 16 Býráðsfundur | 28.09.2023 | 208/23 | 20/00622-1 |
| 17 Ferðslunevndin | 02.05.2024 | 18/24 | 20/00622-1 |
| 18 Byggi- og býarskipanarnevndin | 13.05.2024 | 100/24 | 20/00622-1 |
| 19 Tekniska nevnd | 13.05.2024 | 39/24 | 20/00622-1 |
| 20 Ferðslunevndin | 23.05.2024 | 21/24 | 20/00622-1 |
| 21 Býráðsfundur | 30.05.2024 | 129/24 | 20/00622-1 |

**Upprunin til málið:**
Bygging á Karlamagnusarbreyt er komin væl ávegis, og eru flestu økini bygd ella er bygging í gongd. Sum økið við Karlamagnusarbreyt nærkast at verða liðugt, vísir tað seg at nógvar avbjóðingar eru í økinum. Økið er sera tætt bygt, og er týdningarmikið at tær ymisku avbjóðingarnar verða loystar í einari heildarætlan.

Tí er avgjørt at umsitingin fer undir eina tilgongd saman við borgarunum og áhugaðum í økinum fyri at gera eina tillagaða heildarætlan fyri Karlamagnusarbreyt.

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Umsitingin er farin undir eina tilgongd, har endamálið er, at ein tillagað heildarætlan fyri Karlamagnusarbreyt verður gjørd.

Økið við Karlamagnusarbreyt hevur í verandi støðu fleiri avbjóðingar. Avbjóðingarnar kunnu í høvðusheitum deilast upp í trý evni: ógreið parkeringsviðurskifti, ringar umstøður til gongu- og súkkluferðslu og manglandi fríøki til borgararnar.

Heildarætlanin skal bæði vísa á loysnir uppá tær nágreiniligu avbjóðingarnar í økinum, men hon skal eisini koma við einum boði uppá hvussu økið kann fríðkast og Karlamagnusarbreyt kann gerast ein grøn og vøkur býargøta við trivnaði í hásæti.

Umsitingin hevur í eina tíð arbeitt uppá at greina tær veruligu avbjóðingarnar í økinum og hevur eitt boð uppá møguleikar fyri at loysa hesar avbjóðingarnar.
Í hesum sambandi verður farið undir eina tilgongd saman við borgarunum í økinum og teimum sum hava sína dagligu gongd í økinum. Tey eru boðin inn til verkstovur, har tey fáa møguleikan at vísa á teirra fatan av hvørjar avbjóðingar og hvørjir møguleikar eru fyri loysnum.

Aftaná at verkstovurnar hava verið, samlar umsitingin heildarætlanina fyri Karlamagnusarbreyt, við støði í loysnum sum hava verið viðgjørdar á verkstovunum við borgarar í økinum.
Heildarætlanin verður í framtíðini grundarlag fyri menning av økinum við Karlamagnusarbreyt.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
20/00040 Skipan av økinum kring Hoyvíksvøll

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
20/00622-5 Viðmerkingar frá borgarum
20/00040-1 Skipan av økinum kring Hoyvískvøll
20/00622-7 Parkeringstørvur
20/00622-8 Kostnaðaryvirlit – ikki endaligt

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☐** **Nei ☐**

**Tilmæli:**
Kunnað verður um málið.

**Tekniska nevnd 10. mars 2020:** Kunnað varð um málið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 01. apríl 2020:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Orsakað av koronasmittu, vórðu allar borgaraverkstovurnar avlýstar og ístaðin varð skipað fyri einari talgildari borgaraluttøku, har borgarar fingu møguleikar at siga teirra meining um Karlamagnusarbeyt og koma við ynskjum til betringar. Talgilda luttøkan lá opin í 3 vikur, og komu svar frá 233 borgarum.
70 frá íbúgvum á Karlamagnusarbreyt, 127 frá íbúgvum í búgva í grannalagnum og 36 frá fólki aðrastaðni í kommununi.

Nógvar viðmerkingar vóru afturvendandi. Allar viðmerkingarnar eru skrásettar og flokkaðar (sí skjal ‘viðmerkingar frá borgarum’). Út frá hesum og vitan, sum kommunan longu hevur um øki, eru serliga fýra evnir, ið ganga aftur.

Hesi evnini eru við til at skapa grundarlagið í uppskoti til endurskoðan av Karlamagnusarbreyt 20/00622-7 Plantekning 05.06.20

- **Parkering**

Tá alt er bygt liðugt á Karlamagnusarbreyt er tørvur á uml. 600 p-plássum. Verandi øki, ið eru avsett til parkeringspláss rúma uml. 580 pláss (sí skjal 20/00622-7 parkeringstørvur. Parallell- og lodrættparkering er teknað inn á øll øki har, sum pláss er fyri at venda einum bili. Millum bygningarnar, har parkering ikki rúmast, er grøn fríøki teknað inn. Í uppskotinum hava øll parkeringspláss grønar eindir, so sum gróðurseting við innkoyringarnar og summi hava grasarmering.
Sum nú er, eru øki til rusk ikki skipað á økinum. Ruskinnsavningin hevur gjørt vart við, at ruskbilurin hevur avbjóðingar við at sleppa til felags ruskøkini. Tískil eru felags ruskstøðir teknaðar inn á tvey tey fyrstu p-plássini á 12 parkerings økjum javnt býtt niðaneftir Karlamagnusarbreyt. Hugskotið er, at allar ruskstøðirnar skulu vera eins og vera eitt estetiskt íkast til økið.

- **Gøtu og gonguleiðir**

Gonguteigar eru gjørdir millum allar bygningarnar og fram við allari Karlamagnusarbreyt. Harafturat eru snargøtur ætlaðar fyri at binda ymsu økini saman, skapa trygd frá bilum og fyri at skapa styttri leiðir til t.d. bussin.

- **Vegurin Karlamagnusarbreyt**

Allur vegurin skal skipast av nýggjum. Ætlanin er at skipa vegin við einvegis ferðslu, soleiðis at tað einans verður loyvt at koyra niðaneftir. Ferðsluforðingar, sum eru gróðursettar á vegnum, verða gjørdar fyri at raðfesta trygdina hjá fólki, ið ikki eru í bili. Neyðugt verður við parkering fram við vegnum í støðum. Og av tí at ferðslan er einvegis verður hetta ikki ein trupulleiki, tí vegurin er nóg breiður.

- **Fríðkan og umskapan av økinum í mun til trivna**

Fyri at skapa litir og ein øðrvísi dám í økinum, er ætlanin at gróðurseta við innkoyringina millum allar bygningarnar, á vegunum sum ferðsluforðingar og í skráum við Bertrugøtu, Maritugøtu og millum Ingibjargargøtu/Torkilsgøtu.
Harafturat verður tað gróðursett millum øll øki har, sum tað hóskar.
Uppskot til skipan av Hoyvíksvølli er gjørt, og sent til hoyringar hjá avvarðandi feløgum og felagsskapum. Økið við Hoyvíksvøll er m.a. skipað við inngongd til vøllin, einari sititrappu til áskoðarar, einum felagshúsi/skýli og parkeringsøki (sí skjal 20/00040 plantekning - Skipan av økinum kring Hoyvíksvøll).
Ynskiligt er at skipa økið framman fyri Hoyvíkar Kirkju sum eitt alment torg, sum borgarar kunnu brúka til uppihald og felagsátøk.

**Skjøl:**
20/00622-5 viðmerkingar frá borgarum
20/00622-7 parkeringstørvur
20/00622-7 Plantekning 05.06.20
20/00040-2 plantekning – skipan av økinum kring Hoyvíkvøll

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og leiðarin á býarskipanardeildini mæla teknisku nevnd og býarskipanarnevndini til:

1. at umrøða uppskot til heildarætlanina
2. at koyra uppskotið til heildarætlan út til almenna hoyring
3. at tillagaða heildarætlanin skal leggjast fyri aftur til politiska støðutakan, tá hon er tillagað í mun til innkomnar viðmerkingar.

**Tekniska nevnd 09. juni 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 10. juni 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ferðslunevndin 24. juni 2020:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Heildarætlanin varð framløgd á borgarafundi á skúlanum við Løgmannabreyt í okt. 2020. Nógv fólk var til borgarafundin, og nógvar viðkomandi viðmerkingar vóru til ætlanina.
Heitt varð á íbúgvararnar í økinum um at skipa seg í eigarafeløg fyri tey 6 økini, sum Karlamagnusarbreyt er skipað eftir, soleiðis at samskifti millum kommunu og borgararnar í økinum er umboðandi áhugan í økinum. Skriv er eisini sent út til umboð fyri økini, um at royna at skipa seg í eigarafelag, ella at velja umboð fyri hvørt øki, at hava samskifti við kommununa um ymisku felags viðurskiftini.
Á borgarafundinum varð serliga gjørt vart við manglandi parkeringsplássini í økinum. Tikið varð ikki undir við loysnini at gera parkering og gjøgnumkoyring við Hoyvíkar skúla. Heldur varð heitt á Býráðið um at taka nøkur stykkir innaftur, soleiðis at parkeringstørvurin minkar, og at parkeringin kann skipast á innafturtiknu stykkjunum. Gjørt varð eisini vart við tørvin á felagsøkjum og fríðkan í økinum, at gera tryggari skúlaleiðir. Tikið varð ikki undir við at einsrætta Karlamagnusarbreyt, víst varð á trupulleikarnar við hesi loysn.
Borgarar í økinum hava síðani heitt á kommununa um at fyrireika økið, so at løðistøðir til el-bilar lættliga kunnu fremjast, tá ið eigarafeløgini ynskja tað.
Somuleiðis hava borgarar víst á at ruskinnsavningin er óskipað, og somuleiðis hevur ruskinnsavningin gjørt vart við, at tørvur er á at fáa skynsama loysn til bingjur í økinum, til burturkast, glas og papp.

Aftaná fundin varð farið undir átøk at betra um skúlaleiðir hjá børnum og at fríðka um økið.
- Gøta javnfjar millum Karlamagnusarbreyt og Bertugøtu er framd.
- Gróðurseting við Myllutjørn er framd.
- Gróðurseting við parkeringsøki er framd

Harumframt eru fleiri reinsiverk gjørd, at betra um kloakkskipanina í økinum.

Ferðsluserfrøðingar gjørdu í desember ferðslukanningar og gjørdu uppskot til hvørjar ferðsluloysnir hóska best til økið. *Sí skjal J. Nr. 20/00622-24 Ferðsluplanlegging útgáva 22.01.21.pdf*

Umsitingin hevur tillagað heildarætlanina, við støði í viðmerkingum á borgarafundinum, sí skjal *20/00622-30 KMB samlað* og *20/00622-30 Framløga politiska viðgerð 2021* og mælir til hesi átøk:

- Aftaná borgarafundin hevur Býráðið keypt 2 stykkir aftur, sum parkering kann skipast á. Á hetta økið fáast uml 85 parkeringspláss, og eigur hetta at vera sett í verk beinanveg. Møguligt er at fáa fleiri parkeringspláss á økið, umframt at økið kann innrættast til eitt felagsøki, men hetta krevur at økið verður raðfest sum ein verkætlan.
- Innkoyringin til Skúlan á Løgmannabreyt verður umskipað, soleiðis at sýnið verður betri, og parkeringin verður eisini umskipað.
- Vegurin verður 30 km/t vegur, og verður skipaður, soleiðis at gongubreyt er á báðum síðum, gøtuljós verða sett í gongubreytarkantin, súkklur og bilar deilast um vegbanan, 2 minus 1, og við vegamót verða 'rumlur' við chaussesteinum ella líknandi, so mint verður á at halda lága ferð, umframt at plantað og fríðkað verður á økinum.
- Vegurin verður ikki einsrættaður, men innkoyring bannað frá vegamótinum Skúlin á Løgmannabreyt omaneftir. Hetta fyri at fáa ovaru økini í Hoyvík at koyra omaneftir Løgmannabreyt heldur enn gjøgnum Karlamagnusarbreyt. (hetta er eitt ynski frá borgarum í økinum).
- Dragirør verða løgd til øll parkeringsøki, so nøktandi ljós kann tryggjast í økinum.
- Spæli- og trivnaðarøki verða gjørd.
- Farleiðir og gøtur verða gjørdar at bøta um skúlaleiðirnar.
- Fleiri øki, serliga tey, ið ikki kunnu rúma parkering, verða løgd við grasarmering heldur enn asfalt, fyri at fríðka um.

- Uppskot er gjørt til standardleist, at skipa ruskøki við øll parkeringsøki, sum eigarar eiga í felag. Vatn og frárenningar skulu leggjast til hesi øki, ið eisini kunnu fyrireikast til postkassar og framtíðar talvur til el løðistøðir.
- Støða skal takast til, um hendan loysnin skal góðkennast av eigarafeløgunum, hvussu hetta kann skipast og hvør skal gjalda fyri felags skipanina.
- Ynskir Tórshavnar kommuna at gjalda fyri hesa loysnina fyri eigarafeløgini, um tey taka undir við teimum.
- Dragirør verða løgd í tey økini sum ikki eru asfalterað, soleiðis at billøðistøðir lættliga kunnu setast, tá ið eigarafeløgini ynskja tað.

Parkeringin:
Við hesum uppskotinum fáast 503 parkeringspláss afturat teimum 91, sum hoyra til Skúlan við Løgmannabreyt.
Sambært givnum byggiloyvum higartil, er tørvur á 464 parkeringsplássum.
Tá ið alt økið er fult útbygt, verður tørvur á 525 parkeringsplássum at nøkta krøv sambært byggisamtyktini. Hesin tørvur kann røkkast, um afturkeyptu matriklarnir verða innrættaðir við einum parkeringshúsi ella við einum parkeringsdekki.

Fleiri av omanfyri nevndu átøkunum kunnu metast sum Skjótt Syftir Seiðir, og kunnu setast í gongd skjótt.

Størri átøk ella Tyngri Tøk eru eisini neyðug í sambandi við liðugtgerð av Karlamagnusarbreyt, og skulu loysast og prosjekterast sum serstakar verkætlanir.

Av hesum kunnu nevnast:
- Torg til Hoyvíkar kirkju.
- Parkeringshús/borgarahús/felagshús á afturkeyptu stykkjunum.
- Trivnaðarøki við Atlagøtu.
- Farleið gjøgnum grøna geiran millum fótbóltsvøllin og Atlagøtu.

Av omanfyrinevndu átøkunum verður mælt til beinanvegin at fara undir tey átøkini, sum eru serliga átrokandi og kunnu lýsast sum Skjótt Syftir Seiðir.

Hesi eru:
- Umskipan av innkoyring við Skúlan við Løgmannabreyt, og skipan av parkering og fríðkan á økinum.
- Inn- og útkoyring frá Atlagøtu til Bónus
- Skipa parkering á afturkeyptu stykkjunum, planta og fríðka
- Gongubreytir frá Atlagøtu til Skúlan við Løgmannabreyt, (vegur 2 og 3)
- Dragirør og fyrireikingar til framtíðarloysnir í sambandi við asfaltering.

Heildarætlanin er ikki prosjekterað, og kostnaðarmeting er ikki gjørd av arbeiðinum. Mælt verður til at 8 mió. verða settar av til arbeiðið í 2021.

Skjøl:
20/00622-24 Ferðsluplanlegging útgáva 22.01.21.pdf
20/00622-30 KMB Samlað
20/00622-30 framløga politiska viðgerð 2021

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býararkitekturin og býarverkfrøðingurin mæla til, at
1) tikið verður undir við heildarætlanini fyri Karlamagnusarbreyt,
2) seta átøkini nevnd sum “Skjótt Syftir Seiðir” í verk,
3) játta kr. 8 mió. til verkætlanina, skipað og fíggjað soleiðis:
   a) Øll verkætlanin verður skipað undir konto 6475, L64015, Karlamagnusarbreyt, asfaltering, parkering o.a.

b) Kr. 3.000.000 verða fluttar av konto 6275, L62043, Karlamagnusarbreyt, ferðslutrygd, gøtur, spælipláss, á konto 6475, L64015, Karlamagnusarbreyt, asfaltering, parkering o.a.
c) Kr. 900.000 verða fluttar av konto 8175, L00002, framfluttur løgukarmur
d) Kr. 4.150.000 verða fluttar av konto 8175, L00001, løgukarmur fyri árið

4) Beina málið í býráðið umvegis teknisku nevnd og fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 08. mars 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.
**Tekniska nevnd 08. mars 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.
**Fíggjarnevndin 17. mars 2021:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og teknisku nevnd og beina málið í býráðið til tvær viðgerðir.
**Býráðsfundur 25. mars 2021:** Samtykt við fyrstu viðgerð við tíggju atkvøðum fyri, tveimum atkvøðum ímóti og einari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Súna Mørk, Bjørg Dam, Elsa Berg, Jákup Dam og Birgir Nielsen.

Ímóti atkvøddu: Ruth Vang og Annika Olsen.

Blankt atkvøddi: Gunvør Balle.

**Býráðsfundur 29. apríl 2021:** Samtykt við aðru viðgerð við 11 atkvøðum fyri, ongari ímóti og tveimum blonkum atkvøðum.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Súna Mørk, Bjørg Dam, Jákup Dam, Gunvør Balle, Kristian M. Skála og Birgir Nielsen.

Blankt atkvøddu: Elsa Berg og Ruth Vang.

**Ískoyti:**
Arbeitt hevur verið sambært býráðssamtykt í 2021. Við árslok 2021 eru kr. 874.382 eftir á játtanini til arbeiðið á kr. 9.950.000 og við útistandandi arbeiðum er játtanin uppi pr. februar 2022. Arbeitt hevur verið við at røkka átøkunum «Skjótt syftir seiðir» og hevur arbeiðið verið skipað við tveimum verkætlanarleiðarum: einum fyri økið niðan fyri Atlagøtu og einum omanfyri.

Í sambandi við arbeiðini oman fyri Atlagøtu er gjørdur sáttmáli við J og K Contractors at gera:

- Nýggja innkomu til skúlan við Løgmannabreyt
- Nýtt parkeringsøki millum verandi parkeringsøkið við skúlan við Løgmannabreyt
- Umskipan av parkeringsøkinum við skúlan við Løgmannabreyt
- Gongubreytir fram við vegnum millum Rólantsgøtu og Atlagøtu sambært heildarætlanini
- Skipa gøtuljós sambært heildarætlanini á sama strekki
- Skipa leiðingar o.l. til framtíðarloysnir inni á túnum og parkeringsøkjum millum bygningarnar

Sáttmálin fyri hesi arbeiðir er á uml. 5,25 mió. kr. v/mvg. Í 2021 er arbeitt fyri uml. 3 mió. kr. og resta tí arbeiðir fyri uml. 2,25 mió. at blíva gjørd her. Hetta umfatar liðuggerð av øllum punktum omanfyri. Um hesi arbeiðir ikki verða gjørd liðug, kann ferðsla í økinum ikki henda á tryggum grundarlagi, umframt at hetta við vissu vil viðføra sera stóra ónøgd millum borgarar í økinum. Eisini skal roknast við, at endurgjaldskrav kann koma frá arbeiðstakaranum fyri brotnan sáttmála. Tí er arbeiðið ikki steðgað enn, vegna sera lágt virksemi orsakað kavan í januar og februar. Men verður játtanin ikki økt, verður arbeiðið steðgað.

Umframt hesi arbeiðir, eru økini millum bygningarnar blivin liðugtgjørd undir arbeiðstøku av RJ Brockie, so hvørt, sum tey hava verið klár frá byggiharranna síðu.

Hetta hevur inniborið:

- Eftirlit og møguliga umvæling av avvandingarskipanum
- Fínplanering
- Uppsetan av gøtuljósum
- Uppsetan av kantsteinum at tryggja brunaleiðir

Í sambandi við arbeiðini niðan fyri Atlagøtu, hevur RJ Brockie staðið fyri at:

- Skipa parkering á afturkeyptu stykkjunum, planta og fríðka
- Liðugtgera økini millum bygningarnar, so hvørt sum økini hava verið klár frá byggiharranna síðu, herundir:
    - Eftirlit og møguliga umvæling av avvandingarskipanum
    - Fínplanering
    - Uppsetan av gøtuljósum
    - Uppsetan av kantsteinum at tryggja brunaleiðir

RJ Brockie hevur framt hesi arbeiðir upp á rokning. Í 2021 eru brúktar 5,47 mió. kr. til hesi arbeiðir. Verkætlanarleiðarin upplýsir, at arbeiðir fyri uml. 5,5 mió. kr. resta í fyri at hesi arbeiðir verða liðug. Henda arbeiðstøkan er steðgað.

Viðmerkjast skal, at nýtslan av játtanini í stóran mun er nýtt til at liðuggera økini millum bygningarnar, sum annars ikki eru partur av játtanini frá 25. mars 2021. Til hetta arbeiðið eru kr. 2.400.000 játtaðar í februar 2020. Men hetta er als ikki nøktandi í mun til tey økir, sum eru blivin liðugtgjørd.

Samanlagt resta tí uml. 7,75 mió. kr. í fyri at gera arbeiðini liðug, umframt 650 tkr. til at asfaltera Karlamagnusarbreyt millum Atlagøtu og Rólantsgøtu, tá arbeiðini eru liðug.

Umsitingin metir, at tað er neyðugt at umraðfesta innan íløgukarmin, fyri at fáa til vega hesar upphæddir, fyri at arbeiðini ikki steðga upp við teimum avleiðingum, sum tað kemur at hava við sær.

Skjal:
20/00622-60 220223_Frágreiðing av KMB Status.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til, at játtaðar verða kr. 8.400.000 til liðuggerð av umrøddu arbeiðum. Mælt verður til at kr. 3.000.000 verða fluttar av løgukarminum LK81998 Parkering, undir konto 8175 Vegir (Íløgur) og kr. 5.400.000 av verkætlan L61024 undir konto 6175 Umsiting og røkt fastari ogn (íløgur) til verkætlanina L64015 Karlamagnusarbreyt, asfaltering, parkering o.a., undir konto 6475 Byggibúning bústaðir (íløgur), og at málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.
**Tekniska nevnd 07. mars 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.
**Fíggjarnevndin 16. mars 2022:** Samtykt at játtaðar verða kr. 8.400.000 til liðuggerð av umrøddu arbeiðum. Mælt verður til at kr. 8.400.000 verða fluttar av konto 8175 Vegir (íløgur), kr. 3.000.000 av LK81998 Parkering og kr. 5.400.000 av LK81037 Innkomuvegur.

Upphædin skal flytast á nýggja verkætlanarkonto á 8175 Vegir.

**Býráðsfundur 24. mars 2022:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Játtanin til kontu L62043 Karlamagnusarbreyt, ferðslutrygd, gøtur, spælipláss varð flutt á kontu L64015 Karlamagnusarbreyt, asfaltering, parkering o.a. í mars í 2021. Av misgáum er prosjektløn ísv. heildarætlanina í 2020 ikki goldin, áðrenn játtanin varð flutt, og eigur prosjektløn 2020 tí at verða goldin av kontu L64015 Karlamagnusarbreyt, asfaltering, parkering o.a., og konta L62043 Karlamagnusarbreyt, ferðslutrygd, gøtur, spælipláss at verða lokað nú.

Heildarætlanin, sum varð fíggjað av L62043 er liðug, og restupphæddin er áljóðandi kr. -105.400.

| Býráðsfundur<br>30. mai 2024 | Blað nr.: 556<br><br>Formansins merki: |
|---|---|

**Skjal:** 20/00622-65 Prosjektløn 2020

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☒
Eyka játtan ☐
Lokað verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| 6275 | L62043 | Karlamagnusar breyt, ferðslutrygd, gøtur, spælipláss | 6475 | L64015 | Karlamagnusar breyt, asfaltering, parkering o.a. | | -105.400 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður | Upphædd: | -105.400 |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býararkitekturin og býarverkfrøðingurin mæla til at loka verkætlanina L62043, Karlamagnusarbreyt, ferðslutrygd, gøtur, spælipláss, at trotið á kr. 105.400 verður flutt/goldið av L64015 Karlamagnussarbreyt, asfaltering, parkering o.a., og at málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 11. september 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 20. september 2023:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 28. september 2023:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
*Á býráðsfundi 29. apríl 2021 varð samtykt, at Karlamagnusarbreyt skal avmerkjast til ein 2-1 veg.*

*Umsitingin metir, at tað er skilagott at viðgera samtyktina av nýggjum um 2-1 avmerkingin skal gerast, við støði í ferðsluni, virkseminum í dag og tilráðingum, hvat er skynsamast og hvat er tryggast. Skulu bungur ella ferðslutálman, sum er tilrádd gerast við vegamót í niðara parti av Karlamagnusarbreyt, og ella skal 2-1 vegur avmerkjast.*

***Fakta:***
*íbúðarbyggingin er komin væl áleiðis, tó eru nakrir manglar í sambandi við tilráðing um trygd og ferðslutálman á Karlamagnusarbreyt.*

***Avgreitt:***

- *gongubreytirnar eru lidnar*
- *bungur í ovara parti eru gjørdar*
- *gróðursettar ferðsluforðingar eru gjørdar í ovara parti av KMB, hesar eru staðsettar millum gongu- og vegbreyt, og taka tí eisini øki frá hesum.*

***Ikki avgreitt***

- *bungur ella ferðslutálman í niðara parti av KMB*
- *avmerkjan av 2-1 vegi á allari KMB*

*Við Karlamagnusarbreyt frá 1 til 42, við Myllutjørn og á Ingibjargargøtu búgva 763 fólk.*

*Á Karlamagnusarbreyt 1 til 32 er nógv ferðsla báðar vegir við nógvum síðuvegum og nógvum útvendum virksemi.*

*Á Karlamagnusarbreyt frá 32 til 42 er partvís einvegis ferðsla niðaneftir, tó er loyvt bilum, ið hava koyrt niðan ímóti 42, at koyra omaneftir. Hetta avmarkar sjálvsagt ferðsluna nógv omaneftir og ger, at 2-1 avmerking ikki er viðkomandi.*

*Ferðsluteljingar, sum eru gjørdar við bústaðin Karlamagnusarbreyt 7, frá 12. til 19. apríl 2024, jnr. 20/00622-71 siga at miðal dagsferðslan er 2915, og hægsta tímaferðslan er 338 bilar.*

*Vejderektoratet fráræður at 2-1 vegur verður gjørdur, um:*
- *miðal dagsferðslan er yvir 3000 bilar*
- *hægsta tímaferðsla av bilum er yvir 300*
- *Sí Ferðsluteljing á KMB 7 – 12. – 19. Apríl 2024 jnr. 20/00622-71*

***Skjøl:***
*jnr. 20/00622-70 Ferðsluteljing á Karlamagnusarbreyt*
*jnr. 20/00622-71 Ferðsluteljing á KMB 7 – 12. – 19. apríl 2024*

**Tilmæli:**
Ferðslubólkurin mælir til:
- at ætlaðu ferðtálmingarnar verða gjørdar í niðara parti av Karlamagnusarbreyt.
- at 2-1 vegur ikki verður avmerktur á Karlamagnusarbreyt.

**Ferðslunevndin 02. mai 2024:** Tekur undir við tilmælinum, og beinir málið í Býráðið umvegis, Byggi og Býarskipanar nevndina og Teknisku nevnd.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 13. mai 2024:** Nevndin tekur undir við tilmælinum, og mælir til at taka skeltini við parkeringsplássini við skúlan burtur, so loyvt verður at koyra báðar vegir, og at endurmeta aftur seinni í ár, um tað hevur eydnast.

**Tekniska nevnd 13. mai 2024:** Nevndin tekur undir við byggi- og býarskipanarnevndini.

**Ískoyti:**
Byggi- og býarskipanarnevndin mælir til at skeltini C22,1 við bústaðirnar Karlamagnusarbreyt 40A og 45A verða tikin burtur, so tvívegis ferðsla verður loyvd. Mælt verður eisini til, at eftirmett verður aftur seinni í ár, um tað eydnast.

Fyri at avmarka ferðsluna og økja um ferðslutrygdina var tað eitt ynski frá borgarum i økinum, at Karlamagnusarbreyt skuldi vera einvegis niðaneftir við bústaðirnar 40A og 45A. Býráðið samtykti 29. apríl 2021 hesa avmarking.

Umsitingin metir, at ferðslan fer at økjast nógv omaneftir, um tvívegis ferðsla verður loyvd millum bústaðirnar Karlamagnusarbreyt 40A/45A og Ingibjargargøtu. Tí umframt ferðslu til og frá bústøðunum í økinum, verður tað ómakaleysari hjá teimum gott 700 fólkunum, sum búgva omanfyri og eystanfyri Rólantsgøtu, at koyra oman til m.a. fótbóltsvøllin og annað útvent virksemi eftir Karlamagnusarbreyt.

**Tilmæli:**

Ferðslubólkurin mælir til, at Ferðslunevndin tekur støðu á fundinum.

**Ferðslunevndin 23. mai 2024:**Tekur undir við tilmælinum, hjá byggi- og býarskipanarnevndini.

**Ískoyti**

Sambært ferðslulógarkunngerðini (Løgtingslóg nr. 14 frá 2. mars 1988 um ferðslu, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 31 frá 17. mars 2022) verða avgerðir, sum varandi kunnu ávirka nýtsluna av veg ella útgerð teirra [...] tiknar av politivaldinum við samtykki frá vegamyndugleikanum. Vegna hesa áseting hevur avgerðin hjá Byggi- og býarskipanarnevndini frá 13. mai 2024, at taka støðu til um forboðsskelti fyri ferðslu omaneftir Karlamagnusarbreyt millum nr 45 og 40, skal takast burtur, so ferðsla aftur verður loyvd báðar vegir eftir allari Karlamagnusarbreyt, verið til viðgerðar í ferðslunevndini tann 23. mai 2023. Umsitingin tekur við støði í samtyktini í ferðslunevndini frá 23. mai 2023 til eftirtektar, at politivaldið tekur undir við tvívegis ferðslu eftir Karlamagnusarbreyt. Harumframt er samtykt í Byggi- og býarskipanarnevndini og Teknisku nevnd frá 13. mai 2024 um at 2-1 vegur ikki verður merktur og ætlaðar ferðtálmingar verða gjørdar í niðara parti av Karlamagnusarbreyt.
Av tí at øll viðurskiftini sostatt eru viðgjørd og avgerð tikin í avvarandi faknevndum, verður málið samlað lagt beinleiðis fyri Býráðið.

**Tilmæli**

Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og býararkitekturin mæla til at tikið verður undir við avgerðunum í Ferðslunevnd, Byggi- og býarskipanarnevnd og Teknisku nevnd at:

- at tær í heildarætlanini fyri Karlamagnusarbreytætlaðu ferðtálmingarnar verða gjørdar í niðara parti av Karlamagnusarbreyt.
- at 2-1 vegurin sum á Karlamagnusarbreyt ikki verður avmerktur.
- at skeltini C22,1 við bústaðirnar Karlamagnusarbreyt 40A og 45A verða tikin burtur, so tvívegis ferðsla verður loyvd.
  at eftirmeta broytingarnar til tvívegis ferðslu seinni í ár.

**Býráðsfundur 30. mai 2024:** Einmælt samtykt.

# 130/24 Umsókn um serstøk byggisamtykt verður gjørd fyri matr. nr. 410a, 411d, 413a, 413b, Tórshavn

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 22.06.2021 | 136/21 | 21/02554-2 |
| 2 Býráðsfundur | 23.06.2021 | 201/21 | 21/02554-2 |
| 3 Byggi- og býarskipanarnevndin | 20.06.2022 | 145/22 | 21/02554-2 |
| 4 Býráðsfundur | 22.06.2022 | 164/22 | 21/02554-2 |
| 5 Byggi- og býarskipanarnevndin | 13.05.2024 | 87/24 | 21/02554-2 |
| 6 Býráðsfundur | 30.05.2024 | 130/24 | 21/02554-2 |

**Upprunin til málið**
Eigarin av matr. nr. 410a, 411d, 413a og 413b hevur søkt um at fáa gjørt serstaka byggisamtykt fyri økið, soleiðis at parkeringshús, við íbúðum ovast, kann loyvast, sí skjal *Parkering og íbúðarbygningur*. Í innsenda uppskotinum er pláss fyri 150 p-plássum, umframt 8 íbúðum á ovastu hædd.
Matr. nr. 410a, 411d, 413a og 413b liggja í miðbýnum í Tórshavn. Økið liggur millum Bøkjarabrekku sunnanfyri og Kongagøtu norðanfyri. Eystanfyri er Tinghúsvegurin og vestanfyri er Niels Finsens gøta.

**Lýsing av málinum**
Ferðslan í miðbýnum hevur í nógv ár verið merkt av manglandi parkeringsplássum, og fleiri ymiskir møguleikar hava seinastu árini verið umrøddir, fyri at loysa hendan trupulleikan. Ein teirra er parkeringshús á matr. nr. 410a, men eru hesar ætlanir ongantíð komnar á mál. Nú hevur eigarin gjørt eitt uppskot, sum tykist kunna loysa ein part av parkeringsavbjóðingunum í miðbýnum. Talan er um eitt parkeringshús í 3 hæddum (6 forskotnar hæddir), parkeringskjallara og 8 íbúðum á ovastu hædd. Innkoyring til bygningin er frá Kongagøtu, við inn- og útkoyring skipað á hvør sínum vegbana.

Økið liggur í 1. Grundumráði í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu – økið til blandaða bústaða- og miðastaðabygging.
Byggingin, ið søkt verður um, hevur eitt byggistig á 0,825, nýtslustig á 3,759 og hæddin frá lendinum er 13 m (ovasta hædd er trekt inn frá framsíðuni). Økið liggur í 1. Grundumráði og ásetingarnar fyri økið eru m.a., at mest loyvda byggistig er 0,6, mest loyvda nýtslustig er 1,3 og mest loyvda hædd er 11 m til hægsta punkt við útvegg og 13 m til mønuna. Í serstakari byggisamtykt er tó møguligt at víkja frá ásetingum viðvíkjandi hædd, byggi- og nýtslustigi. Tó má nýtslustigið fyri hetta økið sum heild ikki fara upp um 3,0.

Almenna byggisamtyktin er í stóran mun menta á bústaðar- og vinnubygging, og í minni mun á eitt nú parkeringshús, og hetta sæst aftur nú søkt verður um loyvi at byggja eitt parkerinshús í miðbýnum. Um byggingin, sum søkt verður um, skal vera møgulig, er soleiðis neyðugt at gera serstaka byggisamtykt fyri økið. Í hesum føri er talan um eitt parkeringshús, sum stórur tørvur er á í býnum og sum hevur eina aðra ávirkan á býin, enn onnur bygging. T.d. hevur bygningurin ikki tørv á fríøki rundan um, og ein tílíkur bygningur setur ikki stórvegis krøv til tekniskar leiðingar. Tí verður mett, at tað í hesum føri er ráðiligt at gera serstaka byggisamtykt, ið loyvir bygging, ið er størri enn loyvt verður í almennu byggisamtyktini.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Ásetingar fyri 1. grundumráði eru m.a.:

- 1. grundumráði verður lagt til blandaða bústaða- og miðstaðabygging. Miðstaðabyggingin má einans vera hús, sum heilt ella lutvís verða innrættað til handlar, skrivstovur, stovnar, samkomuhús, heilsubótarhølir og tílíkt.

- Byggistigið má ikki fara upp um 0,6.
- Nýtslustigið má ikki fara upp um 1,3
- Hús mugu ikki verða bygd hægri enn 11 m til hægsta punkt við útvegg og 13 m til mønuna. Kjallarin verður roknaður sum húsahædd.
- Kortini er gjørligt at víkja frá ásetingunum í stk. 2, 3, 4 og 5 í serstakari byggisamtykt fyri hóskiligt, nattúrliga avmarkað øki. Tó má nýtslustigið fyri hetta økið sum heild ikki fara upp um 3,0.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Parkeringviðurskiftini í miðbýnum hava leingi verið ein avbjóðing, m.a. orsakað av øktari bilferðslu og trupulleikum at útvega neyðug parkeringsøki til tað, ið verður bygt. Fyri at royna at bøta uppá hesi viðurskifti, verður mælt til at broyta ásetingarnar fyri 1. og 2. Grundumráði, soleiðis at byggi- og nýtslustig fyri parkeringshús verður hækkað.
Hetta er somuleiðis ein fortreyt fyri, at serstaka byggisamtyktin fyri parkeringshúsið, sum verður viðgjørt í hesum málinum, kann gerast.

Byggingin, ið søkt verður um, er treytað av at avtala fæst við eigararnar av matr. nr. 411f, 411a og 414a, av tí at byggingin fer inn á teirra ognir/liggur heilt upp at markinum.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
-

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Tekniska fyrisiting ger uppskotið til serstøku byggisamtyktina.

**Skjøl**
*Parkering og íbúðarbygningur,* journal nr. 21/02554-1.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☐** **Nei ☐**

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til:
- At serstøk byggisamtykt, sum loyvir bygging av parkeringshúsi smb. skjalinum *parkering og íbúðarbygningur* verður gjørd, treytað av at avtala verður gjørd við eigararnar av matr. nr. 411f, 411a og 414a.
- Um eingin avtala fæst við eigararnar av matr. nr. 411f, 411a og 414a, at umsitingin tillagar uppskotið, soleiðis at parkeringshúsið rúmast á ognum umsøkjarans.
- At arbeiðið at broyta almennu byggisamtyktina, soleiðis at eitt hægri byggi- og nýtslustig verður loyvt fyri parkaringshús í 1. og 2. grundumráði, verður byrjað.
- At beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 22. juni 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 23. juni 2021:** Samtykt við 12 atkvøðum fyri, ongai ímóti og einari blankari.
Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Súna Mørk, Bjørg Dam, Jákup Dam, Gunvør Balle, Annika Olsen, Birgir Nielsen og Ruth Vang.

Blankt atkvøddi: Elsa Berg.

**Ískoyti:**
Síðani málið varð viðgjørt seinast, eru ymiskar broytingar gjørdar í verkætlanini á matr. nr. 410a, 413a, 413b og 411d, Tórshavn. Tað eydnaðist ikki at fáa avtalu í lag við eigararnar av matr. nr. 411f, 411a og 414a, Tórshavn, so nýggja uppskotið er tillagað, soleiðis at parkeringshúsið rúmast á ognum umsøkjarans, sí skjal *Parkeringshús_Feb 2022_Umsókn um broyting av byggisamtykt*. Harumframt er lutfallið millum íbúðir og parkeringshús broytt, soleiðis at tað í núverandi uppskoti eru 21 íbúðir og 135 p-pláss. Innkoyringin verður frá Bøkjarabrekku og útkoyring á Kongagøtu.

Endaliga innrættingin av bygninginum er ikki greið, og eru avbjóðingar í núverandi uppskoti, ið skulu loyvast, áðrenn innrættingin prinsipielt kann góðkennast, men uttaru karmarnar eru nøktandi, við nøkrum fáum tillagingum. Smb. nýggja uppskotinum, sí skjal *Parkeringshús_Feb 2022,* er parkering í 3 hæddum (6 forskotnum hæddum), har 1,5 hædd av hesum eru undir jørð. Omaná eru tvær hæddir við íbúðum, og tilhoyrandi terassum.

Har eru fleiri viðurskifti, ið ikki eru í tráð við almennu byggisamtyktina, t.d. byggistig, nýtslustig og hæddin á bygninginum, umframt tað, at byggingin liggur út í mark á øllum síðum, men kunnu hesi viðurskifti regulerast í serstakari byggisamtykt.

Viðv. hæddini, so er hæddin frá vegnum á vestaru síðu (lægsta síðan) av ognini 13 m til hægsta punkt av bygninginum, har tvær tær ovastu hæddirnar eru trektar inn. Mett verður, at hetta er ráðiligt, og at byggingin fylgir einari natúrligari hæddarlinju í mun til vegin, lendið og bygningarnir vestanfyri og eystanfyri.

Viðv. byggistigi og nýtslustigi, so varð metingin í fyrru viðgerð tann, at man í parkeringshúsum kundi loyva einum hægri byggi- og nýtslustigi enn fyri t.d. bústaðabygging og vinnubygging. Hetta av tí at 1,5 hædd av byggingini, ið telur við í nýtslustignum, eru undir jørð, og tí tykist rúmdin á byggingini ikki eins stór, sum nýtslustigið annars kundi týtt uppá og av tí at talan er um bygging, ið ikki hevur eins stóran tørv á fríøki og ikki lastar økið á sama hátt.

Broytingarnar í lutfallinum millum parkering og íbúðir smb. nýggja uppskotinum gera tó, at krøvini til útiøkini gerast størri, soleiðis at trivnaðurin hjá íbúgvunum verður tryggjaður. Viðmerkjast kann, at tann parturin av byggingini, sum er íbúðir, svarar til 1,3 í nýtslustigi, sum er tað, ið verður loyvt smb. almennu byggisamtyktini. Afturat hesum koma so parkeringshæddirnar, ið svara til uml. 2,7 í nýtslustigi.

Tað verður mett at hava týdning, at tað í serstøku byggisamtyktini er ásett, at bygningurin skal hava í mesta lagi 21 íbúðir og í minsta lagi 135 p-pláss. Hetta soleiðis at tað verður tryggjað, at endamálið við serstøku byggisamtyktini verður rokkið. Síðani skal arbeiðast meira við innrættingini av bygninginum, soleiðis at innrættingin er nøktandi í mun til trivnað, trygd, galdandi reglur og normar. Um tað í smb. við hetta arbeiðið vísir seg, at tað ikki er rúm fyri øllum, so skal tað hóast hetta verða minst 135 p-pláss og í mesta lagi 21 íbúðir.

Viðv. byggingini út í mark, so er tað í tráð við almennu byggisamtyktina, at bygt verður við framsíðu í veglinjuna. Í mun til byggingina út í grannamark móti eystri, so verður tað eitt krav í mun til m.a. bruna, at byggingin út í grannamark verður uppført sum brunaveggur smb. galdandi reglum um bygging í mark. Íbúðarbyggingin skal verða trekt í minsta lagi 2,5 m frá grannamarki móti eystri. Á ognini 409e, ið er granni móti norðri, er bygt heilt út í mark. Verkætlanin hjá umsøkjara skal tillagast soleiðis, at byggingin verður trekt minst 5 metrar frá byggingini á matr. nr. 409e.

Parkeringshúsið er í tráð við ynskið um at tætta býin og fáa fleiri parkeringspláss og íbúðir í miðbýnum. Parkeringshús eru stór og fylla nógv í umhvørvinum, og fer hetta at ávirka sethúsadámin á økinum í mun til øktu ferðsluna og vavið av byggingini.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at byggi- og býarskipanarnevndin tekur støðu til, um serstøk byggisamtykt til 21 íbúðir og 135 p-pláss skal gerast, smb. innsenda uppskoti við teimum tillagingum, ið eru nevndar omanfyri, og beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 20. juni 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 22. juni 2022:** Samtykt við 10 atkvøðum fyri og trimum ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Súna Mørk, Bjørg Dam, Jákup Dam, Birgir Nielsen og Ruth Vang.

Ímóti atkvøddu: Elsa Berg, Gunvør Balle og Annika Olsen.

**Ískoyti:**
Síðani málið varð viðgjørt seinast, varð farið undir eina nýggja tilgongd, og hevur ráðgevin latið kommununi eitt heilt nýtt uppskot til íbúðar- og vinnubygning við parkeringskjallara. Nýggja uppskotið sýnir ein íbúðar- og vinnubygning við 16 íbúðum og einum parkeringskjallara, sum fer 12,5 metrar undir jørð, og ávikavist 13 og 16 metrar yvir jørð, og hevur pláss fyri 100 bilum (sí skjal *01.05.2024 – Bøkjarabrekka 5*).

Ráðgevar hava gjørt nýggja uppskotið út frá viðmerkingum frá grannum og fundum við umsitingina.

Heilt yvirskipað er at siga um bygningin, at bygningurin er trektur aftur frá grannamørkum og er yvirskipað broyttur frá at vera eitt parkeringshús við íbúðum til ein íbúðar- og vinnubygning við parkeringskjallara.

Eftir umbøn hevur umsitingin fingið fleiri viðurskiftir nágreinaði, so sum framsíðutilfar, kotur, nýtslu- og byggistig, skurðmyndir og ferðslugrannskoðan.

Byggistigið er 0,51 og nýtslustigið er 1,69 fyri partin yvir jørð, og 4,01 fyri partin undir jørð. Hæddin á hægsta útveggi er 16 m, máld frá Bøkjarabrekku (út frá miðjum stykki).

Nýggja uppskotið tekur meiri atlit til útsýnið og sólarringin, og alment øki er kring bygningin, umframt fríøki til íbúgvar á tekjuni millum bygningskropparnar. Í mun til uppskotið frá 2022, er talið av íbúðum lækkað úr 21 niður í 16, og p-økið rúmar 100 plássum, ístaðin fyri 135. Nýggja uppskotið rúmar færri, men meira fjølbroyttum, og sannlíkt dýrari íbúðum. Pláss er fyri 770 $m^2$ til útvent vinnuvirksemi á veghæddini.

Býarskipanarliga verður mett, at miðbýurin hevur tørv á bæði fleiri íbúðum, hølum til vinnuligt virksemi og parkeringsplássum, og uppskotið kann síggjast sum ein hóskandi býartætting. Kommunuætlanin frá 2020 lýsir fyrimunir og vansar við býartætting soleiðis:

*Fyrimunur við tætting er, at í stóran mun er undirstøðukervið til bústaðarbygging, so sum vegir og tekniskar leiðingar, longu lagt út til økini. Tó er neyðugt at tryggja, at undirstøðukervið megnar økta trýstið av tættari bygging. Eisini er neyðugt at taka atlit til tørvin á at varðveita grøn fríøki inni í býnum.*

Fagurfrøðiliga er sniðið í andsøgn til eldru og smærri bygningarnar í nærumhvørvinum.

Fyri ráðgevar hevur størsta avbjóðingin verið, at skipa ferðsluviðurskiftini skynsamt, og uttan at byggingin verður í stríð við grannar, gongufólk og bilaferðsluna. Sambært ferðslugrannskoðanini er ikki pláss fyri felags til- og frákoyring frá Bøkjarabrekku, og mælt verður til at gera einvegis innkoyring frá Kongagøtu,

og útkoyring á Bøkjarabrekku. Hetta krevur bæði, at lendið á Kongagøtu verður keypt frá eigara av matr.nr. 409b, og at trý almenn parkeringspláss á Kongagøtu verða burtur.

Uppskotið er ikki endaliga ferðslugranskað av umsitingini, men verður hetta gjørt í framhaldandi tilgongdini.

Í mun til nýtslurættin til tey 100 p-plássini eru fleiri ivamál. Virðið á parkeringini og uppskot um skipan er treytað av parkeringskipanini fyri miðbýin annars. Um verandi skipan við tíðaravmarkaðari og ókeypis parkering verður broytt, fer hetta at ávirka nyttuvirðið fyri parkeringskjallaran.

Ráðgevarnir koma á fundin at leggja uppskotið fram.

**Nýggj skjøl**
- 01.05.2024 – Bøkjarabrekka 5., jnr. 21/02554-56

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at byggi- og býarskipanarnevndin tekur støðu til, um serstøk byggisamtykt til bygning við vinnuhølum, 16 íbúðum og 100 p-plássum skal gerast, sambært innsenda uppskoti, dagfest 01.05.2024, og beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 13. mai 2024:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 30. mai 2024:** Samtykt við 9 atkvøðum fyri, 2 ímóti og 2 blonkum.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsern, Kári Johansen, Súna Mørk, Bjørg Dam, Jákup Dam og Súsanna Olsen.

Ímóti atkvøddu: Gunvør Balle og Annika Olsen

Blankt atkvøddu: Turið Horn og Birgir Nielsen

# 131/24 Umsókn um broyting av almennu byggisamtyktini - krav um løðistøðir til elbilar

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 13.05.2024 | 98/24 | 21/04379-6 |
| 2 Býráðsfundur | 30.05.2024 | 131/24 | 21/04379-6 |

**Upprunin til málið**
Í oktobur 2021 sendi Elbilafelagið áheitan til allar kommunur í landinum um at fáa áseting í byggisamtyktirnar, soleiðis at tað verður krav um at seta løðistøðir, ella gera klárt til uppsetan av løðistøðum til elbilar, tá bygt verður.

**Lýsing av málinum**
Seinastu árini hevur sølan av elbilum verið vaksandi, og í apríl 2024 vóru beint omanfyri 7% av øllum skrásettum persónbilum í Føroyum elbilar. Fyri elbilaeigarar í íbúðarbygningum kann tað vera trupult at at fáa atgongd til løðistøðir, um tað ikki er møguligt at knýta eina tílíka beinleiðis í íbúðina. Tískil heitti Elbilafelagið á Tórshavnar kommunu um at seta krav í sambandi við, at íbúðarbygningar verða bygdir, so hesir hava eina ávísa nøgd av løðistøðum, og at p-plássini eru gjørd klár til uppsetan av løðistøðum. Harumframt verður tað mett vera skilagott at seta krav um løðistøðir á størri p-plássum, t.d. á arbeiðsplássum, almennum p-plássum, við handlar og frítíðarvirksemi.

SEV viðmerkti málið 18. apríl 2024, og er av tí áskoðan, at tað er skilagott at seta krøv til fyrireiking til løðing av elbilum, serliga í mun til íbúðarbygging.

Síðani skrivið frá Elbilafelagnum er almenna byggisamtyktin broytt, og á heysti 2023 kom áseting í gildi fyri parkeringspláss til minst 10 bilar, sum krevur minst eina løðistøð umframt innleggingar til minst 20% av øllum p-plássum, soleiðis at møguligt er at seta løðistøðir upp.

**Lógir, ásetingar o.a.**
KAP III § 3. Øki til bilstøðil

1. Í 1. og 2. grundumráði skal bera til at seta aðrar treytir til parkering, um so er at ikki ber til at útvega øll tey ásettu parkeringsplássini.
2. Í 3. grundumráði skal í minsta lagi vera 2,5 pláss pr. hús, harav 0,5 á felags parkeringsøki.
3. Á parkeringsplássum til minst 10 bilar: a) Skal setast upp minst 1 løðistøð til el bilar. b) Innleggingar skulu leggjast til minst 20% av øllum parkeringsplássunum, soleiðis at møguligt er at seta løðistøðir til el bilar upp.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Fyrispurningurin frá Elbilafelagnum vísir til donsku ásetingarnar frá 2020. Umsitingin hevur týtt donsku ásetingarnar soleiðis:

| Slag av bygningi og bygging | Krav |
|---|---|
| Nýggjur íbúðarbygningur við fleiri enn 10 parkeringsplássum | Fyrireiking av innleggingum til øll parkeringsplássini |
| Nýggjur bygningurin, sum ikki er íbúðarbygningur, við fleiri enn 10 parkeringsplássum | Uppsetan av minst einari løðistøð og innlegging til minst 20% av parkeringsplássunum |
| Størri umbygging av íbúðarbygningi við fleiri enn 10 parkeringsplássum | Innlegging til øll umvældu parkeringsplássini |
| Størri umbygging av bygningi, sum ikki er íbúðarbygningur | Uppsetan av minst einari løðistøð og innlegging til minst 20% av umvældu parkeringsplássunum |

Umsitingin metir tað vera hóskandi at broyta almennu byggisamtyktina, samsvarandi ásetingunum omanfyri, soleiðis at tað m.a. framyvir verður krav, at innleggingar skulu gerast til 100% av øllum parkeringsplássum í sambandi við nýggja íbúðarbygging við fleiri enn 10 p-plássum.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at broyta § 3, stk 3, sum er ásetingar fyri krav um innleggingar til løðistøðir í almennu byggisamtyktini samsvarandi donsku krøvunum, og beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 13. mai 2024:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 30. mai 2024:** Einmælt samtykt.

# 132/24 Endurskoðan av byggisamtyktini fyri Hvítanes

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 12.02.2024 | 49/24 | 22/04933-1 |
| 2 Hvítanesnevndin | 04.04.2024 | 2/24 | 22/04933-1 |
| 3 Býráðsfundur | 30.05.2024 | 132/24 | 22/04933-1 |

**Upprunin til málið**
Í málinum *Endurskoðan av byggisamtyktunum fyri bygdirnar* er samtykt at endurskoða byggisamtyktirnar fyri allar bygdirnar í kommununi.

Fyri fleiri av bygdunum eru byggisamtyktirnar ikki vorðnar endurskoðaðar, síðani tær eru blivnar partur av Tórshavnar kommunu, og tí er í nógvum førum ósamsvar millum byggisamtyktirnar fyri bygdirnar og almennu byggisamtyktina fyri Tórshavnar kommunu. Harumframt er munur á, hvat loyvt verður í teimum ymisku bygdunum, og hetta ger byggisamtyktirnar fyri bygdirnar torskildar, truplar at umsita og viðførir ójavnvág í kommununi.

Í málinum *Endurskoðan av byggisamtyktunum fyri bygdirnar* eru yvirskipað viðurskifti viðgjørd við tí endamáli at fáa eins ásetingar í byggisamtyktunum fyri bygdirnar, tó við nøkrum frávikum, tá talan er um staðbundin viðurskifti, serstakan bygdadám og tílíkt.

Í hesum málinum verður byggisamtyktin fyri Hvítanes viðgjørd nærri, við støði í yvirskipaðu viðurskiftunum, sum eru viðgjørd í málinum *Endurskoðan av byggisamtyktunum fyri bygdirnar.*

**Lýsing av málinum**
Í uppskotinum til endurskoðan av byggisamtyktunum fyri bygdirnar verður mælt til, at bygdirnar Kirkjubøur, Velbastaður, Nólsoy, Hvítanes, Kaldbak og Hestur fáa hvør sína almenna byggisamtykt.

Mett verður ikki, at byggisamtyktirnar fyri bygdirnar skulu hava líka nógv ymisk øki, sum almenna byggisamtyktin hevur, av tí at talan er um minni bygdir, har ikki ber til at regulera virksemið eins neyvt og í høvuðsstaðnum. Tí eru tær ymisku ásetingarnar fyri allar bygdirnar samanbornar, og funnið er fram til nakrar felags ásetingar, ið hóska til allar bygdirnar.

Áðrenn endurskoðanina av byggisamtyktini fyri Hvítanes, eru hesi ymisku økini í bygdini:

A: Miðstaðaendamál
B: Sethúsabygging
E: Almenn endamál
F: Almenn Frítíðarøki
G: Neyst
Onnur endamál

Niðanfyri eru ásetingarnar í uppskotinum til endurskoðan av byggisamtyktini fyri Hvítanes, sum sambært uppskotinum eru tær somu fyri allar bygdirnar:

A: Bústaðarøki
B1: Havnarøki
B2: Vinnuøki
C: Miðstaðabygging
D1: Frílendi
D2: Almennir stovnar og mentan

E: Neyst
F: Frítíðarhús
G: Bóndahús
4. gr.: Landbúnaður

Sum sæst, so eru tað fleiri øki í uppskotinum til endurskoðan av byggisamtyktini fyri Hvítanes, enn tað eru áðrenn endurskoðanina.

Umframt tey økini, sum vóru áðrenn endurskoðanina, so eru B2: Havnarøki, B2 vinnuøki, F: Frítíðarhús og 4. grundumráði komin afturat.

Tær ávísu broytingarnar í økjum og ásetingum eru nærri lýstar í skjalinum *Hvítanes ásetingar – áðrenn og eftir broyting*, og ein meira yvirskipað lýsing er niðanfyri. Broytingar í kortunum eru at síggja í skjølunum *Áðrenn broyting* og *Eftir broyting.*

**Bústaðarøki**
Bústaðarøkini í Almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu loyva typologiunum stakhús, tvíhús, raðhús og íbúðir. Í bygdunum er ein meting gjørd av, hvør typologi skal loyvast í hvørjari bygd, gjørd út frá m.a. verandi bygging/ásetingum og bygdadámi.

Á Hvítanesi verður mett ráðiligt at loyva stakhúsum og tvíhúsum. Hvítanes er ein minni bygd og mett verður ikki, at íbúðarbygging og raðhúsabygging hóskar seg til dámin í bygdini.

Í sethúsaøkjum í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu er minsta grundstykkjavídd 500 m$^2$. Í bygdunum verður yvirskipað mett, at grundstykkini kunnu vera minni, og á Hvítanesi verður mett, at ein hóskandi minsta grundstykkjavídd er 300 m$^2$. Hetta m.a. grundað á verandi ásetingar fyri grundstykkjavídd á Hvítanesi og verandi víddir á grundstykkjum á Hvítanesi.

Ásetingar viðv. hædd, byggi- og nýtslustigi verða tær somu sum fyri sethúsaøki í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu.

**Miðstaðarøki**
Økið skal rúma virksemi sum t.d. stórir ella miðal stórir mentanarstovnar, samkomuhús og bygging til ferðavinnu. Tað er ikki vist, at øllum bygdum tørvar eitt tílíkt øki, og í summum førum kann serloyvi gevast til smærri handlar, vinnuvirkir og stovnar í bústaðarøkjum, um hetta natúrliga hoyrir býlinginum til.

**Almenn øki**
Umframt øki til almennar stovnar og mentan, verður tað í bygdunum mett at vera skilagott við einum øki til frílendi, har ikki er loyvt at byggja.

**Neystaøki og øki til frítíðarhús**
Ynski hevur leingi verið um at loyva frítíðarbústøðum í neystum, og mett verður, at ásetingarnar fyri neystaøkini í bygdunum skulu vera soleiðis, at til ber at hava frítíðarbústað á loftinum. Tó skulu nakrar treytir verða, t.d. skulu kloakkir og aðrar leiðingar gjaldast av neystaeigarunum og á niðastu hædd skal vera møguligt at hava bát.

Í bygdunum eiga somuleiðis at vera løgd av øki til frítíðarhús. Hesi eiga at liggja í útjaðaranum av bygdini, soleiðis at nærleiki er til almennar hentleikar, uttan at tey gera seg ov nógv inn á bygdalagið – í hesum sambandi eiga atlit, so sum stødd á øki, bygging, snið og tílíkt, at verða tikin. Í økjunum til frítíðarhús eigur ikki at vera møguligt at búgva alt árið, grundstykkini kunnu vera minni, og til ber at skipa tey annarleiðis enn vanlig bústaðarøki, við t.d. felags parkeringsplássum.

**Landbúnaðarøki**
Ásetingarnar fyri landbúnaðarøki verða tær somu sum fyri 4. Grundumráði í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu.

Í nøkrum av bygdunum var áðrenn endurskoðanina ein serskild áseting fyri øki til bóndahús. Hendan gav festarunum størri frælsi til at umvæla sethús síni, enn ásetingarnar fyri 4. Grundumráði geva. Tí ynskir man, at eitt øki, G: Bóndahús, verður í byggisamtyktunum fyri bygdirnar.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

- *Endurskoðan av byggisamtyktunum fyri bygdirnar,* journal nr. 20/04243.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

- *Hvítanes – áðrenn og eftir broyting,* journal nr. 22/04933-2.
- *Hvítanes – endurskoðað 11.01.24,* journal nr. 22/04933-3.
- *Áðrenn broyting,* journal nr. 22/04933-4.
- *Eftir broyting,* journal nr. 22/04933-4.
- *Serstøk byggisamtykt fyri Hvítanes – áðrenn broyting,* journal nr. 22/04933-5.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at samtykkja uppskotið til endurskoðan av byggisamtyktini fyri Hvítans sambært skjølunum *Hvítanes – endurskoðað 11.01.24* og Kort - *Eftir broyting* og beina málið í býráðið umvegis staðbundnu nevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 12. februar 2024:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Hvítanesnevndin 04. apríl 2024:** Kunnað varð um málið.

**Býráðsfundur 30. mai 2024:** Einmælt samtykt.

# 133/24 Endurskoðan av byggisamtyktini fyri Nólsoy

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 12.02.2024 | 50/24 | 22/04934-1 |
| 2 Nólsoyarnevndin | 03.04.2024 | 3/24 | 22/04934-1 |
| 3 Býráðsfundur | 30.05.2024 | 133/24 | 22/04934-1 |

**Upprunin til málið**
Í málinum *Endurskoðan av byggisamtyktunum fyri bygdirnar* er samtykt at endurskoða byggisamtyktirnar fyri allar bygdirnar í kommununi.

Fyri fleiri av bygdunum eru byggisamtyktirnar ikki vorðnar endurskoðaðar, síðani tær eru blivnar partur av Tórshavnar kommunu, og tí er í nógvum førum ósamsvar millum byggisamtyktirnar fyri bygdirnar og almennu byggisamtyktina fyri Tórshavnar kommunu. Harumframt er munur á, hvat loyvt verður í teimum ymisku bygdunum, og hetta ger byggisamtyktirnar fyri bygdirnar torskildar, truplar at umsita og viðførir ójavnvág í kommununi.

Í málinum *Endurskoðan av byggisamtyktunum fyri bygdirnar* eru yvirskipað viðurskifti viðgjørd við tí endamáli at fáa eins ásetingar í byggisamtyktunum fyri bygdirnar, tó við nøkrum frávikum, tá talan er um staðbundin viðurskifti, serstakan bygdadám og tílíkt.

Í hesum málinum verður byggisamtyktin fyri Nólsoy viðgjørd nærri, við støði í yvirskipaðu viðurskiftunum, sum eru viðgjørd í málinum *Endurskoðan av byggisamtyktunum fyri bygdirnar.*

**Lýsing av málinum**
Í uppskotinum til endurskoðan av byggisamtyktunum fyri bygdirnar verður mælt til, at bygdirnar Kirkjubøur, Velbastaður, Nólsoy, Hvítanes, Kaldbak og Hestur fáa hvør sína almenna byggisamtykt.

Mett verður ikki, at byggisamtyktirnar fyri bygdirnar skulu hava líka nógv ymisk øki, sum almenna byggisamtyktin hevur, av tí at talan er um minni bygdir, har ikki ber til at regulera virksemið eins neyvt og í høvuðsstaðnum. Tí eru tær ymisku ásetingarnar fyri allar bygdirnar samanbornar, og funnið er fram til nakrar felags ásetingar, ið hóska til allar bygdirnar.

Áðrenn endurskoðanina av byggisamtyktini fyri Nólsoy, eru hesi ymisku økini í bygdini:

A: Sethús
B: Vinnuendamál
C: Havnarøki
D: Almennir stovnar og mentan
E: Almenn frítíðarøki
F: Neyst og bátapláss
G: Friðað øki
H: Landbúnaður

Niðanfyri eru ásetingarnar í uppskotinum til endurskoðan av byggisamtyktini fyri Nólsoy, sum samært uppskotinum eru tær somu fyri allar bygdirnar:

A: Bústaðarøki
B1: Havnarøki
B2: Vinnuøki
C: Miðstaðabygging

D1: Frílendi
D2: Almennir stovnar og mentan
E: Neyst
F: Frítíðarhús
G: Bóndahús
4. gr.: Landbúnaður

Sum sæst, so eru tað fleiri øki í uppskotinum til endurskoðan av byggisamtyktini fyri Kaldbak, enn tað eru áðrenn endurskoðanina.

Umframt tey økini, sum vóru áðrenn endurskoðanina, so eru F: Frítíðarhús, G: Bóndahús og 4. grundumráði komin afturat.

Tær ávísu broytingarnar í økjum og ásetingum eru nærri lýstar í skjalinum *Nólsoy ásetingar – áðrenn og eftir broyting*, og ein meira yvirskipað lýsing er niðanfyri. Broytingar í kortunum eru at síggja í skjølunum *Kort - áðrenn broyting* og *Kort - eftir broyting.*

**Bústaðarøki**
Bústaðarøkini í Almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu loyva typologiunum stakhús, tvíhús, raðhús og íbúðir. Í bygdunum er ein meting gjørd av, hvør typologi skal loyvast í hvørjari bygd, gjørd út frá m.a. verandi bygging/ásetingum og bygdadámi.

I Nólsoy verður mett ráðiligt at loyva stakhúsum, tvíhúsum, raðhúsum og íbúðum. Bygdin hevur eina hóskandi stødd og dám, og mett verður, at dámurin í bygdini rúmar hesum typologium.

Í sethúsaøkjum í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu er minsta grundstykkjavídd 500 $m^2$. Í bygdunum verður yvirskipað mett, at grundstykkini kunnu vera minni, og í Nólsoy verður mett, at ein hóskandi minsta grundstykkjavídd er 300 $m^2$. Hetta m.a. grundað á verandi ásetingar fyri grundstykkjavídd í Nólsoy og verandi víddir á grundstykkjum í Kaldbak.

Ásetingar viðv. hædd, byggi- og nýtslustigi vera tær somu sum fyri sethúsaøki í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu.

**Miðstaðarøki**
Økið skal rúma virksemi sum t.d. stórir ella miðal stórir mentanarstovnar, samkomuhús og bygging til ferðavinnu. Tað er ikki vist, at øllum bygdum tørvar eitt tílíkt øki, og í summum førum kann serloyvi gevast til smærri handlar, vinnuvirkir og stovnar í bústaðarøkjum, um hetta natúrliga hoyrir býlinginum til.

**Almenn øki**
Umframt øki til almennar stovnar og mentan, verður tað í bygdunum mett at vera skilagott við einum øki til frílendi, har ikki er loyvt at byggja.

**Neystaøki og øki til frítíðarhús**
Ynski hevur leingi verið um at loyva frítíðarbústøðum í neystum, og mett verður, at ásetingarnar fyri neystaøkini í bygdunum skulu vera soleiðis, at til ber at hava frítíðarbústað á loftinum. Tó skulu nakrar treytir vera, t.d. skulu kloakkir og aðrar leiðingar gjaldast av neystaeigarunum, og á niðastu hædd skal vera møguligt at hava bát.

Í bygdunum eiga somuleiðis at vera løgd av øki til frítíðarhús. Hesi eiga at liggja í útjaðaranum av bygdini, soleiðis at nærleiki er til almennar hentleikar, uttan at tey gera seg ov nógv inn á bygdalagið – í hesum sambandi eiga atlit, so sum stødd á øki, bygging, snið og tílíkt at verða tikin. Í økjunum til frítíðarhús eigur ikki at vera møguligt at búgva alt árið, grundstykkini kunnu vera minni, og til ber at skipa tey annarleiðis enn vanlig bústaðarøki, við t.d. felags parkeringsplássum.

**Landbúnaðarøki**

Ásetingarnar fyri landbúnaðarøki verða tær somu sum fyri 4. grundumráði í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu.

Í nøkrum av bygdunum var áðrenn endurskoðanina ein serskild áseting fyri øki til bóndahús. Hendan gav festarunum størri frælsi til at umvæla sethús síni, enn ásetingarnar fyri 4. grundumráði geva. Tí ynskir man, at eitt øki, G: Bóndahús, verður í byggisamtyktunum fyri bygdirnar.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

- *Endurskoðan av byggisamtyktunum fyri bygdirnar,* journal nr. 20/0423.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

- *Kort – áðrenn broyting,* journal nr. 22/04934-2
- *Kort – eftir broyting,* journal nr. 22/04934-2
- *Byggisamtykt Nólsoy – endurskoðað 11.01.24,* journal nr. 22/04934-3
- *Byggisamtykt Nólsoy – áðrenn broyting,* journal nr. 22/04934-4
- *Nólsoy ásetingar – áðrenn og eftir broyting,* journal nr. 22/04934-5

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:**

Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at samtykkja uppskotið til endurskoðan av byggisamtyktini fyri Nólsoy sambært skjølunum *Byggisamtykt Nólsoy – endurskoðað 11.01.24* og *Kort – eftir broyting* og beina málið í býráðið umvegis staðbundnu nevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 12. februar 2024:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Nólsoyarnevndin 03. apríl 2024:** Kunnað varð um málið.

**Býráðsfundur 30. mai 2024:** Einmælt samtykt.

# 134/24 Endurskoðan av byggisamtyktini fyri Kaldbak

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 12.02.2024 | 51/24 | 22/04935-1 |
| 2 Kaldbaksnevndin | 02.04.2024 | 3/24 | 22/04935-1 |
| 3 Býráðsfundur | 30.05.2024 | 134/24 | 22/04935-1 |

**Upprunin til málið**
Í málinum *Endurskoðan av byggisamtyktunum fyri bygdirnar* er samtykt at endurskoða byggisamtyktirnar fyri allar bygdirnar í kommununi.

Fyri fleiri av bygdunum eru byggisamtyktirnar ikki vorðnar endurskoðaðar, síðani tær eru blivnar partur av Tórshavnar kommunu, og tí er í nógvum førum ósamsvar millum byggisamtyktirnar fyri bygdirnar og almennu byggisamtyktina fyri Tórshavnar kommunu. Harumframt er munur á hvat loyvt verður í teimum ymisku bygdunum, og hetta ger byggisamtyktirnar fyri bygdirnar torskildar, truplar at umsita og viðførir ójavnvág í kommununi.

Í málinum *Endurskoðan av byggisamtyktunum fyri bygdirnar* eru yvirskipaði viðurskifti viðgjørd við tí endamáli at fáa eins ásetingar í byggisamtyktunum fyri bygdirnar, tó við nøkrum frávikum, tá talan er um staðbundin viðurskifti, serstakan bygdadám og tílíkt.

Í hesum málinum verður byggisamtyktin fyri Kaldbak viðgjørd nærri, við støði í yvirskipaðu viðurskiftunum, sum eru viðgjørd í málinum *Endurskoðan av byggisamtyktunum fyri bygdirnar.*

**Lýsing av málinum**
Í uppskotinum til endurskoðan av byggisamtyktunum fyri bygdirnar verður mælt til, at bygdirnar Kirkjubøur, Velbastaður, Nólsoy, Hvítanes, Kaldbak og Hestur fáa hvør sína almenna byggisamtykt.

Mett verður ikki, at byggisamtyktirnar fyri bygdirnar skulu hava líka nógv ymisk øki, sum almenna byggisamtyktin hevur, av tí at talan er um minni bygdir, har ikki ber til at regulera virksemið eins neyvt og í høvuðsstaðnum. Tí eru tær ymisku ásetingarnar fyri allar bygdirnar samanbornar, og funnið er fram til nakrar felags ásetingar, ið hóska til allar bygdirnar.

Áðrenn endurskoðanina av byggisamtyktini fyri Kaldbak, eru hesi ymisku økini í bygdini:

A: Sethúsabygging
B: Almenn endamál
C: Havnar – og vinnuendamál
D: Miðstaðarøki

Niðanfyri eru ásetingarnar í uppskotinum til endurskoðan av byggisamtyktini fyri Kaldbak, sum sambært uppskotinum eru tær somu fyri allar bygdirnar:

A: Bústaðarøki
B1: Havnarøki
B2: Vinnuøki
C: Miðstaðabygging

D1: Frílendi
D2: Almennir stovnar og mentan
E: Neyst
F: Frítíðarhús
G: Bóndahús
4. gr.: Landbúnaður

Sum sæst, so eru tað fleiri øki í uppskotinum til endurskoðan av byggisamtyktini fyri Kaldbak, enn tað eru áðrenn endurskoðanina.

Umframt tey økini, sum vóru áðrenn endurskoðanina, so eru D1: Frlendi, E: Neyst, F: Frítíðarhús, G: Bóndahús og 4. grundumráði komin afturat. Økið til Havnar- og vinnuendamál er koyrt í hvør sítt øki.

Tær ávísu broytingarnar í økjum og ásetingum eru nærri lýstar í skjalinum *Kaldbak ásetingar – áðrenn og eftir broyting*, og ein meira yvirskipað lýsing er niðanfyri. Broytingar í kortunum eru at síggja í skjølunum *Kort - áðrenn broyting* og *Kort - eftir broyting.*

**Bústaðarøki**
Bústaðarøkini í Almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu loyva typologiunum stakhús, tvíhús, raðhús og íbúðir. Í bygdunum er ein meting gjørd av, hvør typologi skal loyvast í hvørjari bygd, gjørd út frá m.a. verandi bygging/ásetingum og bygdadámi.

Í Kaldbak verður mett ráðiligt at loyva stakhúsum og tvíhúsum. Kaldbak er ein minni bygd, og mett verður ikki, at íbúðarbygging og raðhúsabygging hóskar seg til dámin í bygdini.

Í sethúsaøkjum í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu er minsta grundstykkjavídd 500 m$^2$. Í bygdunum verður yvirskipað mett, at grundstykkini kunnu vera minni, og í Kaldbak verður mett, at ein hóskandi minsta grundstykkjavídd er 400 m$^2$. Hetta m.a. grundað á verandi ásetingar fyri grundstykkjavídd í Kaldbak og verandi víddir á grundstykkjum í Kaldbak.

Ásetingar viðv. hædd, byggi- og nýtslustig vera tær somu sum fyri sethúsaøki í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu.

**Miðstaðarøki**
Økið skal rúma virksemi sum t.d. stórir ella miðal stórir mentanarstovnar, samkomuhús og bygging til ferðavinnu. Tað er ikki vist, at øllum bygdum tørvar tílíkt øki, og í summum førum kann serloyvi gevast til smærri handlar, vinnuvirkir og stovnar í bústaðarøkjum, um hetta natúrliga hoyrir býlinginum til.

**Almenn øki**
Umframt øki til almennar stovnar og mentan, verður tað í bygdunum mett at vera skilagott við einum øki til frílendi, har ikki ber til at byggja.

**Neystaøki og øki til frítíðarhús**
Ynski hevur leingi verið um at loyva frítíðarbústøðum í neystum, og mett verður, at ásetingarnar fyri neystaøkini í bygdunum skulu vera soleiðis, at til ber at hava frítíðarbústað á loftinum. Tó skulu nakrar treytir vera, t.d. skulu kloakkir og aðrar leiðingar gjaldast av neystaeigarunum, og á niðastu hædd skal vera møguligt at hava bát.

Í bygdunum eiga somuleiðis at vera løgd av øki til frítíðarhús. Hesi eiga at liggja í útjaðaranum av bygdini, soleiðis at nærleiki er til almennar hentleikar, uttan at tey gera seg ov nógv inn á bygdalagið – í hesum sambandi eiga atlit, so sum støðd á øki, bygging, snið og tílíkt, at verða tikin. Á økjunum til frítíðarhús eigur ikki at vera møguligt at búgva alt árið, grundstykkini kunnu vera minni, og til ber at skipa tey annarleiðis enn vanlig bústaðarøki, við t.d. felags parkeringsplássum.

**Landbúnaðarøki**

Ásetingarnar fyri landbúnaðarøki verða tær somu sum fyri 4. grundumráði í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu.

Í nøkrum av bygdunum var áðrenn endurskoðanina ein serskild áseting fyri øki til bóndahús. Hendan gav festarunum størri frælsi til at umvæla sethús síni, enn ásetingarnar fyri 4. grundumráði geva. Tí verður ynskt, at eitt øki, G: Bóndahús, verður í byggisamtyktunum fyri bygdirnar.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

- *Endurskoðan av byggisamtyktunum fyri bygdirnar,* journal nr. 20/04243.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

- *Kaldbak ásetingar – áðrenn og eftir broyting,* journal nr. 22/04935-2.
- *Byggisamtykt fyri Kaldbak – endurskoðað 11.01.24*, journal nr. 22/04935-3.
- *Byggisamtykt fyri Kaldbak – áðrenn broytin,* journal nr. 22/04935-4.
- *Kort – áðrenn broyting,* journal nr. 22/04935-5.
- *Kort – eftir broyting,* journal nr. 22/04935-5.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/léttar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at samtykkja uppskotið til endurskoðan av byggisamtyktini fyri Kaldbak sambært skjølunum *Kaldbak – endurskoðað 11.01.24* og *Kort – eftir broyting* og beina málið í býráðið umvegis staðbundnu nevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 12. februar 2024:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Kaldbaksnevndin 02. apríl 2024:** Kunnað var um málið.

**Býráðsfundur 30. mai 2024:** Einmælt samtykt.

# 135/24 Broyting av byggisamtyktini fyri matr. nr. 320a, Kollafjørður. Frá B1 til D1

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 17.04.2023 | 54/23 | 23/01978-1 |
| 2 Býráðsfundur | 27.04.2023 | 103/23 | 23/01978-1 |
| 3 Byggi- og býarskipanarnevndin | 13.05.2024 | 96/24 | 23/01978-1 |
| 4 Býráðsfundur | 30.05.2024 | 135/24 | 23/01978-1 |

**Upprunin til málið**
Í sambandi við at uppskot til endurskoðan av byggisamtyktini fyri Kollafjørð hevur ligið til almenna hoyring, sí mál *Endurskoðan av byggisamtyktini fyri Kollafjørð*, hevur Tjóðsavnið sent áheitan til Tórshavnar kommunu um at broyta byggisamtyktina fyri part av matr. nr. 320a suðuri á Oyrini á Signabø til eitt D1 øki ístaðin fyri 4. Grundumráði.

**Lýsing av málinum**
Tórshavnar kommuna hevði lagt uppskot fram um at avtaka B1 vinnuøki á matr. nr. 320a, Kollafjørður. Tjóðsavnið tekur undir við, at B1 økið verður avtikið, men heitir á Tórshavnar kommunu um at leggja økið sum D1 øki ístaðin. Orsøkin til áheitanina er, at:

- Levdir av gomlu hvalastøðini á Signabø eru í lendinum, eins og aðrar leivdir eru fram við ánni oman móti ósanum. Hvalastøðin, ið varð bygd í 1902, var ein av teimum fyrstu, ið vóru bygdar í Føroyum. Støðin var virkin til 1912 og hevur í dag ein søguligan týdning sum ídnaðarminni og fyri samleikan á staðnum.
- Ein áseting sum 4. grundumráði kann hava við sær vanda fyri landbúnaðarvelting við stórum maskinum og bygging av landbúnaðarbygningum.
- At leggja økið sum D1 øki gevur betri møguleika fyri at gera økið atkomuligt.

Umsitingin hjá Tórshavnar kommunu tekur undir við Tjóðsavninum, og metir tað vera hóskandi at leggja økið sum D1 øki, soleiðis at tað verður vart fyri teimum inntrivum, sum landbúnaður kann hava við sær.

B1 økið, ið verður avtikið, sæst á kortskjali *B1.* Uppskot til ítøkiliga hvat øki eigur at verða lagt sum D1 øki, verður gjørt í samráð við Tjóðsavnið.

Talan er um búnaðarjørð, so uppskotið verður sent Búnaðarstovuni til viðmerkingar.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Ásetingar fyri B1 øki í almennu byggisamtyktini eru m.a.:

- Umráðisparturin verður sum heild lagdur til endamál, ið hava beinleiðis við havnarakstur at gera, fyrst og fremst, skrivstovur og goymslur í sambandi við skipagreiðslu og vøruflutning og tílíkt, og til virksemi, ið hava samband við hesi, t.e. tænastuvirksemi og bilstøðlar o.t.

Ásetingar fyri D1 øki í almennu byggisamtyktini eru m.a.:

- Umráðispartarnir D1 verða í síni heild lagdir til almenning, náttúrufriðingar- og mentunarlig endamál og tílíkt.

Ásetingar fyri 4. Grundumráði í almennu byggisamtyktini eru m.a.:

- 4. grundumráði verður í høvuðsheitum nýtt til landbúnað og alment frílendi og tílíkt.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Broytingin av byggisamtyktini fyri B1 øki á Signabø byrjaði sum partur av máli um endurskoðan av byggisamtyktini fyri Kollafjørð, sí mál *Endurskoðan av byggisamtyktini fyri Kollafjørð.* Av tí at fleiri broytingar eru í tí málinum, og viðmerkingin frá Tjóðsavninum einans snýr seg um B1 økið á Signabø, so

er nýtt mál uppræetta hesum viðvíkjandi, soleiðis at arbeiðið at fremja hinar broytingarnar í Kollafirði kann halda áfram.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

- *Endurskoðan av byggisamtyktini fyri Kollafjørð,* journal nr. 22/00463.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

- *Braev_ut-TSF_t_Torshavnar_k-Hoyringssvar_broyting_byggisamtykt_Signaboe.pdf,* journal nr. 23/01978-2.
- *B1,* journal nr. 23/01978-5.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:**

Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla nevndini til at heimila umsitingini at gera uppskot til broyting av byggisamtyktini, har hvalastøðin á Signabø er, til D1 øki í samráði við Tjóðsavni, treytað av tilsøgn frá Búnaðarstovuni, og beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 17. apríl 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 27. apríl 2023:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti**

Eftir at uppskotið varð samtykt, gjørdi umsitingin uppskot, har nýtt D1 øki varð teknað kring toftirnar frá hvalastøðini (sí uppskot *Eftir broyting,* journal nr. 23/01978-15). Uppskotið fekk tilsøgn frá Tjóðsavninum, og varð sent til almenna hoyring í tíðarskeiðinum 20. februar til 2. apríl, umframt at uppskotið varð sent Búnaðarstovuni og festaranum til hoyringar. Tá ið freistin var farin, hevði kommunan móttikið tvey mótmæli. Eitt frá Búnaðarstovuni og eitt frá festara. Bæði mæla kommununi frá at broyta øki til D1, og heldur at broyta ásetingarnar fyri økið til landbúnaðarøki (4. grundumráði).

Mótmælið frá Búnaðarstovuni vísir á týdningin at varðveita avmarkaða landbúnaðarlendið í Føroyum. Í mótmælisskrivinum frá festaranum, ið varðar av haganum á matr.nr. 320a stendur, at hetta økið hevur stóran týdning fyri dagliga arbeiðið á garðinum, serliga um várið, tá ið ærnar brúka stóra grótgarðin sum lívd. Bóndin sigur seg ikki ynskja at broyta økið stórvegis, og vísir á, at gamla hvalastøðin hevur virði fyri garðin, tá ið ferðafólk vitja.

Umsitingin hevur viðgjørd viðmerkingarnar og mælir til at ganga mótmælunum á møti, soleiðis at økið verður broytt til 4. grundumráði, sí *Kollafjørður – eftir broyting,* journal nr. 23/01978-3. Orsøkin er, at ásetingar fyri 4. grundumráði verja økið fyri stórvegis broytingum, í og við at nýggj bygging ikki kann fara fram uttan serstaka byggisamtykt. Harafturat forða ásetingarnar fyri 4. grundumráði ikki Tjóðsavninum at verja og menna søguliga týdningin av gomlu hvalastøðini, í samstarvi við festaran.

**Nýggj skjøl**
*Svar frá Búnaðarstovuni til TK, til uppskot um broyting av byggisamtykt fyri part av matr.nr. 320a, Kollafjarðar bygd, suðuri á Oyrini á Signabø frá B1 øki til D1 øki í samráð við Tjóðsavnið,* jnr. 12/01978-16
*Viðmerking til broyting í byggisamtykt.msg,* jnr. 12/01978-16
*Eftir broyting,* jnr. 23/01978-15
*Kollafjørður - eftir broyting,* jnr: 23/01978-3

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla nevndini til at broyta B1 øki til 4. grundumráði ætlað landbúnaði, sambært skjalinum *Kollafjørður - eftir broyting, journal nr.* 23/01978-3, og beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 13. mai 2024:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 30. mai 2024:** Einmælt samtykt.

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>30. mai 2024 | Blað nr.: 578 |
| | Formansins merki: |

# 136/24 Kanningar flogvøllur á Glyvursnesi

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 22.05.2024 | 146/24 | 24/02743-1 |
| 2 Býráðsfundur | 30.05.2024 | 136/24 | 24/02743-1 |
| 3 Býráðsfundur | | | 24/02743-1 |

**Upprunin til málið**
Borgarstjórin setir fram uppskot um staðseting flogvøll á Glyvursnesi.

**Lýsing av málinum**
Ætlan at gera floghavn ella flogvøll á Glyvursnesi er frá 1980´unum. Veðurkanningar vísa, at møguleikar er fyri betri reglusemi í flogferðsluni. Flogvøllurin skal eisini kunna taka ímóti størri flogførum. Stór menning er í flogferðsluni bæði við ferðafólkum og farmi.

Rambøll gjørdi í 2019 nýggja kanning av óljóði og frástøðu til verndi býarøki og framtíðar býarvakstrarøki á Hamrinum og undir Kirkjubøreyni verða sambært árinskanningini ikki órógvað av óljóði frá flogvøllinum. Samstundis gongur tøkniliga menningin tann vegin,
at flogførini yvirhøvur geva minni ljóð frá sær.

Fáast skal til vega tilfar, ið lýsir, hvussu flogvøllur, ið er uml. 2.700-3.000 metrar langur og sum lýkur krøv til breidd til altjóða flúgving, best kann staðsetast í økinum.

Haraftrat skal gerast tilfar um, hvussu flogvøllurin kemur at síggja út í mun til hædd o.a. í lendinum, og sum kann geva ábendingar um, hvussu lendisarbeiðið kann skipast.

Endamál við hesum er at fáa betri grundarlag til víðari fyrireikingar, harímillum skipanarlig og fíggjarlig viðurskifti, og at har úrslitið av hesum verður lagt aftur fyri býráðið til politiska støðutakan.

Borgarstjórin skjýtur upp at játta kr. 500.000 til endamálið av LK61027 Dagføring kommunalir bygningar (Sjóvinnuhúsið).

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>30. mai 2024 | Blað nr.: 579<br><br>Formansins merki: |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | x | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei
**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☒
Eyka játtan ☐
Lokað verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| 6175 | LK61027 | Dagføring kommunalir bygningar | | | | | 500.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | 500.000 |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli:**
Kommunustjórin mælir til at umrøða málið.

**Fíggjarnevndin 22. mai 2024:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein og Tróndur Sigurðsson, tekur undir við, at 500.000 kr. verða játtaðar av LK av LK61027 Dagføring kommunalir bygningar (Sjóvinnuhúsið). Málið beint í býráðið sum eykajáttanarmál, ið tørvar tvær viðgerðir.

Ein minniluti, Annika Olsen og Gunvør Balle, taka støðu til málið í býráðnum.

**Býráðsfundur 30. mai 2024:** Fyrst varð atkvøtt um broytingaruppskotið frá Tjóðveldi, í er soljóðandi:

«Tjóðveldi mælir til at 500.000 kr. sum skulu brúkast til flogvallakanningar, ístaðin verða játtaðar til umhvørvisdeildina»

4 atkvøður vóru fyri, 8 ímóti og 1 blank

Fyri atkvøddu: Turið Horn, Jákup Dam, Gunvør Balle og Annika Olsen.

Ímóti atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Súna Mørk, Bjørg Dam og Birgir Nielsen.

Blankt atkvøddi: Súsanna Olsen.

Síðani var atkvøtt um tilmæli frá fíggjarnevndini í var samtykt við fyrstu viðgerð við 8 atkvøðum fyri, 4 ímóti og 1 blank og beint víðari til aðru viðgerð.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigursson, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Súna Mørk, Bjørg Dam og Birgir Nielsen.

Ímóti atkvøddu: Turið Horn, Jákup Dam, Gunvør Balle og Annika Olsen.

Blankt atkvøddi: Súsanna Olsen.

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>30. mai 2024 | Blað nr.: 581<br>Formansins merki: |

# 137/24 Uppskot um at hækka talið á býráðslimum

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 22.05.2024 | 147/24 | 24/02715-1 |
| 2 Býráðsfundur | 30.05.2024 | 137/24 | 24/02715-1 |

**Upprunin til málið**
Annfinn Brekkstein biður um at fáa málið “Uppskot um at hækka talið á býráðslimum” á skrá til støðutakan til komandi fíggjarnevndarfund og býráðsfund.

**Lýsing av málinum**
Uppskot at leggja fyri fíggjarnevnd og Býráð til støðutakan at broyta talið á býráðslimum frá 13 til 15 frá komandi valskeiði.

Undirritaði býráðslimur leggur við hesum uppskot at broyta talið á býráðslimum frá 13 til 15 býráðslimir frá komandi valskeiði at rokna.

Talið á býráðslimum hevur verið 13 síðani 1972, tá fólkatalið var 10.747, hetta var áðrenn kommunusamanleggingarnar byrjaðu. Tað vil siga, at tað tá vóru 827 borgarar fyri hvønn býráðslimin.

Fleiri kommunusamanleggingar vóru árini frá 1978 og til 2005, har fólkatalið og landafrøðiliga økið vaks nógv.

Fólkatalið 1. januar 2024 var í Tórshavnar kommunu 23.228. Hettar gevur 1.787 borgarar fyri hvønn býráðslimin.

Mítt sjónarmið er, at tíðin er komin at broyta talið á býráðslimum upp til 15, hetta fyri at fáa eina betri fólkaræðisliga umboðan í høvuðsstaði okkara.

Kommunan er meira enn tvífalt so stór í fólkatali síðani býráðið varð skipað við 13 býráðslimum. Eisini eru kanningar gjørdar (m.a. av Beintu í Jákupsstovu um kommunupolitikk, sum greitt vísa á, at borgarin í høvuðsstaði okkara er undirumboðaður.

Við at broyta talið á býráðslimun upp til 15, so fáa vit eina betri fólksliga umboðan og koma okkara fólkaræðinum nærri. Við støði í fólkatalinum 1. januar í ár, vil umboðanin verða 1.548 borgarar fyri hvønn býráðslimin.

Fyri at fáa so breiða fólksliga umboðan eiga samsýningarnar til býráðslimir eisini at verða broyttar, hetta fyri at øll hava møguleika at stilla upp til eitt kommunuval. Tí sum nú er, eru mínar drúgva royndir tær, at fólk aftra seg at stilla upp, tí tey missa alt ov stórar inntøkur í mun til samsýningina, sum er galdandi í dag sum býráðslimur. Hetta er ikki í samsvari við nútíðina, og eigur tí at broytast, so at øll fólk kunnu stilla upp til politisk val.

Eg havi eisini uppskot til, hvussu býtið av nevndum kundi sæð soleiðis út. Tað verður sjálvandi avgjørt, tá ið samgonga verður skipað, men her er eitt boð:

- Fíggjarnevnd
- Mentamálanevnd
- Byggi- og býarskipanarnevnd
- Tekniska nevnd
- Eldranevnd
- Havnanevnd

- Náttúru- og umhvørvisnevnd
- Barna- og ungdómsnevnd
- Trivnaðarnevnd

Hettar er bert eitt dømi.

Sum kunnugt er heimild til at fara uppá 17 býráðslimir, men mín hugsan er at byrja við 15 býráðslimum.

Undirritaði biður um at fáa hetta mál á skrá til støðutakan til komandi fíggjarnevndarfund og víðari í býráðið til endaliga støðutakan.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl** 24/02715-2 Uppskot at leggja fyri fíggjarnevnd og Býráðið til støðutakan. Broyta talið á býráðslimum.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:**
Kommunustjórin mælir til at umrøða málið.

**Fíggjarnevndin 22. mai 2024:** Málið umrøtt og beint í býráðið til nærri umrøðu.

**Býráðsfundur 30. mai 2024:** Umrøtt.

| | | |
|---|---|---|
| | **Býráðsfundur**<br>30. mai 2024 | Blað nr.: 583 |
| | | Formansins merki: |

# 138/24 Framflytingar fyri roknskaparárið 2023

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 17.04.2024 | 102/24 | 24/02033-1 |
| 2 Býráðsfundur | 24.04.2024 | 106/24 | 24/02033-1 |
| 3 Býráðsfundur | 30.05.2024 | 138/24 | 24/02033-1 |

**Upprunin til málið**
Sambært játtanarreglunum hjá Tórshavnar kommunu verða meir- og minninýtslur fluttar fram til komandi ár. Framflytingar skulu játtat sum eykajáttan í býráðnum, tvs. skulu hava tvær viðgerðir.

Meirnýtsla, sum í mesta lagi kann vera 5% av nettojáttanini, verður flutt til næsta ár.

Meirnýtsla skal vera burtur innan trý ár. Minninýtsla, sum í mesta lagi kann vera 10% av nettojáttanini, verður flutt til næsta ár. Um serlig viðurskifti gera seg galdandi, og ynski er at flyta meira enn 10% til árið eftir, kann ein umbøn um hetta sendast avvarðandi fyrisitingarstjóra.

**Lýsing av málinum**
Ársroknskapurin fyri 2023 er gjørdur upp, og gjørt er eitt yvirlit yvir rakstrar- og íløgujáttanir at flyta fram til 2023.

Samlaða framflytingin íroknað Tórshavnar Havn er fyri rakstur -11 mió. kr. netto og fyri íløgur 271 mió. kr., í alt 260 mió. kr., og er útgreinað soleiðis:

| | **Rakstur** | **Íløgur** |
|---|---|---|
| TK | -18,7 mió | 192,9 mió |
| TH | 7,7 mió | 78,1 mió |
| **Íalt** | **-11,0 mió** | **271,0 mió** |

Samlaða meirnýtslan á rakstrarsíðuni fyri Tórshavnar kommunu frároknað Tórshavnar havn er 18,7 mió. kr. Á § 1,2 og 4 er talan um minninýtslu, í meðan tað á § 3,5,6 og 7 er talan um meirnýtslu.

Víst verður til uppskot til broytingar í framflytingum í skjali 24/02088.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| **Býráðsfundur**<br>30. mai 2024 | Blað nr.: 584 |
|---|---|
| | Formansins merki: |

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☐
Eyka játtan ☒
Lokað verkætlan ☐

| Játtast av: | | |
|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** |
| Ymiskar | | Framflutt 2023 |

| Játtast á: | | | |
|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** |
| Ymiskar | | Játtan 2024 | |

| **Upphædd** |
|---|
| 260,0 mió. |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli:**
Stjórnin mælir til at játtað framflyting á -11 mió. kr. til rakstur og 271 mió. kr. til íløgur. Eisini verður mælt til at gera broytingar í framflytingini sambært viðlagda skjali nr. 24/02088-1.

**Fíggjarnevndin 17. apríl 2024:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið at viðgera tvær reisir sum eykajáttanarmál.

**Býráðsfundur 24. apríl 2024:** Einmælt samtykt við fyrstu viðgerð og beint víðari til aðru viðgerð.

**Býráðsfundur 30. mai 2024:** Einmælt samtykt við aðru viðgerð.

# 139/24 Góðkenning av mánaðarroknskapinum 2024

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 21.02.2024 | 47/24 | 24/00061-1 |
| 2 Býráðsfundur | 29.02.2024 | 46/24 | 24/00061-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 20.03.2024 | 79/24 | 24/00061-1 |
| 4 Býráðsfundur | 21.03.2024 | 69/24 | 24/00061-1 |
| 5 Fíggjarnevndin | 17.04.2024 | 103/24 | 24/00061-1 |
| 6 Býráðsfundur | 24.04.2024 | 107/24 | 24/00061-1 |
| 7 Fíggjarnevndin | 22.05.2024 | 145/24 | 24/00061-1 |
| 8 Býráðsfundur | 30.05.2024 | 139/24 | 24/00061-1 |

**Upprunin til málið**
Sambært kunngerð nr. 89 frá 15. oktober 2008 um roknskaparverk kommununnar o.t. §10 skulu kommunur innraportera roknskapardátur hvønn mánað til Fíggjarmálaráðið.

Sambært § 9 skal kommunustýrið góðkenna.

**Lýsing av málinum**

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

| | | |
|---|---|---|
| Býráðsfundur<br>30. mai 2024 | | Blað nr.: 586 |
| | | Formansins merki: |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:**
Roknskapurin fyri januar verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 21. februar 2024:** Framlagt og góðkent.

**Býráðsfundur 29. februar 2024:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri februar verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 20. mars 2024:** Framlagt.

**Býráðsfundur 21. mars 2024:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri mars verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 17. apríl 2024:** Framlagt og góðkent.

**Býráðsfundur 24. apríl 2024:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri apríl verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 22. mai 2024:** Framlagt og góðkent.

**Býráðsfundur 30. mai 2024:** Einmælt samtykt.

# 140/24 Serstøk nevnd at fyrireika nýggjan svimjihyl

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 23.04.2015 | 83/15 | 15/01400-1 |
| 2 Mentamálanevndin | 25.05.2016 | 148/16 | 15/01400-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 08.06.2016 | 225/16 | 15/01400-1 |
| 4 Mentamálanevndin | 15.06.2016 | 174/16 | 15/01400-1 |
| 5 Tekniska nevnd | 13.06.2016 | 70/16 | 15/01400-1 |
| 6 Byggi- og býarskipanarnevndin | 14.06.2016 | 179/16 | 15/01400-1 |
| 7 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 16.06.2016 | 46/16 | 15/01400-1 |
| 8 Býráðsfundur | 16.06.2016 | 163/16 | 15/01400-1 |
| 9 Mentamálanevndin | 06.12.2016 | 314/16 | 15/01400-1 |
| 10 Fíggjarnevndin | 07.12.2016 | 402/16 | 15/01400-1 |
| 11 Býráðsfundur | 15.12.2016 | 329/16 | 15/01400-1 |
| 12 Býráðsfundur | 26.01.2017 | 46/17 | 15/01400-1 |
| 13 Mentamálanevndin | 16.10.2017 | 266/17 | 15/01400-1 |
| 14 Býráðsfundur | 02.03.2017 | 77/17 | 15/01400-1 |
| 15 Fíggjarnevndin | 15.11.2017 | 270/17 | 15/01400-1 |
| 16 Býráðsfundur | 22.11.2017 | 266/17 | 15/01400-1 |
| 17 Mentamálanevndin | 10.01.2018 | 8/18 | 15/01400-1 |
| 18 Mentamálanevndin | 07.03.2018 | 82/18 | 15/01400-1 |
| 19 Mentamálanevndin | 12.09.2018 | 277/18 | 15/01400-1 |
| 20 Býráðsfundur | 22.03.2018 | 52/18 | 15/01400-1 |
| 21 Fíggjarnevndin | 19.09.2018 | 260/18 | 15/01400-1 |
| 22 Býráðsfundur | 27.09.2018 | 214/18 | 15/01400-1 |
| 23 Mentamálanevndin | 28.11.2018 | 364/18 | 15/01400-1 |
| 24 Fíggjarnevndin | 05.12.2018 | 350/18 | 15/01400-1 |
| 25 Býráðsfundur | 13.12.2018 | 312/18 | 15/01400-1 |
| 26 Mentamálanevndin | 08.05.2019 | 157/19 | 15/01400-1 |
| 27 Fíggjarnevndin | 15.05.2019 | 127/19 | 15/01400-1 |
| 28 Býráðsfundur | 23.05.2019 | 106/19 | 15/01400-1 |
| 29 Mentamálanevndin | 17.06.2019 | 213/19 | 15/01400-1 |
| 30 Býráðsfundur | 20.06.2019 | 149/19 | 15/01400-1 |
| 31 Mentamálanevndin | 24.06.2019 | 223/19 | 15/01400-1 |
| 32 Mentamálanevndin | 03.07.2019 | 229/19 | 15/01400-1 |
| 33 Fíggjarnevndin | 03.07.2019 | 215/19 | 15/01400-1 |
| 34 Býráðsfundur | 04.07.2019 | 185/19 | 15/01400-1 |
| 35 Mentamálanevndin | 15.04.2020 | 107/20 | 15/01400-1 |
| 36 Fíggjarnevndin | 22.04.2020 | 100/20 | 15/01400-1 |
| 37 Býráðsfundur | 30.04.2020 | 77/20 | 15/01400-1 |
| 38 Mentamálanevndin | 10.06.2020 | 183/20 | 15/01400-1 |
| 39 Mentamálanevndin | 24.08.2020 | 215/20 | 15/01400-1 |
| 40 Fíggjarnevndin | 25.08.2020 | 199/20 | 15/01400-1 |
| 41 Býráðsfundur | 25.08.2020 | 166/20 | 15/01400-1 |
| 42 Mentamálanevndin | 06.11.2020 | 297/20 | 15/01400-1 |
| 43 Fíggjarnevndin | 06.11.2020 | 294/20 | 15/01400-1 |
| 44 Býráðsfundur | 06.11.2020 | 251/20 | 15/01400-1 |
| 45 Mentamálanevndin | 19.10.2021 | 254/21 | 15/01400-1 |
| 46 Fíggjarnevndin | 20.10.2021 | 278/21 | 15/01400-1 |
| 47 Býráðsfundur | 28.10.2021 | 254/21 | 15/01400-1 |
| 48 Mentamálanevndin | 09.02.2022 | 34/22 | 15/01400-1 |
| 49 Fíggjarnevndin | 16.02.2022 | 35/22 | 15/01400-1 |

| | | | |
|---|---|---|---|
| 50 Býráðsfundur | 24.02.2022 | 42/22 | 15/01400-1 |
| 51 Mentamálanevndin | 30.11.2022 | 222/22 | 15/01400-1 |
| 52 Mentamálanevndin | 07.06.2023 | 112/23 | 15/01400-1 |
| 53 Fíggjarnevndin | 14.06.2023 | 162/23 | 15/01400-1 |
| 54 Býráðsfundur | 21.06.2023 | 157/23 | 15/01400-1 |
| 55 Mentamálanevndin | 11.03.2024 | 56/24 | 15/01400-1 |
| 56 Fíggjarnevndin | 13.03.2024 | 62/24 | 15/01400-1 |
| 57 Fíggjarnevndin | 17.04.2024 | 85/24 | 15/01400-1 |
| 58 Mentamálanevndin | 15.05.2024 | 129/24 | 15/01400-1 |
| 59 Fíggjarnevndin | 22.05.2024 | 136/24 | 15/01400-1 |
| 60 Fíggjarnevndin | 30.05.2024 | 153/24 | 15/01400-1 |
| 61 Býráðsfundur | 30.05.2024 | 140/24 | 15/01400-1 |

**Málslýsing**:
Til tess skjótt at fáa gongd á at betra umstøðurnar til almenna svimjing og kappingarsvimjing í høvuðsstaðarøkinum, verður bygginevndin til 50 m svimjihyl tikin av, og í staðin verður serstøk nevnd við tilvísing til fíggjarnevndina sett at gera allar neyðugar fyrireikingar til bygging av svimjihøll, herundir at:

- Gera neyva tørvslýsing av nýggjari svimjihøll til almenna svimjing og kappingarsvimjing, herundir lýsing av, hvussu verandi svimjihallir í høvuðsstaðarøkinum kunnu nýtast til at nøkta partar av nýtslutørvinum
- Gera uppskot til staðseting av nýggjari høll
- Gera byggiskrá til verkætlan, herundir hølistørv, teknisk krøv og orkukrøv
- Gera kostnaðarmeting og tíðarætlan fyri bygging
- Gera rakstrarætlan, t.e. roknað meting um árligar rakstrarkostnaðir
- Gera uppskot til fígging, herundir møguleikar at fáa til vega fígging frá uttanhýsis pørtum

Serstaka nevndin fyri bygging av svimjihøll verður mannað við politiskum umboðum og umboðum fyri trivnaðarfyrisitingina og teknisku fyrisiting. Fíggjarnevndin setir nevndina, sum í minsta lagi 2. hvønn mánaða leggur statusfrágreiðing fyri mentamálanevndina og fíggjarnevndina, ið skal góðkenna arbeiðið.

**Býráðsfundir 23. apríl 2015:** Samtykt við 10 atkvøðum fyri og ongari ímóti, at seta serstaka nevnd undir fíggjarnevndini at fyrireika nýggja svimjihøll við omanfyristandandi arbeiðssetningi og at velja Elin Lindenskov og Annfinn Brekkstein í nevndina.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Elin Lindenskov, Bjørg Dam, Helena Dam á Neystabø, Sigrún Mohr, Tróndur Sigurdsson, Rúni Djurhuus, Bogi Andreasen, Annfinn Brekkstein og Sjúrður Olsen.

Greiddu ikki atkvøðu: Jógvan Arge, Jákup Dam og Marin Katrina Frýdal.

**Ískoyti:**
Bygginevndin hevur 23. mai 2016 samtykt byggiskrá fyri byggiverkætlanina. Byggiskráin er hjáløgd sum fylgiskjal 1 og svarar hon uppá settu spurningarnar og punktini.

Tó viðv. spurninginum um lýsing av, hvussu verandi svimjihallir í høvuðsstaðarøkinum kunnu nýtast til at nøkta partar av nýtslutørvinum, er at viðmerkja:

Tórshavnar kommuna hevur fylgjandi svimjihallir:
1). Svimjihøllin í Kollafjarðar skúla.
Verður brúkt bæði til skúlar og stovnar og er opin fyri almenninginum fleiri dagar um vikuna og alt skúlaárið. Høllin tænir einum lokalum endamáli burturav og er ikki upplagt at broyta nakað tí viðvíkjandi. Høllin er í góðum standi.

2). Svimjihøllin í eindini á Argjavegi hjá Skúlanum á Fløtum (gl. Argja Skúla). Verður brúkt burturav til skúlabrúks. Framtíðin er nógv tengd at, hvussu verður við eindini á Argjavegi tá Skúlin á Fløtum er liðugur í 2020. Uppskotini, ið hava verið nevnd eru til annað kommunalt endamál, so sum innan eldraøkið og hevur Nám X eisini verið nevnt, tó so at í løtuni verður arbeitt út frá, at Nám X fer inn í Handilsskúlabygningin. Alt eftir hvat framtíðar endamálið verður, skal støða takast til, um hylurin framhaldandi skal verða í brúki, ella hølið verður brúkt til annað endamál. Er ynski at minka um rakstrarkostnaðir er viðkomandi at taka støðu til at niðurleggja henda hylin. Høllin er í góðum standi.

3). Svimjihøllin í Hesti. Verður vanliga brúkt summarmánaðirnar. Ikki nøkur ætlan fyribils um nakra broyting. Høllin er í hampiligum standi.

4). Svimjihøllin í Eysturskúlanum. Hylurin verður brúktur til skúlabrúks umframt til kvøldskúla og aðra undirvísing. Mælt verður til at halda fram við honum óbroytt. Er serliga áhugaverd til ymiskar sertørvir, umframt skúlabrúks. Er ynski at minka um rakstrarkostnaðir er viðkomandi at taka støðu til at niðurleggja henda hylin, ið annars er í góðum standi.

5). Svimjihøllin í Gundadali. Er nógv brúkt til alskyns endamál.

Undangóðkenning av ráðgevaratoymum
Umsitingin er í holt við at fyrireika undangóðkenning av ráðgevaratoymum til eina møguliga hugskotskapping, sum ætlandi fer í gongd um miðjan juni og gongur fram til oktober.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjóri, býararkitekturin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja
byggiskránna og at beina málið í býráðið, umvegis byggi- og býarskipanarnevndina, teknisku nevndina, náttúru- og umhvørvisnevndina og fíggjarnevndina.
**Mentamálanevndin 25. mai 2016:** Útsett.

**Ískoyti**
Sbrt. Býráðssamtykt 23. apríl 2015 er talan um eina serstaka nevnd, sum vísir til fíggjarnevndina. Av teirri orsøk verður viðgerðin av byggiskránni at byrja í fíggjarnevndini, sum so beinir málið víðari til aðrar nevndir, áðrenn endaliga viðgerð í fíggjarnevndini og hareftir býráðsviðgerð.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla fíggjarnevndini til at samtykkja byggiskránna og at beina málið í býráðið umvegis mentamálanevndina, byggi- og býarskipanarnevndina, teknisku nevndina, náttúru- og umhvørvisnevndina.
**Fíggjarnevndin 08. juni 2016:** Samtykt at taka undir við byggiskránni og beina málið í býráðið umvegis mentamálanevndina, teknisku nevnd, byggi- og býarskipanarnevndina og heilsu- og umhvørvisnevndina.
**Tekniska nevnd 13. juni 2016:** Samtykt at taka undir við byggiskránni.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 14. juni 2016:** Samtykt at taka undir við byggiskránni.
**Mentamálanevndin 15. juni 2016:** Samtykt at taka undir við byggiskránni.
**Náttúru- og umhvørvisnevndin 16. juni 2016:** Samtykt at taka undir við byggiskránni.
**Býráðsfundur 16. juni 2016:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti**
Hugskotskappingin fyri langhyl í Gundadal var útskrivað í august 2016, eftir at Tórshavnar býráð 16. juni 2016 hevði samtykt byggiskránna fyri langhyl í Gundadali.

Trý ráðgevaratoymi vóru undangóðkend til at luttaka í hugskotskappingini.

Tey eru:
- Toymið Ósbjørn Jacobsen Ark.
- Toymið SNA Ark.
- Toymið Árni Winther Ark.

23. november 2016 lótu toymini inn síni boð uppá loysn og vóru tey latin navnloynt soleiðis, at dómsnevndin ikki visti, hvat toymið átti hvat uppskot.

2. desember 2016 hevur dómsnevndin gjørt úrskurð og tilmæli í málinum um, hvat uppskot skal vinna hugkappingina og fáa møguleika at innganga møguliga avtalu um projektering vm. Sí hjálagt dómsúrskurðin.

Hetta mál er tengt at máli 16/01715 Avtala við Ítróttasamband Føroya um ÍSF-húsið vm., ið eisini er til viðgerðar í løtuni.

Á løgukonto 5775 L5610 eru umleið 7.000 tkr. tøkar til verkætlanina. Ætlanin er í næstum at fara undir nærri greiningar og samráðingar við vinnandi hugskotið og koma aftur til nevndarviðgerð við nærri greining av heildarkostnaði, tíðarætlan, útboðsleisti og fíggjarætlan.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin, mentamálaleiðari og býararkitekurin mæla mentamálanevndini til at staðfesta úrskurðin hjá dómsnevndini um vinnandi hugskotið og at heimila umsitingini til at fara undir samráðingar við vinnandi ráðgevaratoymið í dómsúrskurðinum um møguliga projektering, umframt gerð av tíðarætlan, útboðsleisti, fíggjarætlan vm. og venda aftur til nevndina við einum uppskoti. Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 6. desember 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.
**Fíggjarnevndin 07. december 2016:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.
**Býráðsfundur 15. desember 2016:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Mælt verður til at skipa bygginevnd í sambandi við nýggja langhylin samsvarandi vanligu mannagongdini fyri verkætlanir, har býráðið velur 2 limir.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mælir býráðnum til at velja tveir limir í bygginevndina fyri nýggjum langhyli
**Býráðsfundur 26. januar 2017:** Tikið av skrá.
**Býráðsfundur 02. mars 2017:** Vald vórðu Bergun Kass og Heðin Mortensen.

**Ískoyti:**
Tekstur kemur mánadagin.

**Ískoyti:**
Á løgukarminum fyri 2017 eru játtaðar 4.798 tkr. á konto 5775 mentan og frítíð.

Í fjør var hugskotskapping um verkætlanina, ið toymið við SNA ark. v.fl. vunnu. Sbrt. kappingartreytunum fingu tey bæði toymini sum luttóku, men ikki vunnu, 200 tkr. fyri luttøkuna.

Seinni í heyst kemur ætlandi til viðgerðar uppskot til sáttmála við vinnandi ráðgevaratoymið um projektering av verkætlanini.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at játta 420 tkr. av løgukarminum konto 5775, mentan og frítíð á projektkonto L57015 Svimjihøll. Málið verður beint í býraðið umvegis fíggjarnevndina.
**Mentamálanevndin 16. oktober 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.
**Fíggjarnevndin 15. november 2017:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.
**Býráðsfundur 22. november 2017:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti**:
Tekstur kemur til fundin.
**Mentamálanevndin 10. januar 2018:** Tikið av skrá.

**Ískoyti**:
Tekstur kemur mánadagin.

**Ískoyti**
Serstaka nevndin fyri langhyl hevði fund 7. feb. 2018.

Soleiðis var ført í fundarfrásøgnina: “*3. Viðv. tíðarætlan og samráðingunum um projekteringssáttmála. Uppskot um projekteringssáttmála umleið 7 mió. kr. Tøkar eru umleið 4,5 mió. kr. í løgukarminum í 2017. Tað, sum er á karminum, er ikki flutt í 2018 enn. Hinvegin, hvat ið er tøkt, verður vantandi endaligt í mars 18. Stjórnin metir, at projektið eigur at vera forskotið, til fíggingin er tøk til samlaðu projekteringina og rúm er í íløguætlanini fyri byggikostnaðinum. Fundur hevur verið við SNA-toymið um at forskjóta projektið til ársskiftið 18/19. Málið verður lagt fyri mentamálanevndina á einum komandi fundi. Fyribils meting hjá teknisku fyrisiting er, at projektering tekur umleið 1 ár (við fyrivarni) + útbjóðing 2-3 mánaðir.*

*Heðin Mortensen metir ikki, at projektið eigur at útsetast, tí 4,5 mió. kr. eru avsettar í 2017, og eiga at verða fluttar yvir í 2018. Við at avseta restfígging í 2019, verður komið á mál við projekteringini. Síðani avseta pening til bygging av svimjihøllini á íløguætlanini fyri komandi árini.”*

Fráboðað er Havnar Svimjifelag og Svimjisamband Føroya at projektering ætlandi verður planløgd at byrja um árskiftið 2018/19. Í sambandi við gerð av fíggjarætlan fyri 2019 verður ætlandi gjørt eitt uppskot til fíggingarætlan fyri projektering og bygging av langhyli. Vent verður aftur í nevndina við málinum.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at taka undir við at projekteringin verður sett at byrja um ársskiftið 2018/19 og at fígging til projektering og bygging verður tikin upp í sambandi við fíggjarætlan 2019.
**Mentamálanevndin 07. mars 2018:** Ein meiriluti, Turið Horn, Marin Katrina Frýdal og Bergun Kass tekur undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Heðin Mortensen og Bjørghild Djurhuus, krevja málið fyri býráðið.

**Býráðsfundur 22. mars 2018:** Heðin Mortensen, Odd Færø, Bjørghild Djurhuus, Bjørg Dam, Halla Samuelsen og Annfinn Brekkstein seta fram soljóðandi broytingaruppskot:

Mælt verður til, at projekteringin av langhylinum fer í gongd beinanvegin, at 4,5 mió. kr., avsettar á fíggjarætlanini 2017, verða fluttar til fíggjarárið 2018, og at restfígging, umleið 2,5 mió. kr. at fíggja projekteringina, verður avsett í sambandi við fíggjarætlanararbeiðið 2019.

Fyrst varð atkvøtt um broytingaruppskotið, ið fall við seks atkvøðum fyri og sjey ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Odd Færø, Annfinn Brekkstein, Halla Samuelsen, Bjørghild Djurhuus og Bjørg Dam.

Ímóti: Annika Olsen, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Bogi Andreasen, Bergun Kass og Jógvan Arge.

Síðani varð atkvøtt um tilmælið frá meirilutanum í mentamálanevndini, ið varð samtykt við sjey atkvøðum fyri, fimm ímóti og einari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Bogi Andreasen, Bergun Kass og Jógvan Arge.

Ímóti atkvøddu: Annfinn Brekkstein, Halla Samuelsen, Bjørg Dam, Bjørghild Djurhuus og Heðin Mortensen.

Blankt atkvøddi: Odd Færø.

**Ískoyti**
Á løgukarminum 5775 mentan og frítíð fyri 2018 eru framfluttar 5.029 tkr. Umsitingin er í holt við at samráðast um ráðgevarasáttmála við vinnandi ráðgevaratoymið og kemur ætlandi í nevnd við málinum í oktober/november 2018 soleiðis at projekteringin kann byrja í desember 2018/januar 2019. Tørvur er at hava tøkan pening á projektkontuni í sambandi við samráðingarnar v.m., ið er í gongd í løtuni.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at játta 5.029 tkr. av løgukarminum konto 5775, mentan og frítíð á projektkonto L57015 Svimjihøll. Málið verður beint í býraðið umvegis fíggjarnevndina.
**Mentamálanevndin 12. september 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

Heðin Mortensen og Turið Horn vóru ikki við í viðgerðini av málinum.
**Fíggjarnevndin 19. september 2018:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.
**Býráðsfundur 27. september 2018:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
**UPPSKOT Í GERÐ!!!!!**

Serstaka nevndin (bygginevndin) fyri gerð av langhyli, hevur á fundi 16, 20 og 2x. november 2018 samtykt at taka undir við samráðingarúrslitinum frá samráðingunum um ráðgevarasáttmála við vinnandi SNA samtakið, ið fevnir um SNA umframt LBF og SMJ. Bygginevndin mælir til at høllin og hylurin verða breiðkað nakað, umframt at støða verður tikin til um verkætlanin eisini skal fevna um 2 terapihyljar.

Fylgjandi viðurskifti eru at viðgera nærri í sambandi við ráðgevarasáttmálan:

I. Stødd á langhylinum

Í sambandi við tilgongdina at gera ráðgevarasáttmála var 10. oktober 2018 fundur millum umsitingina, umboð fyri Svimjisambandið og Havnar Svimjifelag við Joaquin Pujol, formann í FINA (altjóða svimjisambandinum) Facilities Committtee um verkætlanina. Sí hjálagt fundarfrásøgn frá fundinum og niðurstøður.

Eftirfylgjandi hevur umsitingin fingið afturmelding frá Joaquin Pujol um, at frásøgnin er rættvísandi, og avtalað er, at tá nýtt skipanaruppskot er tøkt, ætlandi í fyrsta ársfjórðingi 2019, verða nýggj frágreiðing og tekningar sendar FINA til viðmerkingar, har støða er tikin til ymisku viðurskiftini, sum vórðu viðgjørd á fundinum í okt. 2018. Herundir sonevnt flow í høllini í sambandi við kappingar, um pláss til áskoðarar, miðlar, VIP etc. og um karmar til sjónvarp, lýsingar o.a.

Við støði í samskiftinum við FINA hevur bygginevndin viðgjørt, hvørt tað er hóskandi at breiðka hylin og høllina nakað. Semja er um, at tað er mest hóskandi at hava 10 geilar á 2,5 m. hvør, í staðin fyri 8 geilar á 2,5 m. umframt 0,5 m. skvatligeil í hvørjari síðu. Við hesi broyting verður hylurin betri egnaður til kappingar, umframt at hann fær enn betri nyttuvirði í mun til dagligu og fjølbroyttu nýtsluna hesi komandi 3-4 áratíggjuni. Vansin við hesi broyting er, at hylurin gerst størri, og harvið eisini vatnnøgdin, ið skal hitast og viðgerast størri, umframt at høllin gerst tilsvarandi breiðari. Nevndin er samd um at longdin framhaldandi verður 50 m., umframt 1 m. afturat til eina flytiliga brúgv, so til ber at býta hylin uppá ymiskan hátt bæði til 25 m. langar geilar og samansett 25 m./50 m. langar geilar.

Annað týðandi høvuðsmál er, at høllin má gerast nakað breiðri enn í verandi støðu. Hetta serliga við atliti til at kunna seta upp fyribils áskoðarapláss (rúma fleiri áskoðarum til serligar kappingar), pláss til officials, sjónvarping, lýsingar o.a. Í tí dagliga kann øki brúkast til venjingar, upphiting, avseting o.a. Samanlagt verður høllin breiðkað til umleið 46 m. Á hjáløgdu mynd sæst, hvussu bygningurin fyllir byggiøkið í plan. Kostnaðurin av hesi broyting er í lýstur í skjali x.

II. Nýggjur innandura smábarnahylur/terapihylur og uttandura terapihylur

Í kappingaruppskotinum, ið vann, var á tekningunum lýst ein loysn við uttandura terapihyli, umframt einum serligum heitvatns-terapihyli innandura í millumøkinum millum bygningarnar. Hesin er serliga hugsaður til smærri børn, umframt til onnur, ið ynskja møguleikan at vera í einum serliga heitum hyli við terapi og vælveru í huga. Hugsanin er, at rúmið skal vera lutfalsliga lágt og tætt, soleiðis at tað er lættari at halda ein høgan hita. Meirkostnaðurin av uttandura terapihylinum og innandura terapihylinum eru lýstir í skjali x.

Bygginevndin metir at gerð av hesum báðum ískoytisverkætlanum er áhugaverd í sambandi við at umgera Svimjihøllina til ein vatndepil við vælveru, rørslu og kappingum.

III. Fleiri brúsur og skiftirúmsviðurskifti

Í byggiskránni er viðgjørt viðv. táverandi heitvatnsskipan til brúsurnar og tørv á fleiri brúsum.

Í 2017 bleiv heitvatnsskipanin til brúsurnar endurnýggjað. Í 2019 er ætlanin at greina møguleikarnar fyri útbyggingum við fleiri brúsum (óheft av langhylsverkætlanini). Miðrúmini í skiftingarrúmunum, har tað áður vóru sólir, kunnu umgerast soleiðis, at har ber til at gera fleiri brúsur. Í 2018 eru skápini í skiftingarrúmunum endurnýggjaði, og ber lutfalsliga lætt til at økja um talið av skápum. Eisini eru viðurskiftini hjá fólki, ið bera brek, og sum hava tørv hjálp til skifting o.a. tørv á at gerast betri í verandi høll. Hetta verður eisini tikið upp í 2019.

III. Ráðgevarasáttmálin og kostnaður

Hjálagdur er uppskot til sáttmála við tilhoyrandi fylgiskjølum. Samlaða upphæddin fyri projektering er ásett til tkr. 11.500. Í hjálagda skjali er greining mettu av kostnaðarviðurskiftunum fyri verkætlanina við teimum ymisku valmøguleikunum.

Verður avgjørt at verkætlanini eisini skal geva um báðar terapihyljarnar hækkar kostnaðurin fyri projektering til tkr. 12.400.

Umframt sáttmála við SNA-samtakið, er ætlanin at hava tilknýttar 2 byggiharraráðgevar t.e. Sp/f Ráð til almenna byggiharraráðgeving og byggileiðslu í sambandi við bygginguna, umframt DTI til ráðgeving og eftirlit í sambandi við hylja- og vatntøkniveiting. Hædd er tikin fyri hesum í kostnaðarmetingini.

Á løgukontu L57015 Svimjihøll eru umleið 4,9 mio.kr. tøkar til projektering o.a. Tørvur er á umleið 4 mio.kr. afturat í 2019 til projektering.

Sbrt. tíðarætlanini byrjar projektering í desember 2018 og gongur fram til á várið 2020. Hareftir skal støða takast til útbjóðing og er hugsandi at byggingin kann byrja í august 2020.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin, býararkitekturin, deildarleiðarin á verkætlanardeildini og mentamálaleiðarin mæla nevndini til at samtykkja:

a). at hylurin og høllin verða breiðkað

b). og mæla nevndini til at ráðgevarasáttmálin fevnir um projektering av uttandura heitvatnshyli og innandura heittvatns/terapihyli, og við teimum tillagingum at innganga ráðgevarasáttmála við SNA-samtakið um projektering av langhyli. Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.
**Mentamálanevndin 28. november 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.
**Fíggjarnevndin 05. desember 2018:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Ískoyti:**
Neyva sáttmálaupphæddin fyri ráðgevarasáttmálan (sbrt. samtykt í mentamálanevndini og fíggjarnevndini) er kr. 12.346.671.
**Býráðsfundur 13. desember 2018:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti**
Projektering av langhylsverkætlanini er í gongd. Til verkætlanina í ár eru 4.136 tkr. ætlaðar av løgukontu 5775 Ítróttaanlegg í 2019. Saman við framflyting á projektkontuni verða umleið 8.705 tkr. tøkar til verkætlanina í ár og verður tað mett hóskandi í mun til løgdu ætlan fyri projektering v.m.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla nevndini til at samtykkja at flyta 4.136 tkr av løgukontu 5775 Ítróttaanlegg á projektkontu L57015 Svimjihøll. Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.
**Mentamálanevndin 08. mai 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 15. mai 2019:** Samtykt at taka undir við Mentamálanevndini og beina málið í býráðið.
**Býráðsfundur 23. mai 2019:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Á fundinum koma umboð fyri bygginevnd og ráðgeva at leggja fram nýggjasta skipanaruppskotið, kostnaðarmetingar o.a. Bygginevndin er í fer við at leggja seinasta hond á viðgerðina og er endaligt tilmæli ávegis.

Sí hjálagt skjal við skipanaruppskotinum.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórnin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at umrøða framløguna.
**Mentamálanevndin 17. juni 2019:** Umrøtt.
**Býráðsfundur 20. juni 2019:** Tikið av skrá.
**Mentamálanevndin 24. juni 2019:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Bygginevndin (Serstaka nevndin fyri at fyrireika nýggjan svimjihyl) hevur á fundi 28. juni 2019 samtykt hjálagda skipanaruppskot. Tó so at bygginevndin ynskir at ráðgevin í víðari tilgongdini kemur við eini nøktandi takloysn, umframt kemur við uppskotum til møguligar sparingar og hvussu bygningurin kann fáa ein enn betri orkuprofil. Í mun til viðgerðina seinast, er uppskotið rættað til við støði í samtyktunum í málinum í nov-des. 2018. Harumframt hevur ráðgevin saman við bygginevndini gjøgnumgingið málið við eini longri røð av áhugapørtum innan svimjing t.e. skúlar, dagstovnar, feløg, sersamband, KVF etc. og rættað ymiskt til. Sbrt. galdandi mannagongdum skal skipanaruppskot í byggiverkætlanum góðkennast í avvarðandi nevnd, fíggjarnevnd og býráði.

Eisini er uppskotið viðgjørt við altjóða svimjisambandið FINA saman Svimjisambandi Føroya – sí hjálagt teirra metingar. Bygginevndin metir, at verkætlanin er slóðbrótandi og kann vera ein framtíðartryggjaður karmur um alskyns svimjivirksemi langt fram í tíðina og eisini gera tað møguligt at bjóða seg fram til eina røð av fleirlanda svimjikappingum.

Við støði í skipanaruppskotinum er gjørd kostnaðarmeting, sí hjálagt.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin, leiðarin á verkætlanardeildini og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja hjálagda skipanaruppskot og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Ískoyti:**
Byggiskráin fyri langhylin fevnir ikki um at víðka um skiftirúms- og brúsuviðurskiftini. Skipanaruupskotið leggur upp, at øll almenn atkomu- og skiftirúmsviðurskifti framhaldandi verða í verandi høll.

Sum upplýst í málinum til býráðsviðgerðina í desember 2018 viðvíkjandi ráðgevarasáttmálanum, fer nýggja høllin at hava økt virksemi og økt tal av brúkarum við sær.

Metast má týðandi eisini við atliti at víðari prosjekteringini, at fingið verður til vega uppskot til rúmari umstøður til skifting og brúsu v.m. hjá brúkarum sum heild og hjá brúkarum við rørslutarni, og sum á nøktandi hátt megnar at taka ímóti økta virkseminum. Útreiðslur til hesa bygging liggur uttanfyri kostnaðarmetingina fyri langhylin annars.

Til tess at fáa uppskot til vega skal roknast við ávísum útreiðslum til ráðgeving v.m. Mælt verður til at geva umsitingini heimild til at biðja um tilboð hesum viðvíkjandi.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at fáa til vega ítøkiligt uppskot til rúmari umstøður til skifting og brúsu v.m. hjá brúkarum sum heild og hjá brúkarum við rørslutarni, sum á nøktandi hátt megnar at taka ímóti økta virkseminum, og at umsitingin fær heimild til at biðja um tilboð til ráðgeving hesum viðvíkjandi.

**Mentamálanevndin 03. juli 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum um at samtykkja skipanaruppskotið og tilmælinum um at fáa til vega uppskot til rúmari umstøður til skifting og brúsu, og at

umsitingin fær heimild at biðja um tilboð til ráðgeving hesum viðvíkjandi. Málið at beina í býráðið um fíggjarnevndina.
**Fíggjarnevndin 03. juli 2019:** Samtykt at taka undir við Mentamálanevndini og beina málið í býráðið.
**Býráðsfundur 04. juli 2019:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Projekteringin av langhylsverkætlanini er nú komin væl áleiðis og verður væntandi liðug í mai 2020 og kemur málið um góðkenning av høvuðsprojektinum, umframt útbjóðing til støðutakan í nevndum og býráð.

Til verkætlanina í ár eru 4.000 tkr. ætlaðar av løgukontu 5775 Ítróttaanlegg í 2019. Harumframt verður væntandi í apríl 2020 ein framflyting av tøkari játtan á projektkontuni frá 2019. Upphæddin er ikki endalig tøk enn, men fer í høvuðsheitum til at gera projekteringina lidna. Játtanin í 2020 fer ætlandi til at kunna byrja útinningina av verkætlanini í heyst t.e. í høvuðsheitum talan um burturbeining av ÍSF-húsinum, rigga byggipláss til og byrjan uppá jørð- og lendisarbeiðið.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla nevndini til at samtykkja at flyta 4.000 tkr av løgukontu 5775 Ítróttaanlegg á projektkontu L57015 Svimjihøll. Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 15. apríl 2020**: Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.
**Fíggjarnevndin 22. apríl 2020:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.
**Býráðsfundur 30. apríl 2020:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti**:
Í sambandi við fyrireiking av langhylsverkætlanini er søkt um byggiloyvi til útinning av verkætlanini.

18. mai 2020 samtykti byggi- og býarskipanarnevndin í máli 20/01266 Umsókn um byggiloyvi til langhyl í Gundadali matr. 1268a, Tórshavn, at "at loyva umsitingini at geva byggiloyvi, treytað av at neyðug parkeringspláss verða gjørd og annars við teimum treytum, ið umsitingin setur." Sí hjálagt yvirlit yvir p-pláss í økinum.

Í málinum framgongur at tað skulu útvegast 80 p-pláss afturat. Í upprunaliga málinum er avrátt at p-viðurskifti í Gundadali skulu viðgerast í eini heild og inngongur m.a. í mál 18/03453 Skipan av Gundadali, ið ætlandi kemur til viðgerðar í juni 2020.

Hetta kravið er ein týðandi broyting í fyritreytunum í verkætlanini, bæði ráðleggingarliga, praktiskt og fíggjarliga. Hinvegin so má roknast við, at verkætlanin fær skotbrá inntil byggiverkætlanin er liðug til at fáa hesi útvegað, væntandi um ársskiftið 2022/23.

**Tilmæli**:
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at taka til eftirtektar kravið um fleiri parkeringspláss sum liður í langhylsætlanini.

Málið verður beint til ummælis í teknisku nevnd.
**Mentamálanevndin 10. juni 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í teknisku nevnd.

**Ískoyti**
Projekteringin
Verkætlanin er nú liðug projekterað og fyriliggur nú eitt sonevnt høvuðsprojekt (t.e. fullfíggjað projektering), ið er blivið granskað innanhýsis í teknisku fyrisiting, umframt hjá øðrum uttanhýsis serkønum ráðgevum.

Mett verður at tilfarið nú hevur eina dygd, ið er nøktandi til útbjóðingina. Í løtuni verða seinastu

smálutirnir passaðir til áðrenn útboð.

Byggiloyvið
Verkætlanin hevur fingið byggiloyvið (sí hjálagt skjal) og er har nú ásett at verkætlanin skal útvega 42 p-pláss í nærumhvørvinum. Mett verður, at hetta ber til at loysa í nærøkinum og fáa liðugt projekterað og útinnt í 2021/2022 áðrenn Langhylurin verður tikin í nýtslu. Tekniska deild og býarskipanardeildin undir teknisku fyrisiting mæla til og leggja fyri býarskipanarnevnd og teknisku nevnd eitt ella fleiri øki í ella nærhendis Gundadali til minst 42 pláss og verður hetta loyst sum ein atknýtt men fyri seg verkætlan at prosjektera og standa liðug áðrenn langhylurin verður tikin í nýtslu. Fyribils mettur kostnaður til hetta er um 6 mió. Eitt sindur skal játtast til fyrireiking og prosjektering fyrst.

Útbjóðingartilfar
Talan er um eina útbjóðing í høvuðsarbeiðstøku sbrt. ABF06. Skotið verður upp at bjóða 5 feløgum til at luttaka í innbodnari lisitatión.

Stálhyljaviðurskifti
Í útbjóðingartilfarinum verður tilskilað, at tilboð skal fáast frá tveimum útvaldum veitarum av stálhyljaloysnum og at høvuðsarbeiðstakarin hevur viðskiftini við veitaran um hendi, tó eftir nærri góðkenning byggiharrans. Hesir báðir veitararnir eru útvaldir eftir eina umfatandi tilgongd.

Ráðgevaraleiklutir
Sbrt. ráðgevarasáttmálanum við Sp/F SNA er fyrivarni tikið fyri at byggileiðsla kann vera latin til annað felag at útinna. Hetta m.a. fyri at tryggja eina sterkari stýrings- og eftirlitsskipan kring verkætlanina. Skotið verður tí upp at byggileiðslan í verkætlanini verður latin til annað felag. Ætlanin er at sama felag eisini veitir ávísa byggiharraráðgeving eftir tørvi í sambandi við sáttmálasamráðingar og onnur yvirskipaði viðurskifti.

Kostnaðarmeting
Í hjálagda fylgiskjali eru nærri greiningar og metingar viðv. kostnaðinum fyri verkætlanina, bæði hondverkaraútreiðslur (HVÚ) og aðrar útreiðslur í verkætlanini. Av kappingar- og marknaðarávum verða tølini ikki lýst í tekstinum og verður tí frámælt til varðsemi við at nevna tøl alment.

ÍSF-húsið
Víst verður til mál 16/01715 Avtala við Ítróttasamband Føroya um ÍSF-húsið, ið er til viðgerðar á hesum sama fundi. Ætlandi verður farið undir niðurtøku av húsinum í oktober 2020. Húsaumsitingin kemur at standa fyri arbeiðinum og verður útreiðslan goldin av langhylsverkætlanini.

Tíðarætlan
Útbjóðing av verkætlanini 25 august til ultimo september.
Samráðingar um sáttmála ultimo september til ultimo oktober.
Niðurtøka av ÍSF-húsinum oktober 2020
Spakin settur í – ultimo oktober 2020

Bygging til árskiftið 2022/2023.

Rúmari umstøður til skifting og brúsu
Vísandi til samtykt í máli 19/03559 verður spurningurin um rúmari umstøður til skifting og brúsur í verandi svimjihøll loyst serskilt. Málið kemur aftur fyri í nevnd í heyst.

Grannalagsviðurskifti
Umsitingin hevur í 2019 verið á fundi við grannarnar og greitt frá verkætlanini og viðurskiftini kring byggiarbeiðið v.m. Grannar hava sum heild ymisk fyrivarni fyri spronging, larmi, dusti v.m. í sambandi við byggiarbeiðið, umframt ivamál viðv. hæddini á bygninginum. Umsitingin hevur svarað hesum eftir besta førimuni. Onnur og meiri kunning verður eftir ætlan fyriskipað áðrenn og meðan arbeiðið er í gongd.

Innrættan av byggiplássi og trygd í økinum
Saman við ráðgevanum er gjørd ein ætlan, ið eisini tekur hædd fyri ferðsluni og trygdini í økinum sum heild. Henda ætlan verður partur av HTU-ætlanini í verkætlanini og fylgt upp regluliga saman við verkætlanarleiðsluni og leiðsluni í Svimjihøllini.

Bygginevndin
Bygginevndin fyri verktætlanina hevur viðgjørt málið á fundi 21. august 2020.

Bygginevndin hevur nýggjan fund mánadagin 24. august 2020.

Á fundi í bygginevndini 24. august 2020 varð samtykt at biðja um heimild at kunna bjóða verkætlanina út í høvuðsarbeiðstøku.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til:
a). at heimila umsitingini at bjóða verkætlanina út í høvuðsarbeiðstøku til 4-5 feløg
b). at heimila umsitingini at samráðast við bílígasta tilboðsgevara um sáttmála at leggja fyri nevnd og býráð, og
c). at heimila umsitingini at gera avtalu við ráðgeva um at hava byggileiðsluna um hendi.

Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.
**Mentamálanevndin 24. august 2020:** Ein meiriluti, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal og Jákup Dam, samtykti at taka undir við:

a). at heimila umsitingini at bjóða verkætlanina út í høvuðsarbeiðstøku til 4 feløg
b) at heimila umsitingini at samráðast við bílígasta tilboðsgevara um sáttmála at leggja fyri nevnd og býráð, og
c). at heimila umsitingini at gera avtalu við ráðgeva um at hava byggileiðsluna um hendi.

Harumframt verður heitt á teknisku nevnd um at viðgera mál um fleiri parkeringspláss.

Ein minniluti, Heðin Mortensen og Halla Samuelsen, atkvøður blankt vísandi til, at áðrenn arbeiðið verður boðið út, eiga fleiri ósvaraðir spurningar í málinum um langhylin at verða svaraðir.
**Fíggjarnevndin 25. august 2020:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Bergun Kass og Gunnvør Balle, tekur undir við Mentamálanevndini og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Heðin Mortensen og Tróndur Sigurðsson, atkvøður blankt vísandi til, at áðrenn arbeiðið verður boðið út, eiga fleiri ósvaraðir spurningar í málinum um langhylin at verða svaraðir, herundir hvussu verkætlanin verður fíggjað.
**Býráðsfundur 25. august 2020:** Atkvøtt varð um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 9 atkvøðum fyri, 2 atkvøðum ímóti og 2 blonkum atkvøðum.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turid Horn, Bogi Andreasen, Bergun Kass, Heðin Mortensen og Bjørghild Djurhuus.

Ímóti atkvøddu: Tróndur Sigurðsson og Annfinn Brekkstein.

Blankt atkvøddu: Helena Dam á Neystabø og Halla Samuelsen.

**Ískoyti:**
Licitatión
1. oktober 2020 var licitatión í sambandi við útbjóðing av verkætlanini. Fýra feløg vóru boðin við í innbodnari licitatión. Inn komu trý tilboð. Sp/f Húsavarðatænastan lat ikki inn boð, hóast fyritøkan hevði sagt seg vilja bjóða.

Øll tilboðini, herundir allir postar í tilboðslistanum eru eftirkannaði og gjøgnumgingin og verður mett at øll trý tilboðini lúka treytirnar í útbjóðingartilfarinum og at tilboðið hjá J&K Petersen framhaldandi er lægst.

Sí endaliga yvirlitið her:

| Arbeiðstakarar | Tilboðsupphædd HVÚ | Eíndarprísur / optiónir | Samlað tilboð | Nr. |
|---|---|---|---|---|
| Articon P/F | 145.121.780,00 | 3.558.791,00 | 148.680.571,00 | 2 |
| Búsetur Sp/f | 156.249.015,00 | 3.652.428,00 | 159.901.443,00 | 3 |
| J & K Petersen Contractors P/F | 144.753.761,73 | 2.541.420,25 | 147.295.181,98 | 1 |

Viðv. avtalu við Tórshavnar havn um grót
Eftir at licitatiónin hevur verið, er tað, sbrt. ætlan, eydnast at fáa í lag semju við Tórshavnar havn at lata umleið 20.000 m3 grót til bátahylsverkætlanina í Álakeri. Hetta inniber eina ávísa sparing, tí annars skuldi grótið koyrast á goymslu í Húsahaga. Langhylsverkætanin skal tí ikki rinda nakað fyri koyring v.m. av hesi nøgdini. Hetta er longu innroknað í kostnaðarmetingina, men er treytað av at verkætlanin fer í gongd í næstum.

Sáttmálasamráðingar
Við støði í gjøgnumgongdini sum umrødd omanfyri, var í oktober 2020 farið undir samráðingar við P/F J&K Petersen um sáttmála. Tað hava verið fýra tingingarfundir, har partarnir hava gjøgnumgingið tilboðið hjá J&K Petersen, herundir tey ymisku fakini fyri at eyðmerkja møguligar avbjóðingar, óvissur og evt. manglar í verkætlanartilfarinum, og eisini um møguleikar fyri at taka onkrar postar út úr veitingini ella vita, um tað ber til at gera møguligar tillagingar, ið kunnu antin betra verkætlanina og/ella minka um kostnaðin.

Tað vísir seg at vera nakrir upplagdir møguleikar fyri at minka um kostnaðin, og sum ikki broyta nakað av týdningi viðv. dygd og funktión. Samstundis er greitt, at í nøkrum førum eru eyðmerkt nøkur viðurskifti og veitingar, ið mangla í nøgdarlistanum og útboðstilfarinum. Hetta inniber ein ávísan meirkostna.

Eisini hava samráðingar verið fyri at kanna, um tað ber til at minka um óvissur við at læsa ymisk viðurskifti í sáttmálanum. Eitt nú óveðursdagar, prís- og lønarvøksur, ávísar nøgdir í nøgdarlistanum v.m., men hevur tað ikki eydnast at fáa eina nøktandi semju um hesar postar, m.a. vegna ov stutt skotbráð hjá bæði arbeiðstakara, ráðgevum og kommununi at fáa lýst hesar óvissur og at kostnaðarmeta tær.

Byggitíðin og trygd í økinum
Undir samráðingunum er eisini komið fram, at neyðugt verður at leingja byggitíðina, tó enn óvist hvussu nógvar mánaðir, hetta m.a. fyri at kunna tilrættisleggja lendis- og speingiarbeiðið meiri skynsamt í mun til umhvørvið kring byggiplássið og herundir fyri at hava trygdina í økinum í hásæti. Longd byggitíð vil bera eyka kostna við sær til byggiplássrakstur, sum full greiða ikki er á. Kostnaðarskjalið tekur hædd fyri møguligari longdari byggitíð.

Óvissur og váðar
Gjøgnumgongdin higartil hevur eisini eyðmerkt nakrar óvissur, ið eru loystar, men hevði tað tað eisini hevði verið ynskiligt at fingið greinað og avklárað nakrar aðrar óvissur nærri og soleiðis minkað um váðan. Talan kann vera um 2-3 mio.kr.

Til tess at nágreina hesi viðurskifti krevst ein tilgongd á nakrar vikur. Í tann mun tað ikki verður gjørt, vil tann óvissan fara av postinum til ókent.

Sáttmálaupphædd/hondverkaraútreiðslur (HVÚ)
Við tillaginunum sum nevndar omanfyri verður komið fram til eina sáttmálaupphædd (HVÚ) á 147.500 tkr. uttan kommunalt MVG.

Heildarkostnaður og fígging

Greitt verður á fundinum frá heildarkostnaðurin fyri verkætlanina. Til tess at fíggja verkætlanina verður neyðugt at seta av umleið 65 mio.kr í fíggjarætlanini fyri 2021. Restupphæddin verður at fíggjað í 2022 og 2023.

Gjalds- og tíðarætlan
Í sambandi við samráðingarnar hevur kommunan biðið J&K Petersen um at koma við eini gjalds- og tíðarætlan fyri verkætlanina. Henda er ikki komin enn, men verður ein fyritreyt fyri at innganga ein sáttmála. Mett verður at útreiðslurnar í 2020 í mesta lagi vera umleið 2.500 tkr og eru hesar tøkar á projektkontu L57015 Svimjihøll.

Manningarlisti – lyklapersónar
Sum liður at tryggja eina skikkaða manning í leiðsluni av verkætlanini, hevur J&K Petersen latið TK ein lista yvir lyklapersónar í felagum, ið koma at arbeiða við verkætlanini. Umsitingin er nøgd við listan.

Tryggingarviðurskifti
Til verkætlanina hevur Tórshavnar kommuna teknað eina projektábyrgdartrygging fyri projekteringina v.m. og kemur í sambandi við høvuðsarbeiðstøkuna at tekna eina arbeiðstøkutrygging, herundir spreingitrygging í sambandi við at arbeiðið byrjar.

**Atknýttar verkætlanir**
*- Brúsu- og skiftirúmsviðurskifti í verandi høll*
4. juli 2019 samtykti býráðið at fáa útvega ítøkiligt uppskot til rúmari umstøður til skifting og brúsu v.m. hjá brúkarum sum heild og hjá brúkarum við rørslutarni, sum á nøktandi hátt megnar at taka ímóti økta virkseminum. Málið er viðgjørt nakrar ferðir í mentamálanevndini og kemur endaligt tilmæli væntandi fyri á fundi í mentamálanevndini 16. november 2020 (sí mál 19/03559 Svimjihøllin í Gundadali: Rúmari umstøður til skifting og brúsu). Sí hjálagt tekning av loysn E og tilhoyrandi kostnaðarmeting. Talan er um eina verkætlan, ið kann fremjast í stigum t.d. yvir 2-3 ár.

*- Parkeringsviðurskifti*
Í summar var spurningurin um útvegan av 42 parkeringsplássum viðgjørdur og samtykt at serstakt mál skuldi fyrireikast til at loysa tað. Tilgongdin er byrjað og kemur tilmæli væntandi í fyrsta ársfjórðingi í 2021. Byggiloyvið treytar, at hesi eru tøk áðrenn ein komandi høll verður tikin í nýtslu – væntandi í 2023.

Hesar atknýttu verkætlanir eru ikki fíggjaðar í langhylsverkætlanini.

Viðgerð í bygginevndini
Bygginevndin hevur viðgjørt málið á nøkrum fundum og seinast á fundi 6. november 2020, og hóast stutt skotbrá, metir meirilutin (Bergun Kass, Birita Wardum, Brynhild Setberg og Sigurð Vang) av bygginevndini, at tað ber til at inntanga sáttmála við P/F J&K Petersen, treytað av hóskandi upphædd til ókent og møgulig tilkeyp. Mett verður, at óvissurnar í verandi støðu, kunnu rúmast í avsettu upphæddini.

Ein minniluti í bygginevndini, Heðin Mortensen, tekur støðu á seinni fundi, vegna ov stutt skotbrá og vantandi heildarupplýsingar.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin og mentamálaleiðarin vísa til lýsingina omanfyri og mæla til:

a). at taka støðu til høvuðsarbeiðstøkusáttmála á 147.500 tkr. (uttan mvg) við P/F J&K Petersen. Útreiðslurnar í 2020 vera at rinda av tøkari upphædd á løgukontu L57015 Svimjihøll.

b). at taka støðu til at játta 65.000 tkr. í fíggjarætlanini fyri 2021 og restina av fíggingini í 2022 og 2023, og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 06. november 2020:** Ein meiriluti, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal og Bergun Kass, samtykti at taka undir við punkt a) hvat viðvíkur sáttmálaupphæddini og fíggingini í 2020 og b), og harumframt at heimila umsitingini at gera høvuðsarbeiðstøkusáttmála við P/F J&K Petersen.

Ein minniluti, Heðin Mortensen og Halla Samuelsen, tekur støðu á seinni fundi, vegna ov stutt skotbrá og vantandi heildarupplýsingar.
**Fíggjarnevndin 06. november 2020:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Bergun Kass og Gunvør Balle, tekur undir við meirilutanum í Mentamálanevndini og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Heðin Mortensen og Tróndur Sigurðsson, tekur undir við minnilutanum í Mentamálanevndini.
**Býráðsfundur 06. november 2020:** Atkvøtt varð um tilmælið frá meirilutanum í Fíggjarnevndini, ið varð einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Formaðurin setur málið á skrá.

Sum upplýst í málslýsingini til nevndar- og býráðsviðgerðina í november 2020, eru atknýttar verkætlanir, ið ikki eru fíggjaðar. Talan er um nýggj brúsu- og umklæðingarrúm, harundir eisini til tey, ið bera brek, og at útvega tey í byggiloyvinum kravdu parkeringsplássini.

Mett verður neyðugt at fáa hesar verkætlanir neyvari útgreinaðar og kostnaðarmettar, soleiðis at hesi viðurskifti kunnu verða fíggjað og klár at taka í nýtslu í seinasta lagi samstundis sum langhylurin er liðugt bygdur.

Viðvíkjandi tørvinum á nýggjum brúsu- og umklæðingarrúmum er ynskið ein loysn, sum ikki grípur inn í gomlu høllina, men soleiðis, at báðar hallirnar kunnu virka leysar av hvørjari aðrari.

Ynskið er harumframt at kanna møguleikarnar fyri einfaldari takkonstruktión.

Hesi viðurskifti – brúsu- og umklæðingarrúm, parkeringspláss, og einfaldari takkonstruktión, skulu kostnaðarmetast hvør sær og fyri samlaðu langhylsverkætlanina.

Ynskið er eisini um at fáa uppskot til, hvussu man kann betra um umstøðurnar og tilboðini til barnafamiljurnar.

Heitt kann verða á ráðgevan um at gera hesi uppskot og kostnaðarmetingar. Skotið verður upp at játta kr. 800.000 til endamálið fíggjað av verandi langhylsjáttan 5775 Ítróttaranlegg L57015 Langhylur.
**Mentamálanevndin 19. oktober 2021:** Ein meiriluti, Annfinn Brekkstein, Súna Mørk, Kristianna Winther Poulsen og Birgir Nielsen, tekur undir við at heita á ráðgevan um at gera hesi uppskot og kostnaðarmetingar, og at játta kr. 800.000 til endamálið fíggjað av verandi langhylsjáttan 5775 Ítróttaranlegg L57015 Langhylur. Málið verður beint í býráðið um fíggjarnevndina.

Ein minniluti, Ruth Vang, atkvøður blankt.
**Fíggjarnevndin 20. oktober 2021:** Ein minniluti, Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, tekur undir við mentamálanevndini og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Annika Olsen og Elsa Berg, atkvøður blankt.

Tróndur Sigurðsson luttók ikki í viðgerðini av málinum.
**Býráðsfundur 28. oktober 2021:** Atkvøtt varð um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, Annfinni Brekkstein og Heðini Mortensen, ið varð samtykt við 9 atkvøðum fyri, 3 ímóti og einari blankari.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Súna Mørk, Bjørg Dam, Birgir Nielsen og Ruth Vang.

Blankt atkvøddi: Annika Olsen

Ímóti atkvøddu: Elsa Berg, Jón Kragesteen og Gunnvør Balle.

**Ískoyti:**
Arbeiðið á byggiplássinum í sambandi við gerð av langhyli v.m. hevur nú verið í gongd í eitt gott ár, og er verkætlan gjøgnumgingin við atliti il at tryggja dygdina v.m.

Tørvur er tí nú á at fáa staðfest heildarkosnaðin fyri verkætlanina. Metingin er enn óbroytt síðani viðgerðina og samtyktina um høvuðsarbeiðstakarasáttmála í endanum av 2020.

Bygginevndin hevur við støði í meting hjá bygningsdeildini og byggiharraráðgevnaum ásett heildarkostnaðin til 211.797 tkr. Á fundinum verður kostnaðarskjal gjøgnumgingið.

Mett verður at tørvur verður á fylgjandi upphæddum á fíggjarætlanum komandi árini:

2022 – 40 mio.kr.
2023 – 75 mio.kr.
2024 - 35 mio.kr.

umframt upphæddin parkering og møgulig upphædd í sambandi við skiftirúmsviðurskifti. Sí seinni í tekstinum.

Í sambandi við viðgerðina á heysti 2020 varð eisini viðgjørt evnini viðv. parkeringsviðurskiftum og skiftirúmum.

**Viðv. parkeringsloysn**
Umsitingin og ráðgevar hava verið í dialogi við byggimálsdeildina og hava funnið fram til eina loysn at nøkta nýggja tørvin á parkeringsplássum í nærumhvørvinum. Talan er um eina loysn har umleið helvtin av teimum 45 eyka plássunum verður funnin við Eysturskýlið á Tórsvølli og hin helvtin við Vestara skýlið við Ovara vøll.

Kostnaðarmetingin er umleið 4,9 mio.kr. til 45 nýggj pláss og kann vera framt í 2022 um tøk fígging verður og annars í 2023. Henda (hetta kemur afturat teimum 211.797 tkr.)

**Viðv. eyka skiftirúmum**
Í málunum er samtykt at kanna ymsar møguleikar, men er tað ikki komið á mál. Greitt verður á fundinum frá ymiskum hugsaðum loysum og mettum kostnaðum.

**Viðgerð í nevnd og býráð**
Vegna atlit til sáttmálaviðurskifti, útbjóðingar- og kappingarviðurskifti v.m. verður mælt til at málið verður viðgjørt á býráðsfundi fyri stongdum hurðum.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin, deildarleiðarin á bygningsdeildini og mentamálaleiðarin mæla nevndini til at samtykkja ein heildarkostnað fyri langhylsverkætlanina á 211.797.000 kr.
**Mentamálanevndin 09. februar 2022:** Samtykt, at heildarkostnaðurin fyri langhylsverkætlanina er kr. 211.797.000 við tí viðmerking, at upphæddin ikki fevnir um parkeringsloysn og nýggj skifti- og brúsirúm, harundir til rørslutarn. Málið at beina í býráðið um fíggjarnevndina.
**Fíggjarnevndin 16. februar 2022:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býraðið við teirri viðmerking, at kostnaðurin er íroknaður kommunalt mvg.
**Býráðsfundur 24. februar 2022:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti**:
Støðug gongd er á verkætlanini við langhyli og vælverudepli í Gundadali.

Í framskrivingum av útreiðslum, væntaðum og óvæntaðum, fer tó skjótt at sansa at. Hóast tað eru settir pengar av útyvir sjálvan arbeiðstøkusáttmálan, fer hetta at verða ov lítið.

Orsøkirnar eru fleiri. Sum nevnt í samtyktari málslýsing í november í 2020 eru útreiðslur til 42 parkeringspláss ikki við og fíggjaðar av verandi langhylsverkætlan. Upplýst varð í november 2020, tá onki prosjekt fyrilá, at hetta kundi koma at kosta uml kr. 8 mió. Hetta kann tó gerast væl bíligari. 42 p-pláss aftrat í Gundadalsøkinum umframt ábøtir á verandi Gundadalsveg nærhendis svimjihøllini kunnu gerast liðug fyri  tkr. 2.730. Ætlanin er góðkend av byggimálsdeildini.

Á sumri/heysti 2021 eru samráðingar millum TK og arbeiðstakara um verkætlanin skal steðga í eina tíð og møguliga gerast øðrvísi. Avtala er síðani gjørd millum partarnar, hvussu hesin parturin skal samsýnast. Í beinleiðis og avleiddum útreiðslum kostar hetta hetta verkætlanini tkr. 3.800. Hesin parturin er ei heldur fíggjaður av verandi karmi til lanhylsverkætlanina.

Nakað er sett í kostnaðarætlanini til prísvøkstur. Á leið tað sum plagar at verða sett av til prísvøkstur sammet við aðrar verkætlanir. Hendan upphædd hevur víst seg væntandi at verða ov lítil. Príshækkingar serliga á tilfari hava verðið væl størri enn mett eftir sáttmálasamráðingar og undirskrift í 2020. Framskrivingar siga, at hesin posturin kann fara væl uppum tað, sum er avsett. Ov tíðliga er tó at siga hvussu nógv.

**Tilmæli**:
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin og verkætlanarneliðari mæla til at játta tkr. 6.530 til p-pláss í økinum og samsýning fyri steðg vm. íløgujáttanini fyri 2024 til kontu 5775 løgukonta  L57015 Svimjihøll, og at verkætlanarleiðsla og bygginevnd venda aftur seinni við framskrivinum av prísvøkstri.
**Mentamálanevndin 30. november 2022:** Tikið av skrá.

**Ískoyti**:
Arbeiðið við nýggju langhylsverkætlanini gongur rímiliga væl og enn eftir ætlan. Fyri framman standa stórar veitingar og bygningurin stendur fyri at verða innilokaður.

Í framskrivingum av útreiðslum, væntaðum og óvæntaðum, sansar nú at. Hóast tað eru settir pengar av útyvir sjálvan arbeiðstøkusáttmálan til aðrar útreiðslur í samlaðu kostnaðarmetingini, fer hetta í summum førum at verða ov lítið.

Orsøkirnar eru nakrar.

- Sum nevnt í samtyktari málslýsing í november í 2020 eru útreiðslur til 42 parkeringspláss ikki við í kostnaðarætlanini av verkætlanini. Upplýst varð í november 2020, tá onki prosjekt fyrilá um parkeringspláss, at hetta kundi kom at kosta um 5 mió kr. Tað vísir seg, at hetta tó kann gerast bilígari.
  Ætlan við 42 p-pláss afturat í Gundadalsøkinum umframt nakrar ábøtir á verandi Gundadalsveg nærhendis svimjihøllini, kann gerast liðugt fyri 2.700 tkr

- Á sumri og heysti 2021 eru samráðingar millum TK og høvuðsarbeiðstakara um verkætlanin skal steðga í eina tíð og møguliga gerast øðrvísi. Avtala er seinni gjørd millum partarnir hvussu hesin parturin skal samsýnast. Í beinleiðis útreiðslum verða tað 2.500 t.kr og í avleiddum útreiðslum til eftirlit, byggileiðslu og prísvøkstri av tíðarleinging aðrar 1.300 t.kr. Hetta er ikki fíggjað av verandi karmi til verkætlanina við langhyli

- Nakað er sett í samlaðu kostnaðarætlanini til prísvøkstur. Á leið tað sum plagar verða at sett av til prísvøkstur sammet við aðrar verkætlanir. Hendan upphædd vísir seg væntandi at verða ov lítið. Og hetta er tað sum rakar búskettið harðats. Príshækkingar á serliga tilfari hava verðið væl størri enn mett til sáttmálasamráðingar og undirskrift í 2020. Framskrivingar siga at hesin posturin kann fara væl uppum tað sum er avsett. Framskrivingar siga um 23 mió tilsamans í príshækkingum, og settar eru bara um 7 mió av til hetta í verandi kostnaðarætlan.

**Tilmæli**:
Tekniski stjóri, trivnaðarstjórin, leiðarin á byggideildini og verkætlanarleiðarin mæla til at játta 6.500 tkr. til p-pláss í økinum og samsýning fyri arbeiðssteðg v.m., og at játta 16.000 tkr. til príshækkingar, t.e. tilsamans 22.500 tkr, til løgukontu 5775 Ítróttaanlegg L57015 Langhylur, og at upphæddin verður játtað í fíggjarætlanini fyri 2024.
**Mentamálanevndin 07. juni 2023:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í fíggjarnevndina.
**Fíggjarnevndin 14. juni 2023:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Kári Johansen og Elsa Berg, tekur undir við mentamálanevndini og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson, atkvøður blankt.

**Býráðsfundur 21. juni 2023:** Atkvøtt varð um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 12 atkvøðum fyri, ongari ímóti og einari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Súna Mørk, Bjørg Dam, Elsa Berg, Jákup Dam, Gunvør Balle, Annika Olsen, Kristian Martin Skála og Súsanna Olsen.

Blankt atkvøddi: Tróndur Sigurðsson.

**Ískoyti:**
Kunning um óvanligar príshækkingar, sí frágreiðing: Langhylurin – prísregulering.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á Bygningsdeildini mæla bygginevndini til at umrøða frágreiðingina.

**Mentamálanevndin 11. mars 2024:** Málið umrøtt og samtykt at beina málið í fíggjarnevndina til støðutakan.

**Fíggjarnevndin 13. mars 2024:** Málið umrøtt.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin vísir til ásetingarnar í ABF06, sum eru galdandi fyri høvuðsarbeiðstøku-sáttmálan millum kommununa og J&K Petersen, og mælir til at velja ástøðumann at meta um kravið á prísregulering í byggitíðarskeiðnum.

**Fíggjarnevndin 17. apríl 2024:** Útsett.

**Ískoyti:**
Formaðurin ynskir málið á skrá.

Á seinasta bygginevndarfundi varð ætlan og kostnaður umbiðin um at víðka verandi brúsurúm við fleiri brúsum. Økið, sum arbeiðast skuldi við vóru rúmini, har solarium einaferð var. Sambært uppskotinum kunnu gerast tilsamans 26 brúsir (13 til hvørt skiftingarrúmið m/k). Sambært kostnaðarmetingini kemur at arbeiðið at kosta uml. 2,83 mió v/mvg. Sí eisini hjáløgdu framløgu.

Fígging er ikki til endamálið í játtanini til langhylin, og játtan er heldur ikki sett av á løguætlanini fyri grein 5 ítrótt. Tað merkir, at skal samlaði fíggjarkarmurin økjast við hesi upphædd, krevst onnur fígging.

**Tilmæli:**

Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin taka undir við sjálvari ætlanini við fleiri brúsum, men hava ikki fígging at vísa á.

**Mentamálanevndin 15. mai 2024:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og taka fíggingina av ókendum og beina málið í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 22. mai 2024:** Málið útsett.

**Ískoyti:**
Víst verður til tilmælið til fíggjarnevndina 17. apríl 2024. Síðani tá hevur kommunan fingið løgfrøðiliga meting av kravinum um óvanligar príshækkingar. Sí skjøl.

**Tilmæli:**
Tekniski stjóri vísir til tilmælið til fundin 17. apríl 2024 um at velja ein ástøðumann.

**Fíggjarnevndin 30. mai 2024:** Samtykt at heimila umsitingini at gera semju um kr. 6,5 mió til fulla og endaliga uppgerð av samlaðu verkætlanini við avhendan. Málið verður beint í býráðið til tvær viðgerðir umvegis fíggjarnevndina.

**Býráðsfundur 30. mai 2024:** Einmælt samtykt.

# 141/24 Útstykking til sethús í Stórutjørn

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 20.06.2022 | 150/22 | 22/02943-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 22.06.2022 | 183/22 | 22/02943-1 |
| 3 Byggi- og býarskipanarnevndin | 29.05.2024 | 102/24 | 22/02943-1 |
| 4 Fíggjarnevndin | 30.05.2024 | 154/24 | 22/02943-1 |
| 5 Býráðsfundur | 30.05.2024 | 141/24 | 22/02943-1 |

**Upprunin til málið**
Politiskt ynski er at seta gongd á bústaðarbyggingina við Stórutjørn. Seinastu árini er íbúgvaratalið í Tórshavnar kommunu vaksið heilt nógv, og er tí stórur tørvur á nýggjum bústøðum í kommununi.

**Lýsing av málinum**
Síðani Bústaðarpolitikkurin varð gjørdur í 2018, eru nógvar íbúðir bygdar, umframt at útstykkingin oman fyri Argjahamar, sum er í umbúnað, í størstan mun verður til raðhúsabygging. Tað eru eftir hondini nógv ár síðani nøkur sethúsaútstykking var gjørd í Hoyvík, og tykist tørvurin á sethúsum stórur.

Í februar 2022 varð avtalað gjørd við ráðgevar um at gera eina heildarætlan fyri Stórutjørn, og hevur miðvíst verið arbeitt við at savna og greina viðurskiftini, sum gera seg galdandi fyri eina tílíka planlegging. Nú verður arbeitt við at skipa ymisku økini til bústaðarøkir, fríøkir o.s.fr.

Umsitingin sær møguleikar í at fara undir eina sethúsa útstykking í økinum, og er hugsanin, at fáa ráðgevarnar at hjálpa okkum við at nágreina økið og hvussu tað skal skipast. Síðani er ætlanin at bjóða verkætlanina út sum eina heildararbeiðstøku, fyri síðani at luta grundstykkir út.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Økið liggur í Almennu byggisamtyktini sum A3 í 3. Grundumráði, sum ásetur:

1. Økið verður lagt til blandaða bústaða- og miðstaðabygging, har loyvt er at hava handlar, smáhandverk og minni virkir, skrivstovur, stovnar, samkomuhús, heilsubótarhøli og tílíkt.
2. Útstykkingar kunnu bert gerast sambært serstakari byggisamtykt.

**Upplýsingar frá umsitingini**
-

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Mál nr. 18/03468 Skipan av Stórutjøn er yvirskipaða málið fyri økið. 28. apríl 2022 var málið seinast fyri býráðið, har tað varð endaliga samtykt, at:

- Játta fígging til keyp at lendinum til Innkomuvegin og komandi vinnuútstykkingina Ovari hjalli.
- at heimila umsitingini at gera avtalu við Búnaðarstovuna um at keypa lendi í stigum til framtíðar útstykkingar burtur av matr. nr. 1æf og 139ed. So hvørt, sum tørvur er á fígging, verður málið lagt fyri aftur avvarðandi nevndir til støðutakan.
- at heimila umsitingini at samráðast við og gera avtalu við festaran um avlopstilfar og um at framtíðartryggja møguleikarnar at reka landbúnaðarvirksemi á festinum. Avtalan verður at liggja fyri aftur og góðkenna av avvarðandi nevndum.

Síðani málið varð samtykt hevur verið arbeitt við:

- at fáa eina avtalu í lag við festaran. Hendan avtalan er nú so mikið væl ávegis, at nú er tað bert byggisamtyktin sum kemur inn yvir festijørðina, sum skal broytast til 4. gr. Hetta byggisamtyktarmálið, **mál nr. 22/02687 Broyting av almennu byggisamtyktini fyri øki við**

**Stórutjørn, partur av matr. nr. 139a og 135ed**, Hoyvík, verður eftir ætlan avgreitt í býráðnum 22. juni 2022.

- at gera avtalu við Búnaðarstovuna um at keypa lendi í stigum. Hendan avtalan er váttað av Búnaðarstovuni. Tá økið, har útstykkingin skal gerast, er nágreinað, verður málið lagt aftur fyri avvarðandi nevndir viðv. støðutakan til sjálvt keypið til útstykkingina.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☒ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at heimila umsitingini at fara undir at nágreina økið til sethúsaútstykkingina, gera útbjóðingartilfar til verkætlanina og fyrireika útbjóðing og at beina málið aftur í avvarðandi nevndir, tá hesi viðurskiftini eru avgreidd.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 20. juni 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 22. juni 2022:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson, Annfinn Brekkstein og Annika Olsen, tekur undir við byggi- og býarskipanarnevndini.

Ein minniluti, Elsa Berg, tekur ikki undir við byggi- og býarskipanarnevndini vísandi til, at byggjast skal meira plásseffektivt við raðhúsum og íbúðum heldur enn sethúsum umframt at neyðugar árins- og lendiskaningar ikki eru gjørdar.

**Ískoyti:**
Arbeitt hevur verið við at nágreina økið til sethúsaútstykkingina (býlingur 1 í heildarætlanini). Samstundis er arbeiðið at grava av til býling 1 og býling 4 bjóðað út fyri at gera hesi øki klár til at taka ímóti gróti frá innkomuvegnum.

Tórshavnar kommuna hevur bjóðað avgrevsturin av parti av Stórutjørn út, sum høvuðsarbeiðstøku til 5 arbeiðstakarar. Arbeiðstakararnir vóru P/F Articon, P/F J. & K. Petersen, Sp/F RTS, Sp/F Andrias Berg og Sp/f Plan.

Lisitatiónin fyri verkætlanina var hósdagin tann, 01.02.2024 kl 13.00. Tað lægsta og einasta boðið, var frá P/F Articon. Upphæddin er áljóðandi kr. 3.844.105,00.

Afturat avgrevstrinum kemur kostnaðurin til bóndan fyri at taka ímóti avgrevstrinum. Kostnaðurin av hesum er mettur til kr. 2.139.187,20.

Samlað upphædd fyri hesa verkætlanina er áljóðandi kr. 5.983.292,-, sí Kostnaður.pdf jnr. 24/00694-5.

Síðani P/F Articon vann hetta útboðið hevur fyritøkan handað kommununi eitt tilboð um at byggibúna býlingarnar 1 og 4, sum heildararbeiðstøku fyri samlaðan kostnað á kr. 74.654.722,-. Tá er roknað við fínplanering av grundstykkjum; vegir og gongubreytir, liðugt asfalterað við kantsteinum, leiðingum og veitingum og gøtuljósum. Tilboðið inniheldur eisini fjarhitagrøv, men neyðugt er við avtalu við Fjarhitafelagið um skipan av fjarhita í økinum. Kostnaðurin er uttan mvg.

Kommunan hevur ikki ognað sær lendið til økið 1 og 4 við Stórutjørn enn. Gerast skal avtala við Búnaðarstovuna um keyp av hesum lendi og vátlendinum millum býlingarnar og innkomuvegin. Talan er um umleið 100.000 - 150.000 m², alt eftir um vátlendið millum útstykkingina og innkomuvegin skal íroknast keypinum hesa ferð.

Samráðingar hava verið millum Tórshavnar kommunu og P/F Articon, sum eru komnar til ta fyribils niðurstøðu, at tilboðið er galdandi sum eitt rammutilboð, har umsitingin saman við P/F Articon ger tillagingar innan tilboðsrammuna á kr. 74.654.722,- (79.320.642,13 við mvg), har samlað longd av vegum, tal av íbindingum og vídd av planeringum verða varðveitt. Hetta verður somuleiðis gjørt við atliti til samtyktu heildarætlanina fyri Stórutjørn, m.a at skipast skulu økir til ruskinnsavnan og – skiljing, felags parkeringsøkir og frílendi.

Afturat tilboðnum hevur P/F Articon givið eina optión upp á at stoypa reinsiverk og leggja kloakkering millum útstykkingarnar við Stórutjørn, reinsiverkið og millum reinsiverkið og útlát út á sjógv eystan fyri Sandvíkar. Kostnaðurin fyri hesa optión er kr. 6.662.505,- umframt mvg. Henda optiónin kann síggjast sum verkætlan fyri seg, sum er høllin við Tjarnir, vinnuútstykkingin á Ovara Hjalla og framtíðar útstykking (býlingur 2, 3, 5 og 6) við Stórutjørn at gagni.

Eisini verða óvæntaðar útreiðslur fyri indeksreguleringar og óvæntaðar byggiharraútreiðslur væntandi.

Tórshavnar kommuna hevur grundleggjandi ta støðu, at arbeiðir eiga at verða bjóðað út. Í hesum førinum hevur P/F Articon sjálvboðið latið inn tilboð um hetta arbeiðið. Mett verður, at ein týðandi partur av tilboðnum er at koyra inn og lata gróttilfar frá Marknagili (innkomuvegnum) inn á økið. Hesin partur av arbeiðinum er helst ikki møguligur at bjóða út, av tí at grótið í Marknagili er partur av arbeiðstøkuni at gera innkomuvegin, sum P/F Articon hevur í heildararbeiðstøku. Eisini hevur P/F Articon latið inn lægsta boð at grava av mold og eyr fyri at klárgera økið til býling 1 og 4 til at leggja grót inn á hesi økir.

Viðmerkjast skal, at um arbeiðið hevði verið boðið út, hevði hetta helst seinkað arbeiðið í sambandi við at fáa flutt grótið úr Marknagili til Stórutjørn. Har afturat hevði hetta viðført, at grót helst hevði verið lagt upp í rúgvur á økinum við Stórutjørn ella aðrastaðni í kommununi, inntil arbeiðið at gera útstykkingarnar hevði verið sett í verk. Um annar arbeiðstakari hevði skula framt útstykkingina, hevði hetta helst, sum útgangsstøði, muga bíða til P/F Articon hevði avhendað síni arbeiðir í sambandi við innkomuvegin.

Fyrimunir við at taka av tilboðnum frá P/F Articon eru:
- Farast kann undir útstykkingina beinanvegin
- Gróttilfeingið frá innkomuvegnum verður endurnýtt í einari arbeiðsgongd, umhvørvinum at gagni.
- Kostnaðurin er á slíkum støði, at keypskostnaðurin fyri byggiklár grundstykki er lágur i mun til aðrar útstykkingar í kommununi.
- Tórshavnar kommuna fær til vega byggilendi til bústaðarbygging til uml. 150 búeindir, sum stórur tørvur er á.

Í framhaldandi tilgongdini er umframt omanfyri nevndu spurningar í sambandi við verkætlanina neyðugt at nágreina tíðarætlan, endaligan sølukostnað, gjaldsætlan og søluætlan fyri grundstykkir.

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>30. mai 2024 | Blað nr.: 609<br><br>Formansins merki: |

**Skjøl:**
J.nr. 22/02943-4 VS: Ústykking við stórutjørn – sjálvboðið tilboð
J.nr. 22/02943-5 Ústykking við stórutjørn – sjálvboðið tilboð – støðumynd

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☐
Eykajáttan ☒
Loka verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| | | | 6475 | | Útstykking við Stórutjørn, B1, B4 | ja | 79.320.643,- |
| | | | | | | | |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | 79.320.643,- |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2024/2026 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | 500.000 |

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býararkitekturin og býarverkfrøðingurin mæla til:
- at støða verður tikin til, um takast skal av tilboðnum frá P/F Articon.
- at heimila umsitingini at gera tillagingar í verkætlanini, saman við P/F Articon, innan fyri tilboðskarmin á kr. 79.320.643,- við kommunalum mvg, og gera sáttmála um arbeiðið.
- at í fyrstu atløgu verða játtaðaðar kr. 79.320.643,- sum útlegg á nýggja verkætlan á konto 6475, «Útstykking við Stórutjørn, B1 og B4.
  at málið verður beint víðari í býráðið til tvær viðgerðir umvegis teknisku nevnd og fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 29. mai 2024:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 30. mai 2024:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið til tvær viðgerðir.

**Býráðsfundur 30. mai 2024:** Samtykt við 11 atkvøður fyri og 2 blonkum við fyrstu viðgerð og beint víðari til aðru viðgerð.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Súna Mørk, Bjørg Dam, Turið Horn, Jakup Dam, Birgir Nielsen og Súsanna Olsen

Blankt atkvøddu: Gunvør Balle og Annika Olsen.

**<u>FUNDURIN LOKIN KL. 20:30</u>**

**<u>GERÐABÓKIN GÓÐKEND:</u>**

| | | |
|---|---|---|
| Heðin Mortensen | Annfinn Brekkstein | Tróndur Sigurðsson |
| Kári Johansen | Kristianna Winther Poulsen | Súna Mørk |
| Bjørg Dam | Jákup Dam | Gunvør Balle |
| Annika Olsen | Birgir Nielsen | Súsanna Olsen |
| | Turið Horn | |